Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 30.03.2023
Mál nr.: 22/12887
Málsviðgjørt: rn/sr/uk
Ummælistíð: 12/09/22-12/10/22
Eftirkannað: 09. februar 2023

Uppskot til

Løgtingslóg
um
kapping

Kapittul 1
Endamál, virkisøki og varaseting

Endamál

§ 1. Endamál løgtingslógarinnar er við virknari kapping at fremja eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu til gagns fyri fyritøkur og brúkarar.

Virkisøki

§ 2. Løgtingslógin fevnir um øll sløg av vinnuvirksemi og almennum stuðli til vinnuvirksemi.
Stk. 2. Reglurnar í 2. og 3. kapitli eru ikki galdandi, um ein kappingaravmarking er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering. Ein kappingaravmarking, sum er ásett av einum kommunustýri, er bert ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering, tá ið kappingaravmarkingin er neyðug, fyri at kommunustýrið kann útinna tær uppgávur, ið tað hevur fingið álagt sambært lóggávu.
Stk. 3. Avgerðir, sum nevndin í einum kommunalum felagsskapi sambært § 51 í løgtingslóg um kommunustýri tekur, verða javnsettar við avgerðir, sum kommunustýri tekur sambært stk. 2.
Stk. 4. Avvarðandi landsstýrismaður ger av, hvørt ein kappingaravmarking er fevnd av stk. 2. Heitir Kappingareftirlitið á avvarðandi landsstýrismann um at taka avgerð, um ein kappingaravmarking er fevnd av stk. 2, skal avvarðandi landsstýrismaður taka avgerð í seinasta lagi 4 vikur eftir, at áheitanin um avgerð er móttikin. Kappingareftirlitið kann leingja freistina.
Stk. 5. Um Kappingarráðið metir, at ein almenn regulering ella stuðulsskipan kann hava skaðilig árin á kappingina ella á annan hátt kann forða eini fulldyggari samfelagsligari tilfeingisnýtslu, kann Kappingarráðið lata avvarðandi landsstýrismanni og landsstýrismanninum í kappingarmálum eina frágreiðing, ið vísir á møgulig skaðilig árin á kappingina, og koma við uppskoti um, hvussu kappingin kann fremjast. Avvarðandi

landsstýrismaður skal eftir samráðing við landsstýrismannin í kappingarmálum svara Kappingarráðnum í seinasta lagi 4 mánaðir eftir, at frágreiðing frá Kappingarráðnum er móttikin. Kappingarráðið kann leingja freistina.
Stk. 6. Er talan um vinnuvirksemi, sum heilt, lutvíst ella í ávísan mun virkar í lívd av almennum einkarrætti, stuðli ella aðrari vernd móti kapping, hevur Kappingareftirlitið heimild til at geva boð um bókhaldsligan skilnað millum tann partin av rakstrinum, sum er undir einkarrætti, stuðli ella undir aðrari vernd, og hinumegin tann partin av rakstrinum, sum er í frælsari kapping.

§ 3. Løgtingslógin er ikki galdandi fyri lønarviðurskifti og arbeiðsviðurskifti. Kappingareftirlitið kann tó krevja upplýsingar frá feløgum og fyritøkum um lønarviðurskifti og arbeiðsviðurskifti, sum hava týdning fyri virksemið hjá eftirlitinum.

§ 4. Ásetingarnar í kapitli 2 eru ikki galdandi fyri avtalur, viðtøkur og samskipaða framferð innanfyri somu fyritøku ella samtøku.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um stk. 1, undir hesum reglur um, hvat skilst við eini avtalu og tílíkum í somu fyritøku ella samtøku.

Varaseting

§ 5. Til tess at skilmarka viðkomandi marknaðir eftir hesi løgtingslóg, kannar Kappingareftirlitið eftirspurningsvaraseting og útboðsvaraseting og møguliga kapping. Møgulig kapping skal kannast, tá ið støðan hjá viðkomandi fyritøkum á marknaðinum er skjalfest, og støðan gevur orsøk til iva, um lógarbrot er framt.
Stk. 2. Kappingareftirlitið kann taka uttanhýsis serkunnleika við í metingina eftir stk. 1.

Kapittul 2

Forboð fyri kappingaravlagandi avtalum

§ 6. Ikki er loyvt fyritøkum og øðrum at gera avtalur, ið beinleiðis ella óbeinleiðis hava til endamáls ella sum fylgju at avmarka kappingina.
Stk. 2. Avtalur eftir stk. 1 kunnu til dømis vera:
1) at áseta keypsprísir, søluprísir ella aðrar viðskiftatreytir,
2) at avmarka ella stýra framleiðslu, sølu, tøkniligari menning ella íløgum,
3) at býta sundur marknaðir ella veitingarkeldur,
4) at áseta ymiskar treytir fyri veitingum, ið hava sama virði, mótvegis handilsfelagum, sum av tí verða verri fyri í kappingini,
5) at seta sum treyt fyri at gera eina avtalu, at avtaluparturin eisini góðkennir ískoytisveitingar, sum hvørki natúrliga ella sambært handilssiðvenju hava samband við innihaldið í avtaluni,
6) at tvær ella fleiri fyritøkur samskipa teirra kappingarligu atferð við at skipa samváða, ella
7) at seta bindandi prísir á víðarisølu ella á annan hátt at virka fyri, at ein ella fleiri fyritøkur ikki víkja frá vegleiðandi søluprísum.

Stk. 3. Stk. 1 er eisini galdandi fyri viðtøkur í samtøku av fyritøkum og samskipan millum fyritøkur.
Stk. 4. Kappingareftirlitið kann sambært § 26 geva boð um at steðga brotum á stk. 1. Til tess at ganga iva hjá Kappingareftirlitinum á møti viðvíkjandi stk. 1, kann Kappingareftirlitið eisini gera tilsagnir, sum fyritøkur hava latið, bindandi sambært § 27.
Stk. 5. Avtalur og viðtøkur, ið eru bannaðar eftir stk. 1-3, eru ikki galdandi uttan so, at tær eru undantiknar sambært § 7, eru frítiknar sambært §§ 8 ella 10 ella hava fingið eina váttan sambært § 9.

§ 7. Forboðið í § 6, stk. 1, er ikki galdandi fyri avtalur millum fyritøkur, viðtøkur

millum samtøk av fyritøkum ella samskipan millum fyritøkur samanber tó stk. 2-5, um:

1) samlaðu marknaðarpartar hjá luttakandi fyritøkunum ikki eru hægri enn 10 prosent á nøkrum av viðkomandi marknaðum, sum avtalan og annað viðvíkur, tá ið henda er gjørd millum fyritøkur, sum eru ella møguliga kunnu verða kappingarneytar á einum av hesum marknaðum (avtalur millum kappingarneytar), ella
2) marknaðarpartarnir hjá luttakandi fyritøkum einsæris ikki eru hægri enn 15 prosent á nøkrum av viðkomandi marknaðum, sum avtalan og annað viðvíkur, tá ið henda er gjørd millum fyritøkur, sum ikki eru ella verða kappingarneytar á einum av hesum marknaðum (avtalur millum ikki kappingarneytar).

Stk. 2. Í tann mun avtalur millum fyritøkur, viðtøkur í samtøku av fyritøkum ella samskipan millum fyritøkur ikki kunnu flokkast undir stk. 1, nr. 1 ella 2, eru marknaðarpartarnir í stk. 1, nr. 1, galdandi.

Stk. 3. Undantøkini í stk. 1 eru ikki galdandi, um avtalan, viðtøkan ella samskipanin hevur til endamáls at avmarka kappingina.

Stk. 4. Hóast stk. 1, er forboðið í § 6, stk. 1, galdandi fyri avtalur millum fyritøkur, viðtøkur í samtøku av fyritøkum og samskipan millum fyritøkur, um avtalan og annað saman við líknandi avtalum og øðrum avmarkar kappingina.

Stk. 5. Undantøkini í stk. 1 eru galdandi, hóast samlaðu marknaðarpartarnir hjá luttakandi fyritøkum fara útum ásettu mørkini tvey fylgjandi álmanakkaár.

Stk. 6. Landsstýrismaðurin kann eftir ummæli frá Kappingareftirlitinum áseta nærri reglur um útrokning av umsetningi og øðrum viðurskiftum, sum hava týdning í sambandi við útrokning av marknaðarpørtum eftir hesi løgtingslóg, undir hesum reglur um avtalur og annað, sum í minni mun fara útum ásettu mørk.

§ 8. Forboðið í § 6, stk. 1, er ikki galdandi, um ein avtala millum fyritøkur, ein viðtøka í samtøku av fyritøkum ella samskipan millum fyritøkur:

1) er við til at styrkja fulldygga framleiðslu ella útbreiðslu av vørum ella tænastuveitingum ella fremur tøkniliga ella búskaparliga menning,
2) tryggjar brúkarum rímiligan part av tí fyrimuni, sum kappingaravmarkingin hevur við sær,
3) ikki áleggur fyritøkum avmarkingar, sum eru óneyðugar fyri at náa hesum endamálum, og
4) ikki gevur fyritøkum møguleika at útihýsa kapping innan ein týðandi part av ávísum vørum ella tænastuveitingum.

Stk. 2. Kappingareftirlitið kann eftir fráboðan frítaka eina avtalu millum fyritøkur, eina viðtøku í samtøku av fyritøkum ella samskipan millum fyritøkur frá forboðnum í § 6, stk. 1, um Kappingareftirlitið metir, at treytirnar í stk. 1 eru loknar. Fráboðan av viðkomandi avtalu og øðrum við umbøn um frítøku frá § 6, stk. 1, verður latin Kappingareftirlitinum. Kappingareftirlitið ásetir nærri reglur um fráboðan, undir hesum reglur um nýtslu av serligum fráboðanarskjølum.

Stk. 3. Avgerðir eftir stk. 2 og 4 skulu tilskila tíðarskeiðið, avgerðin um frítøku er galdandi. Treytir kunnu leggjast við eini frítøku.

Stk. 4. Eftir fráboðan kann Kappingareftirlitið leingja frítøkuna, um Kappingareftirlitið metir, at treytirnar í § 8, stk. 1, framvegis eru loknar, samanber tó § 8, stk. 3.

Stk. 5. Kappingareftirlitið kann broyta ella taka aftur avgerð sambært stk. 2 ella 4, um:

1) viðurskifti, sum vóru grundarlag undir avgerðini, eru broytt munandi,
2) luttakarar í avtaluni og øðrum ikki halda ásettu treytirnar fyri frítøkuni, ella
3) avgerðin er tikin við støði í skeivum ella villleiðandi upplýsingum frá pørtum í avtaluni og øðrum.

§ 9. Kappingareftirlitið kann eftir fráboðan frá eini fyritøku ella samtøku av fyritøkum vátta, at ein avtala, viðtøka ella samskipan sambært viðurskiftum, ið Kappingareftirlitið hevur kunnleika til, ikki kemur undir forboðið í § 6, stk. 1, og at tað tí ikki er orsøk til at geva boð sambært § 6, stk. 4. Kappingareftirlitið ásetir nærri reglur um fráboðan, undir hesum reglur um nýtslu av serligum fráboðanarskjølum.

§ 10. Eftir ummæli frá Kappingareftirlitinum kann landsstýrismaðurin áseta reglur um frítøku frá forboðnum í § 6, stk. 1, fyri bólkar av avtalum, viðtøkum og samskipanum, ið lúka treytirnar í § 8, stk. 1.
Stk. 2. Tá ið avtala, viðtøka í samtøku av fyritøkum ella samskipan millum fyritøkur, sum er fevnd av bólkafrítøkuni, latin sambært stk. 1, í einum ítøkiligum føri hevur avleiðingar, sum ikki eru sambærligar við treytirnar í § 8, stk. 1, kann Kappingareftirlitið afturkalla frítøku sambært stk. 1 fyri fyritøkur og annað, sum eru partar í avtaluni og øðrum.

Kapittul 3
Misnýtsla av ráðandi støðu

§ 11. Ikki er loyvt eini ella fleiri fyritøkum og øðrum at misnýta eina ráðandi marknaðarstøðu.
Stk. 2. Kappingareftirlitið skal eftir umsókn vátta, um ein ella fleiri fyritøkur hava eina ráðandi støðu. Boðar Kappingareftirlitið frá, at ein fyritøka ikki hevur ráðandi støðu, er fráboðanin bindandi, til Kappingareftirlitið afturkallar fráboðanina.
Stk. 3. Misnýtsla sambært stk. 1 kann til dømis vera:

1) beinleiðis ella óbeinleiðis at noyða órímiligar keypsprísir ella søluprísir ella aðrar órímiligar handilstreytir á einhvønn,
2) at avmarka framleiðslu, sølu ella tøknifrøðiliga menning til bága fyri brúkaran,
3) at áseta ymiskar treytir fyri veitingar, ið hava sama virði mótvegis handilsfelagum, sum av tí verða verri fyri í kappingini, ella
4) at seta sum treyt, áðrenn avtala kann gerast, at avtaluparturin góðkennir ískoytisveitingar, sum natúrliga ella eftir handilssiðvenju ikki hava samband við tað, ið avtalan viðvíkur.

Stk. 4. Kappingareftirlitið kann sambært § 26 krevja, at brot á stk. 1 verða at steðga. Til tess at ganga iva hjá Kappingareftirlitinum á møti viðvíkjandi stk. 1, kann Kappingarráðið eisini gera tilsøgn, sum fyritøkan hevur givið, bindandi sambært § 27.
Stk. 5. Kappingareftirlitið kann eftir umsókn frá eini ella fleiri fyritøkum boða frá, at ávísur atburður sambært teimum viðurskiftum, sum eru Kappingareftirlitinum kunnug, ikki er fevnd av stk. 1, og at tað tí ikki er grundarlag fyri at geva boð sambært stk. 4.
Stk. 6. Kappingareftirlitið kann áseta nærri reglur um tilfar, ið skal vera tøkt, til tess at taka avgerð eftir stk. 2 og 5.

Kapittul 4
Kappingaravlagandi stuðul

§ 12. Kappingareftirlitið kann geva boð um, at almennur stuðul til fyrimuns fyri ávíst vinnuvirksemi skal steðga ella afturrindast.
Stk. 2. Boð sambært stk. 1 kunnu gevast, tá ið almenni stuðulin:

1) beinleiðis ella óbeinleiðis hevur til endamáls ella sum avleiðing at avlaga kappingina, og
2) ikki er lógligur sambært almennari regulering.

Stk. 3. Avgerð, um veittur almennur stuðul er lógligur sambært almennari regulering, verður tikin av avvarðandi landsstýrismanninum ella avvarðandi kommunala eftirlitsmyndugleika, um annað ikki ásett í lóg. Avgerð, um veittur

almennur stuðul er lógligur sambært almennari regulering, skal takast í seinasta lagi 4 vikur frá tí, at áheitan frá Kappingareftirlitinum er móttikin. Kappingareftirlitið kann leingja freistina.
Stk. 4. Boð sambært stk. 1 um at afturrinda almennan stuðul kann gevast privatum vinnufyritøkum, sjálvsognarstovnum og fyritøkum, sum heilt ella lutvíst eru almennar og vera riknar sum partafelag. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, at boð sambært stk. 1 um afturrindan av stuðli eisini kann gevast ávísum vinnuvirksemi, sum heilt ella lutvíst er almenn ogn, ið verður rikið í vinnufelagslíknandi líki.
Stk. 5. Heimildin hjá Kappingareftirlitinum sambært stk. 1 at geva boð um at afturrinda almennan stuðul fyrnast 5 ár eftir, at almenni stuðulin er latin. Kappingareftirlitið ásetir rentur í sambandi við afturrindan sambært stk. 1. Renting fer fram sambært lov om renter ved forsinket betaling, m.v. Kappingareftirlitið kann áseta, at renta verður skrivað frá tí degi, at kappingaravlagandi almenni stuðulin fyrstu ferð varð tøkur hjá móttakaranum og til dagin, tá ið kappingaravlagandi almenni stuðulin er rindaður aftur.
Stk. 6. Kappingareftirlitið kann eftir fráboðan vátta, at almennur stuðul sambært teimum viðurskiftum, sum eru Kappingareftirlitinum kunnug, ikki er fevndur av stk. 2, nr. 1, og at tað tí ikki er grundarlag fyri at geva boð sambært stk. 1. Kappingareftirlitið kann áseta nærri reglur um fráboðan, undir hesum reglur um nýtslu av serligum fráboðanarskjølum.

Kapittul 5
Samanleggingareftirlit

§ 13. Samanlegging í hesi løgtingslóg merkir:
1) tá ið tvær ella fleiri fyritøkur, sum hava virkað sjálvstøðugt, verða lagdar saman, ella
2) tá ið ein ella fleiri persónar, sum longu hava ræðið á minst einari fyritøku, ella tá ið ein ella fleiri fyritøkur við keypi av pørtum ella ognum gjøgnum avtalu ella á annan hátt fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á allari ella pørtum av einari ella fleiri fyritøkum afturat.

Stk. 2. Stovnan av samváða, sum varandi hevur um hendi allar funktiónir í eini sjálvstøðugari fyritøku, er at meta sum samanlegging eftir stk. 1, nr. 2.
Stk. 3. Eftir hesi løgtingslóg fæst ræðið á einari fyritøku gjøgnum rættindi, avtalur ella upp á aðrar mátar, sum hvør sær, lutvíst ella samanlagt geva møguleika fyri at fáa avgerandi ávirkan á raksturin í fyritøkuni.
Stk. 4. Talan er ikki um samanlegging eftir stk. 1, tá ið:
1) lánistovnar, fíggjarligar fyritøkur, tryggingarfeløg og annað í sambandi við sítt vanliga virksemi fyribils ogna sær part í fyritøkum við víðarisølu fyri eyga treytað av, at atkvøðurætturin til ognarpartin ikki verður nýttur, ella bert verður nýttur við tí endamáli at fyrireika, at avhending fer fram í seinasta lagi eitt ár eftir yvirtøku, ella
2) ræðið fæst á fyritøku við heimild í lov om konkurs.

Stk. 5. Kappingareftirlitið kann eftir fráboðan leingja freistina í stk. 4, nr. 1, um lánistovnurin, fíggjarliga fyritøkan, tryggingarfelagið og annað veita prógv fyri, at tað ikki hevur verið møguligt at avhenda innan ásettu freistina.

§ 14. Samanleggingar, ið eru fevndar av ásetingunum í hesum kapitli, eru tær, har:
1) tær luttakandi fyritøkurnar samanlagt hava ein árligan umsetning á í minsta lagi 75 milliónir krónur í Føroyum, og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein samlaðan árligan umsetning upp á 15 milliónir krónur í Føroyum, ella
2) minst ein av luttakandi fyritøkunum hevur ein árligan umsetning í Føroyum á minst 75 milliónir krónur, og minst ein av hinum fyritøkunum hevur ein umsetning á minst 75 milliónir krónur á heimsstigi.

Stk. 2. Fer samanlegging fram við yvirtøku av pørtum av eini ella fleiri fyritøkum, verður fyri seljara bert tann parturin av umsetninginum, sum kann knýtast at teimum yvirtiknu ognunum, tikin við í metingina eftir stk. 1.
Stk. 3. Tvær ella fleiri yvirtøkur eftir stk. 2, ið verða framdar í einum tvey ára tíðarskeiði, eru tó at meta sum ein samanlegging, um somu fyritøkur ella persónar luttaka. Í slíkum føri verður samanleggingin mett at vera farin fram, tá ið seinasta yvirtøkan varð framd.
Stk. 4. Eftir ummæli frá Kappingareftirlitinum ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur um útrokning av umsetningi eftir stk. 1, undir hesum reglur um, hvussu umsetningurin fyri fíggjarligar fyritøkur verður roknaður.

§ 15. Kappingareftirlitið tekur avgerð um, hvørt ein samanlegging skal góðkennast ella forbjóðast.
Stk. 2. Ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal góðkennast. Ein samanlegging, sum munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal forbjóðast.
Stk. 3. Í teimum førum, har stovnan av einum samváða sambært § 13, stk. 2, eisini hevur til endamáls ella sum fylgju at samskipa kappingarliga atburðin hjá sjálvstøðugum fyritøkum, verður henda samskipan mett sambært metingarstøðunum í § 6, stk. 1, og § 8, stk. 1, fyri at staðfesta, um samanleggingin kann góðkennast.
Stk. 4. Í sambandi við sína meting eftir stk. 3 leggur Kappingareftirlitið serliga dent á:

1) um tað samstundis eru tvær ella fleiri stovnsetandi fyritøkur, sum hava eyðsýndan leiklut á sama marknaði, sum viðkomandi samváði er á, ella á marknaði í fyrra ella seinna liði í mun til hendan marknaðin, ella á einum nærskyldum marknaði, sum er tætt knýttur at hesum marknaði, og
2) um stovnsetandi fyritøkurnar hava møguleika fyri at forða kapping fyri ein munandi part av viðkomandi vørum ella tænastum.

Stk. 5. Ein samanlegging, fevnd av hesi løgtingslóg, kann ikki fremjast, fyrr enn góðkenning er fingin frá Kappingareftirlitinum uttan so, at undantaksloyvi til tess er fingið frammanundan.
Stk. 6. Kappingareftirlitið kann geva undantak til stk. 5, og til tess at tryggja virkna kapping kann Kappingareftirlitið seta treytir við undantaksloyvið og geva boð.
Stk. 7. Kappingareftirlitið kann eftir eina einfalda málsviðgerð góðkenna eina samanlegging, um Kappingareftirlitið, grundað á tær upplýsingar, sum eru Kappingareftirlitinum kunnugar, metir, at samanleggingin ikki gevur orsøk til ivasemi.

§ 16. Kappingareftirlitið skal hava fráboðan um samanlegging sambært hesi løgtingslóg í seinasta lagi eina viku eftir, at sáttmáli um samanlegging er gjørdur, ella almenn fráboðan er gjørd um samanleggingina, ella at onkur ávísur hevur fingið ræðið á fyritøkuni. Freistin er ein vika frá tí, at eitt av omanfyri nevndu er farið fram, og áðrenn samanleggingin verður framd.
Stk. 2. Kappingareftirlitið kann almannakunngera, at samanlegging er fráboðað. Almannakunngeringin fevnir um nøvnini á luttakandi fyritøkunum í samanleggingini, slag av samanlegging og tær vinnugreinir, sum samanleggingin fevnir um.
Stk. 3. Kappingareftirlitið ger reglur um fráboðan av samanleggingum, undir hesum reglur um nýtslu av serstøkum fráboðanarskjølum og reglur um vanliga og einfalda fráboðan.

§ 17. Ein samanlegging kann fráboðast eftir einføldum ella vanligum leisti.

Stk. 2. Tá ið samanlegging verður fráboðað eftir einføldum leisti, verður rindað ómaksgjald á 50.000 kr.
Stk. 3. Tá ið samanlegging verður fráboðað eftir vanligum leisti verður rindað ómaksgjald á 0,1% av samlaða árliga umsetninginum hjá luttakandi fyritøkunum í Føroyum, tó í mesta lagi 300.000 kr.
Stk. 4. Um viðgerðin av eini samanlegging fráboðað eftir einføldum leisti vísir, at samanleggingin átti at verið fráboðað eftir vanligum leisti, skal ein fráboðan eftir vanligum leisti latast Kappingareftirlitinum saman við skjalprógvi um rindað ómaksgjald sambært stk. 3 við frádrátti av tí ómaksgjaldi, ið frammanundan er rindað sambært stk. 2.
Stk. 5. Ómaksgjald sambært stk. 2-4 skal rindast Kappingareftirlitinum, tá ið samanleggingin verður fráboðað. Skjalprógv um rindað ómaksgjald skal leggjast við fráboðanini. Freistin í § 18, stk. 1, byrjar, tá ið Kappingareftirlitið hevur móttikið fullfíggjaða fráboðan og skjalprógv fyri rindaðum ómaksgjaldi.
Stk. 6. Ein samanlegging verður ikki at rokna sum fráboðað, um ómaksgjald sambært stk. 2 ella 3 ikki er rindað, hóast ákrav. Ein fráboðan av eini samanlegging verður roknað sum fallin burtur, um ómaksgjald ikki er rindað, hóast ákrav, ella ein fráboðan eftir vanligum leisti ikki er latin Kappingareftirlitinum, hóast áminning, samanber tó stk. 4.
Stk. 7. Rindað ómaksgjald sambært stk. 2 og 3 verður ikki afturrindað, uttan so at:

1) fráboðaða samanleggingin ikki er fevnd av fráboðanarskyldu,
2) fráboðanin verður tikin aftur, áðrenn hon er fullfíggjað, ella
3) fráboðanin verður tikin aftur, áðrenn avgerð er tikin sambært § 15, stk. 1 ella 7, og afturtøkan skyldast, at annar almennur myndugleiki hevur noktað samanleggingini.

§ 18. Í seinasta lagi 30 yrkadagar eftir, at váttan er latin fráboðara um, at fráboðanin er fullfíggjað, verður avgerð tikin um, hvørt samanleggingin kann góðkennast eftir einfaldari málsviðgerð sambært § 15, stk. 5, ella um samanleggingin skal kannast nærri.
Stk. 2. Avgerð um at góðkenna ella forbjóða eini samanlegging skal takast í seinasta lagi 90 yrkadagar eftir, at váttan sambært stk. 1 er latin fráboðara, samanber tó stk. 4 og 5.
Stk. 3. Freistin í stk. 2 kann verða longd við 20 yrkadøgum, um ein ella fleiri luttakandi fyritøkur koma við nýggjari ella broyttari tilsøgn. Freistin verður einans longd, um tað, tá ið tilsøgn verður givin, eru færri enn 20 yrkadagar, til avgerð eigur at verða tikin sambært stk. 2.
Stk. 4. Freistin í stk. 2 kann eisini verða longd við 20 yrkadøgum, um Kappingareftirlitið hevur tikið avgerð um hetta, og tann ella tær fyritøkur, sum hava fráboðað, biðja um hetta ella játta hesum.
Stk. 5. Er avgerð ikki tikin innan ásettu freistirnar í stk. 1-4, er hetta at meta sum avgerð um, at samanleggingin er góðkend, samanber tó stk. 6.
Stk. 6. Kærir ein ella fleiri luttakandi fyritøkur um, at fráboðast skal eftir vanligum leisti sambært § 17, stk. 4, steðga freistirnar í § 18, stk. 1-4, til avgerð er tikin í kærumálinum.

§ 19. Kappingareftirlitið kann í sambandi við góðkenning eftir § 15, stk. 2, 1. pkt., áleggja treytir og geva boð um m.a. at tryggja, at luttakandi fyritøkurnar halda eina givna tilsøgn.
Stk. 2. Eftir at samanleggingin er góðkend, kann Kappingareftirlitið geva boð til tess at tryggja, at tilsøgn, ið er givin, verður útint rætt og rættstundis.

§ 20. Kappingareftirlitið kann taka aftur eina góðkenning, um avgerðin í stóran mun er grundað á skeivar ella villleiðandi upplýsingar, sum ein ella fleiri av luttakandi fyritøkunum eru atvoldin til.
Stk. 2. Kappingareftirlitið kann taka aftur eina góðkenning, um ein av luttakandi fyritøkunum noktar at fylgja treytum ella boðum, givin sambært § 19, stk. 1 og 2.

Stk. 3. Kappingareftirlitið kann taka aftur eina góðkenning, sum er givin eftir § 15, stk. 7, um ein av luttakandi fyritøkunum hevur latið ófullfíggjaðar, skeivar ella villleiðandi upplýsingar, og kann krevja, at tær luttakandi fyritøkurnar innan 2 vikur fráboða eftir vanligum leisti.

§ 21. Kappingareftirlitið kann, um samanlegging er framd uttan góðkenning, geva boð um sundurskiljing av samanløgdum ella yvirtiknum fyritøkum ella av ognum ella felagsræði, eins og Kappingareftirlitið kann nýta aðra atgerð, sum er neyðug til tess at endurskapa eina virkna kapping.

Kapittul 6
Innlit o.a.

§ 22. Løgtingslóg um innlit í fyrisitingina er ikki galdandi fyri mál og kanningar eftir hesi løgtingslóg uttan so, at talan er um mál eftir § 4, stk. 2, § 7, stk. stk. 5, 2. pkt., og stk. 6, § 8, stk. 2, 3. pkt., § 9, stk. 1, 2. pkt., § 10, stk. 1, § 11, stk. 6, § 12, stk. 4, 2. pkt. og stk. 6, 2. pkt., § 14, stk. 4, § 16, stk. 3, § 23, stk. 4, § 30, stk. 15, 2. pkt. og § 31, stk. 3. Tó verða § 4, stk. 2 og § 6 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina at nýta í málum eftir hesi løgtingslóg. 1. og 2. pkt. eru eisini galdandi, tá ið upplýsingar, ið eru fingnar til vegar eftir hesi løgtingslóg, eru latnar øðrum fyrisitingarmyndugleika.
Stk. 2. Kappingareftirlitið skal almannakunngera:

1) avgerðir hjá viðkomandi myndugleika eftir § 2, stk. 4 og § 12, stk. 3, eins og frágreiðingar Kappingareftirlitsins,
2) avgerðir eftir § 2, stk. 5, og svar sambært § 2, stk. 5, frá avvarðandi landsstýrismanni,
3) avgerðir Kappingarráðsins, tiknar eftir hesi løgtingslóg,
4) avgerðir ella samandrátt av hesum, sum Kappingareftirlitið hevur tikið eftir hesi løgtingslóg, uttan so at avgerðin ikki verður mett at hava týdning fyri virki løgtingslógarinnar ella fyri almenningin annars,
5) dómar, sektaruppskot ella samandráttir av hesum, har tað verður sektað ella tikið við sekt,
6) avgerðir hjá Føroya Kærustovni, og
7) dómar í rættarmálum, har Kappingareftirlitið, Kappingarráðið ella Føroya Kærustovnur eru partar.

Stk. 3. Kappingareftirlitið kann almannakunngera upplýsingar um virksemi kappingarmyndugleikans og frágreiðingar.
Stk. 4. Almannakunngerð eftir stk. 2 og 3 fevnir ikki um upplýsingar um teknisk viðurskifti, undir hesum gransking, framleiðsluhættir og vørur umframt rakstrarloyndir og handilsloyndir, tá ið talan er um upplýsingar av serligum búskaparligum týdningi fyri persónin ella fyri fyritøkuna, sum upplýsingarnar viðvíkja. Harumframt kunna upplýsingar um viðurskifti hjá einstøkum viðskiftafólkum í mun til fyritøkur undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum ikki almannakunngerast.
Stk. 5. Tann, ið letur Kappingarráðnum upplýsingar, kann biðja formann Kappingarráðsins um, at upplýsingar, sum sambært stk. 4 ikki mugu útflýggjast ella almannakunngerast, heldur ikki verða latnar limum Kappingarráðsins. Formaður Kappingarráðsins tekur endaliga avgerð, um upplýsingar kunnu latast limum Kappingarráðsins.

Kapittul 7
Kappingarmyndugleikin. Bygnaður og heimildir

§ 23. Kappingarráðið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av Kappingareftirlitsins fyrisiting av løgtingslógini og reglum ásettar sambært løgtingslógini. Harumframt tekur Kappingarráðið avgerð í málum av prinsipiellum ella serliga stórum týdningi. Ráðið góðkennir eisini tær kanningar, ið Kappingareftirlitið ger sambært § 29.
Stk. 2. Kappingarráðið kann lata Kappingareftirlitinum heimildir sínar at

taka avgerð í málum av stórum ella prinsipiellum týdningi.
Stk. 3. Kappingarráðið hevur ein formann og fýra limir. Landsstýrismaðurin tilnevnir formannin og limirnar í Kappingarráðnum. Kappingarráðið hevur tveir fastar varalimir. Formaðurin, limirnir og varalimirnir verða valdir fyri eitt fýra ára skeið. Ráðið skal hava kunnleika til alment og privat vinnuvirksemi, løgfrøði, búskaparfrøði, fíggjarlig viðurskifti og viðurskifti brúkaranna. Formaðurin og tveir av limum ráðsins skulu vera óheftir av vinnuligum áhugamálum og brúkaramálum.
Stk. 4. Kappingarráðið ger egna fundarskipan og reglur fyri virksemi hjá Kappingareftirlitinum. Landsstýrismaðurin góðkennir fundarskipan og reglur fyri virksemi hjá Kappingareftirlitinum.

§ 24. Kappingareftirlitið tekur avgerðir eftir hesi løgtingslóg og eftir reglum ásettum við heimild í hesi løgtingslóg.
Stk. 2. Kappingareftirlitið kann taka upp mál av egnum ávum, eftir fráboðan, eftir klagu, ella eftir áheitan frá øðrum kappingarmyndugleika sambært § 28, stk. 4, § 30, stk. 15 og § 31, í hesi løgtingslóg.
Stk. 3. Kappingareftirlitið ger av, um tað er grundarlag fyri at kanna ella taka avgerð í einum máli, og um málsviðgerð fyribils ella endaliga skal steðga. Harumframt kann Kappingareftirlitið taka avgerð um at lata vera við at viðgera eitt mál, har fyritøkur áður hava givið tilsøgn sambært § 27.

§ 25. Landsstýrismaðurin kann gera reglur um at nýta talgilt samskifti til og frá Kappingarráðnum, Kappingareftirlitinum og Føroya Kærustovni og í hesum sambandi reglur um talgilda undirskrift.

§ 26. Tey boð, sum Kappingareftirlitið kann geva eftir § 6, stk. 4, og § 11, stk. 4, við tí endamáli at steðga skaðiligu árinunum frá kappingaravmarkingum, kunnu til dømis vera:

1) at avtalur, viðtøkur, handilstreytir o.a. heilt ella lutvíst verða settar úr gildi,
2) at farast kann ikki upp um tilskilaðar prísir ella vinningar, ella at ávísir útrokningarhættir skulu nýtast, tá ið prísir ella vinningar verða roknaðir út,
3) at áleggja einum ella fleiri av viðkomandi fyritøkunum at selja til tilskilaðar keyparar við teimum treytum, sum fyritøkan vanliga setir fyri samsvarandi sølu. Fyritøkan kann tó altíð krevja, at goldið verður kontant, ella krevja nóg góða trygd, og
4) at geva atgongd til fasilitet í undirstøðukervi, ið er neyðugur til tess at kunna bjóða út eina vøru ella tænastuveiting,

§ 27. Tilsøgn, veitt av fyritøku, og sum gongur ivasemi á møti, sum Kappingareftirlitið hevur viðvíkjandi § 6, stk. 1, og § 11, stk. 1, kann gerast bindandi fyri fyritøkurnar. Ein tilsøgn kann gerast tíðaravmarkað.
Stk. 2. Eftir at tilsøgn er gjørd bindandi eftir stk. 1, kann Kappingareftirlitið geva boð, sum eru neyðug til tess at tryggja, at tilsøgnin verður fylgd til fulnar og innan ásetta tíð.
Stk. 3. Kappingareftirlitið kann afturkalla ein avgerð eftir stk. 1, um:

1) verulig viðurskifti, sum hava týdning fyri avgerðina, eru broytt,
2) avtalupartarnir og tílíkt handla í stríð við tilsøgn, ella
3) avgerðin er tikin við støði í ófullfíggjaðum, skeivum ella villleiðandi upplýsingum frá avtalupørtunum o.tíl.

§ 28. Kappingareftirlitið kann krevja allar upplýsingar útflýggjaðar, sum Kappingareftirlitið metir hevur týdning fyri virksemi hjá kappingarmyndugleikanum ella fyri at gera av, um ávís viðurskifti eru partur av øki løgtingslógarinnar. Upplýsingarnar kunnu til dømis vera um roknskapir og roknskapartilfar, úrrit úr bókum, handilsskjøl o.s.fr.

Stk. 2. Tað er skyldan hjá fyritøku, samtøku av fyritøkum og øllum løgfrøðiligum og likamligum persónum at veita upplýsingar sambært stk. 1.
Stk. 3. Kappingareftirlitið kann í arbeiði sínum krevja at fáa upplýsingar og skjøl frá øðrum myndugleikum, m.a. skattamyndugleikunum og tollmyndugleikunum, óheft av tagnarskyldu teirra.
Stk. 4. Upplýsingar sambært stk. 1 kunnu eisini krevjast til tess at veita kappingarmyndugleikum í Norðanlondum hjálp at fremja og handhevja kappingarlógina í hesum londum.

§ 29. Kappingareftirlitið kann gera kanningar av vinnugreinum ella av ávísum sløgum av avtalum innan fyri ymiskar vinnugreinir við tí endamáli at fáa kunnleika til ella innlit í kappingarstøðuna innan fyri ávísu vinnugreinina ella ávísu vinnugreinirnar.
Stk. 2. Ásetingarnar í § 28, stk. 1 og 2 og § 30 eru somuleiðis galdandi fyri kanningar eftir stk. 1.
Stk. 3. Kappingareftirlitið kann almannakunngera slíka kanning, tó við teimum avmarkingum, ið eru nevndar í § 22, stk. 4.

§ 30. Kappingareftirlitið kann í sambandi við virksemi sítt gera eftirlitskanningar, ið hava við sær, at Kappingareftirlitið fær atgongd til høli og flutningsamboð hjá fyritøkum ella samtaki av fyritøkum. Kappingareftirlitið kann gera seg kunnugt við og taka avrit av øllum upplýsingum, sum hava týdning fyri at fremja eftirlit sambært løgtingslógini. Upplýsingarnar kunnu til dømis vera roknskapir og roknskapartilfar, úrrit úr bókum og handilsskjølum o.s.fr. óansæð upplýsingarmiðil.
Stk. 2. Í sambandi við eftirlitskanningar, kann Kappingareftirlitið eisini krevja munnligar frágreiðingar og krevja, at persónar, fevndir av eftirlitskanningini, vísa fram innihaldið í teirra lummum, taskum o.ø. við tí endamáli, at Kappingareftirlitið kann gera seg kunnugt við og møguliga taka avrit av hesum.
Stk. 3. Tá ið upplýsingar hjá fyritøkum eru í varðveitslu uttanhýsis ella verða viðgjørdar uttanhýsis, hevur Kappingareftirlitið somu atgongd sum eftir stk. 1 til varðveitslustaðið. Heimildin er treytað av, at ikki er gjørligt at útvega upplýsingarnar beinleiðis frá fyritøkuni ella fyritøkusamtakinum, ið verður kannað.
Stk. 4. Eftirlitskanningin kann bert fara fram við rættarúrskurði og við at vísa samleikaprógv.
Stk. 5. Kappingareftirlitið kann taka talgild avrit, spegling, av dátum á talgildum miðlum, sum eru fevndar av eftirlitskanningini, og kann taka avritini við sær við tí endamáli at kanna tilfarið seinni.
Stk. 6. Speglað tilfar skal vera seglað, tá ið Kappingareftirlitið fer úr hølunum hjá fyritøkuni.
Stk. 7. Tann, sum kannaður verður, kann krevja, at viðkomandi ella eitt umboð, sum hann hevur valt, skal vera til staðar, tá ið seglið verður brotið, og tá ið eftirlitið gongur í gjøgnum speglaða tilfarið.
Stk. 8. Kappingareftirlitið skal í seinasta lagi 40 yrkadagar eftir eftirlitskanningina geva teirri fyritøku og tílíkum, sum verður kannað, eitt avrit av øllum upplýsingum, ið Kappingareftirlitið hevur tikið úr speglaða tilfarinum.
Stk. 9. Tá ið tilfarið er kannað, skal tað speglaða tilfarið varðveitast undir segli.
Stk. 10. Dátutilfarið skal strikast, um Kappingareftirlitið metir, at tilfarið ikki inniheldur prógv fyri brot á løgtingslógina.
Stk. 11. Ger Kappingareftirlitið av at fara víðari við málinum, skal speglaða tilfarið strikast, tá ið endalig avgerð er tikin í málinum.
Stk. 12. Um viðurskifti hjá eini fyritøku ella einum samtaki av fyritøkum hava við sær, at tað ikki ber til hjá Kappingareftirlitinum sama dag, ið eftirlitskanningin verður framd, at fáa atgongd til upplýsingar ella at taka avrit av upplýsingunum sambært stk. 1 og 2, kann Kappingareftirlitið segla høli og

upplýsingar hjá viðkomandi fyritøku í 3 yrkadagar eftir, at kanningin er gjørd.
Stk. 13. Undir teimum treytum, sum eru nevndar í stk. 12, kann Kappingareftirlitið taka upplýsingar ella miðilin, har upplýsingarnar eru á, við sær við tí endamáli at avrita upplýsingarnar. Tilfarið, sum Kappingareftirlitið hevur tikið við sær við tí endamáli at avrita, skal saman við avriti av upplýsingunum, sum Kappingareftirlitið hevur tikið við sær at kanna neyvari, latast fyritøkuni ella samtakinum av fyritøkum aftur í seinasta lagi 3 yrkadagar eftir eftirlitskanningina.
Stk. 14. Freistirnar í stk. 8, 12 og 13 kunnu í serligum førum verða longdar.
Stk. 15. Kappingareftirlitið kann eftir áheitan frá kappingarmyndugleikum í Norðanlondum gera eftirlitskanningar til tess at fremja og handhevja kappingarlógina í hesum londum. Tað er ein treyt, at kappingarmyndugleikar í hesum londum eisini kunnu gera eftirlitskanningar til tess at fremja og handhevja kappingarlógina í Føroyum. Stk. 1-14 verða nýtt samsvarandi.
Stk. 16. Løgreglan veitir hjálp, tá ið heimildirnar í stk. 1-3, 5, 12 og 13 verða útintar. Landsstýrismaðurin kann eftir avtalu við løgregluna gera reglur í hesum sambandi.

§ 31. Kappingareftirlitið kann lata kappingarmyndugleikum í øðrum londum upplýsingar, ið koma undir tagnarskyldu kappingarmyndugleikans, um hesar eru neyðugar til tess at fremja og handhevja kappingarlógina í hesum londum. Tað er ein treyt, at fyrivarni verður tikið fyri, at upplýsingar skulu latast báðar vegir.
Stk. 2. Tá ið upplýsingar verða latnar eftir stk. 1, skal Kappingareftirlitið seta sum treyt, at upplýsingarnar:

1) vera undir samsvarandi tagnarskyldu hjá móttakaranum,
2) einans verða nýttar til tað endamál, sum er ásett í sínámillum avtalum við eitt ella fleiri lond, um so er, at umbýtið fer fram sambært avtaluni, og
3) einans kunnu latast víðari við greiðum samtykki frá Kappingareftirlitinum og einans til tað endamál, sum samtykkið fevnir um.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvussu upplýsingar, ið eru fevndar av tagnarskyldu kappingarmyndugleikans, kunnu latast øðrum kappingarmyndugleikum.

Kapittul 8
Kærur

§ 32. Avgerðir, tiknar av Kappingareftirlitinum eftir § 2, stk. 1, § 3, 1. pkt., § 4, § 6, stk. 1 og 4, 1. pkt., § 7, stk. 1-4, § 8, stk. 2, stk. 4, 2. pkt. og stk. 5 og 6, § 9, stk. 1, 1. pkt., § 10, stk. 2, § 11, stk. 1 og 2, stk. 4, 1. pkt. og stk. 5, § 12, stk. 1 og stk. 6, 1. pkt., § 15, stk. 1-3, § 16, stk. 1, § 17, stk. 4, § 18, stk. 5, § 19, stk. 1-5, § 22, stk. 4, § 26 og § 27, stk. 2 og 3 kunnu kærast til Føroya Kærustovn.
Stk. 2. Kæra kann bert verða latin inn av:

1) tí, sum avgerðin viðvíkur, ella
2) tí, sum annars hevur individuellan og týðandi áhuga í málinum. Hetta er tó ikki galdandi fyri avgerðir hjá Kappingareftirlitinum sambært § 15, stk. 1-3, § 16, stk. 1, § 17, stk. 4, § 18, stk. 5, § 19, stk. 1 og § 27, stk. 2-3.

Stk. 3. Avgerð sambært § 24, stk. 3, kann ikki kærast til Føroya Kærustovn.
Stk. 4. Kæra um avgerð sambært § 22, stk. 4, hevur steðgandi virknað. Kappingareftirlitið ella Føroya Kærustovnur kann avgera, at kærur um aðrar avgerðir hava steðgandi virknað.
Stk. 5. Føroya Kærustovnur skal taka avgerð í málinum í seinasta lagi 8 vikur eftir, at málið er lagt fyri Føroya Kærustovn.

§ 33. Avgerðir, tiknar av Kappingareftirlitinum eftir hesi løgtingslóg, kunnu ikki leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika enn Føroya Kærustovn og kunnu ikki leggjast fyri rættin, fyrr enn úrskurður frá Føroya Kærustovni er til skjals.

Stk. 2. Kæra um avgerð kann verða skotin inn fyri Føroya Kærustovn innan 4 vikur frá tí, at avgerðin er kunngjørd tí, sum hon viðvíkur. Tá ið serligar orsakir tala fyri, kann Føroya Kærustovnur víkja frá kærufreistini.
Stk. 3. Avgerð, tikin av Føroya Kærustovni, kann leggjast fyri Føroya Rætt í seinasta lagi 8 vikur frá tí, at avgerðin er kunngjørd tí, sum hon viðvíkur. Verður ikki kært innan ásettu tíðarfreistina, er avgerð hjá Føroya Kærustovni endalig.

Kapittul 9
Revsing

§ 34. Kappingareftirlitið kann áleggja tí, sum ikki letur Kappingareftirlitinum upplýsingar, sum kunnu krevjast eftir hesi løgtingslóg, ella sum ikki heldur treytir ella ger eftir boðum, givin eftir hesi løgtingslóg, ella fylgir tilsøgn, sum er bindandi sambært § 27, stk. 1, dagliga ella vikuliga sekt.
Stk. 2. Sekt áløgd eftir stk. 1. kann verða innheintað við panting saman við innkrevjingarkostnaði. Taks fremur pantingina sambært stk. 2 eftir reglunum í skattalógini fyri innkrevjing av skattum.

§ 35. Um ikki harðari revsing er ásett eftir stk. 3 ella aðrari lóg, verður tann revsaður við sekt, sum tilætlað ella av grovum ósketni:
1) brýtur forboðið í § 6, stk. 1,
2) ikki heldur treytir, sum eru álagdar í § 8, stk. 3, 2. pkt. ella stk. 4, 2. pkt.,
3) brýtur forboðið í § 11, stk. 1,
4) ikki ger eftir boðum, givin eftir § 12, stk. 1,
5) brýtur fráboðanarskylduna í § 16, stk. 1, ella ikki heldur vanligu fráboðanarfreistina í § 20, stk. 3,
6) fremur eina samanlegging, hóast forboð er sett móti hesum eftir § 15, stk. 2, 2. pkt., brýtur forboðið fyri at fremja eina samanlegging, áðrenn góðkenning er givin eftir § 15, stk. 2, 1 pkt., og uttan at loyvi er fingið eftir § 15, stk. 6, ikki lýkur treytir ella boð, ið eru givin sambært § 19, stk. 1-2, ella ikki ger eftir boðum, sum eru givin sambært § 21,
7) ikki ger eftir boðum, givin eftir § 6, stk. 4, 1 pkt., ella § 11, stk. 4, 1. pkt, sambært § 26,
8) ikki ger eftir tilsøgn, givin eftir § 27, stk. 1,
9) ikki ger eftir boðum, givin eftir § 27, stk. 2,
10) ikki lýkur krøv eftir § 28, stk. 1-3, ella
11) gevur Kappingareftirlitinum, Kappingarráðnum ella Føroya Kærustovni ófullfíggjaðar, skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tigur um viðurskifti, sum hava týdning fyri mál ella kanning eftir § 29, sum upplýsingar verða savnaðar til.

Stk. 2. Stk. 1, nr. 1, verður ikki at nýta frá tí, at ein avtala er fráboðað Kappingareftirlitinum sambært § 8, stk. 2 ella stk. 4, og til Kappingareftirlitið hevur kunngjørt sína avgerð eftir § 8, stk. 2 ella stk. 4.
Stk. 3. Revsingin fyri tann, sum í ósamsvari við § 6, stk. 1, ger kartellavtalu sambært pkt. 2, kann hækka til fongsul í upp til 1 ár og 6 mánaðir, um brotið er framt tilætlað og av grovum ósketni vísandi til vavið og skaðiligu árinini, sum brotið kann hava við sær. Við kartellavtalu sambært pkt. 1 er at skilja avtala, viðtøka í samtøku av fyritøkum ella samskipan millum fyritøkur, um:
1) at áseta prísir, vinning o.a. í sambandi við søla ella víðarisøla av vørum og tænastum,
2) at avmarka ella stýra søla ella framleiðslu,
3) at býta sundur marknaðir ella kundar sínámillum, ella
4) at samskipa boð.

Stk. 4. Revsiábyrgd kann áleggjast feløgum, løgfrøðiligum persónum o.tíl. eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
Stk. 5. Er fíggjarligur vinningur fingin við broti á stk. 1 og 2, skal vinningurin inndragast eftir reglunum í kapitli 9 í revsilógini. Ber ikki til at leggja hald á

vinningin, skal við áseting av revsing takast serligt fyrilit fyri støddini á náddum ella ætlaðum fíggjarligum fyrimuni.
Stk. 6. Fyrningarfreistin fyri revsiábyrgd er 5 ár.

Fyrisitingarligt sektaruppskot

§ 36. Um brot á hesa løgtingslóg ella reglur givnar við heimild í hesi løgtingslóg ikki hevur strangari revsing við sær enn sekt, kann Kappingareftirlitið við fyrisitingarligum sektaruppskoti boða frá, at málið kann avgerast uttan rættarmál, um tann, sum hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og játtar at rinda sektina sambært sektaruppskotinum innan nærri ásetta freist.
Stk. 2. Ásetingar í rættargangslógini um krav til innihald av ákæruriti og um, at hin skuldsetti ella ákærdi ikki hevur skyldu at úttala seg, eru galdandi í sambandi við sektaruppskot.
Stk. 3. Við sektarsamtykt fellur rættarsókn burtur.

Kapittul 10
Gildiskoma

§ 37. Henda løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping.
Stk. 2. Mál, sum eru Kappingareftirlitinum í hendi, áðrenn løgtingslógin kemur í gildi, verða viðgjørd eftir løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping.
Stk. 3. Reglur, sum eru ásettar við heimild í løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping, eru í gildi, til tær verða settar úr gildi, ella til aðrar verða settar í staðin.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Tá ið galdandi løgtingslóg um kapping varð sett í gildið tann 1. januar 2008, var talan um nýbrot, tí farið var frá eini eftirlitslóggávu til eina forboðslóggávu, sum byggir á ES-kappingarreglurnar, og harvið eisini kappingarreglurnar, sum er galdandi í grannalondum okkara. Í 2012 vórðu broytingar gjørdar í galdandi lóg, har millum annað tillagingar vórðu gjørdar í mun til samanleggingareftirlitið í kappingarlógini.

Við hesum uppskoti verða fleiri dagføringar gjørdar í føroysku kappingarlógini. Við uppskotinum kunnu Føroyar gerast partur av norðurlendsku samstarvsavtaluni í kappingarmálum. Heimildarbýtið millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið verður greiðari ásett, ómaksgjald verður álagt í sambandi við fráboðan av samanleggingum, undantøkini frá forboðnum um kappingaravlagandi avtalur gerast greiðari, revsingin fyri luttøku í kartellvirksemi verður herd, og Kappingareftirlitinum verður heimilað at loka mál við fyrisitingarligum sektaruppskoti.

Høvuðsorsøkin til, at gjørd verður nýggj lóg og ikki eitt broytingaruppskot, er, at lógarviðmerkingarnar í galdandi lóg í størri ella minni mun eru broyttar ella endurskoðaðar í hesum uppskoti. Hetta kemst serliga av, at lógarviðmerkingarnar í galdandi lóg í fleiri førum ikki passa til galdandi praksis, og tí verður mett skynsamt at tillaga viðmerkingar, hóast orðingarnar í lógartekstinum eru tær somu.

Uppskotið byggir eins og galdandi lóg á ES-kappingarreglurnar og harvið eisini kappingarreglurnar, sum er galdandi í okkara grannalondum.

1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóg er løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 35 frá 27. apríl 2012.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Við uppskotinum verður lagt upp til, at Føroyar kunnu gerast partur av norðurlendsku samstarvsavtaluni í kappingarmálum frá 2017. Norðurlendska samstarvsavtalan hevur til endamáls at styrkja og formskipa samstarvið millum norðurlendsku kappingarmyndugleikarnar, og avtalan skal fremja og handhevja kappingarlógina í teimum norðurlendsku londunum.

Endamálið við uppskotinum er eisini at nágreina galdandi arbeiðs- og heimildarbýtið millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið.

Í uppskotinum verður ómaksgjald álagt í sambandi við fráboðan av samanleggingum. Talan er um eina líknandi skipan, sum er galdandi í okkara grannalondum, t.d. í Danmark og Grønlandi. Endamálið við ómaksgjaldinum er m.a. at tryggja, at kappingarmyndugleikin, hóast eitt mál um samanlegging er til viðgerðar, kann arbeiða við øðrum eftirlitsuppgávum sambært lógini.

Lógaruppskotið hevur m.a. til endamáls at gera tað lættari hjá fyritøkum at meta um, hvørt ein møgulig avtala, viðtøka millum samtøk av fyritøkum ella samstarvsskipan teirra millum er fevnd av undantøkunum í § 7 í kappingarlógini.

Endamálið við uppskotinum er eisini at herða revsiásetingarnar í sambandi við luttøku í kartellvirksemi. Í galdandi lóg er revsingin sekt. Við hesum uppskoti kann revsingin fyri luttøku í kartellvirksemi vera upp í 1 ár og 6 mánaðir.

Heimilað verður eisini Kappingareftirlitinum at seta fram fyrisitingarligt sektaruppskot.

Uppskotið hevur umframt til endamáls at gera dagføringar og broytingar í lógarviðmerkingunum í galdandi lóg. Eisini eru freistir hjá Kappingareftirlitinum í sambandi við at lata fyritøku avrit av speglaðum tilfari broyttar, eins og freistin hjá Føroya Kærustovni at taka avgerð í málum er longd við 2 vikum.

Harumframt hevur lógaruppskotið til endamáls at rætta feilir í tilvísingum og nøvnum á myndugleikum, sum er broytt, eftir at galdandi lóg varð samtykt.

Broytingarnar verða lýstar niðanfyri.

Norðurlendsk samstarvsavtala í kappingarmálum
Norðurlendsku kappingarmyndugleikarnir hava arbeitt við at dagføra og meta um av nýggjum norðurlendsku samstarvsavtaluna í kappingarmálum frá 2001. Endurskoðaða samstarvsavtalan tekur millum annað støði í tilráðingum frá OECD um altjóða samstarv um kanningar, rannsóknir og rættarsóknir á kappingarøkinum. Norðurlendska samstarvsavtalan í kappingarmálum frá 2017 hevur til endamáls at styrkja og formskipa samstarvið millum norðurlendsku kappingarmyndugleikarnar og skal fremja og handhevja kappingarlógina í hesum londum. Danmark, Noreg, Svøríki, Finnland, Ísland og Grønland eru partar í avtaluni.

Føroyar eru ikki partur av norðurlendsku samstarvsavtaluni í kappingarmálum frá 2001, tí galdandi kappingarlóg heimilaði ikki føroyska kappingarmyndugleikanum at lata øðrum kappingarmyndugleikum trúnaðarupplýsingar. Løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping hevur tó slíka heimild, og nú norðurlendsku kappingarmyndugleikarnir hava arbeitt við at dagføra samstarvsavtaluna, verður mett skynsamt, at Føroyar eisini gerast partur av norðurlendska samstarvinum.

Til tess at Føroyar kunnu gerast partur av norðurlendsku samstarvsavtaluni er neyðugt, at gjørdar verða ávísar tillagingar í kappingarlógini, ið javnstilla Føroyar í mun til hini Norðurlondini. Í mun til galdandi lóg kann føroyski kappingarmyndugleikin bert lata, men ikki innheinta upplýsingar fyri aðrar kappingarmyndugleikar, í sambandi við at hesir skulu handhevja egna kappingarlóg. Kappingarlógin heimilar heldur ikki, at føroyski kappingarmyndugleikin eftir áheitan kann gera eftirlitskanningar í Føroyum fyri kappingarmyndugleikar í øðrum londum.

Við hesum lógaruppskoti verður heimilað føroyska kappingarmyndugleikanum at innheinta upplýsingar í teimum førum, har føroyski kappingarmyndugleikin skal hjálpa kappingarmyndugleikum, ið eru partar av norðurlendsku samstarvsavtaluni, at fremja og handhevja kappingarlógina í hesum londum. Harnæst verður heimilað, at føroyski kappingarmyndugleikin eftir áheitan kann gera eftirlitskanningar í Føroyum fyri kappingarmyndugleikarnar, ið eru partar av norðurlendsku samstarvsavtaluni, til tess at fremja og handhevja kappingarlógina í hesum londum.

Verður uppskotið samtykt, fer landsstýrið at taka stig til, at sáttmálin verður settur í gildi fyri Føroyar.

Heimildarbýtið millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið
Í galdandi lóg hava ávísir ivaspurningar stungið seg upp í sambandi við arbeiðs- og heimildarbýtið millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið. Hóast býtið í Føroyum er hitt sama sum í Danmark, og at tað í almennu viðmerkingunum til kappingarlógina stendur, at danska kappingarlóggávan í stóran mun hevur verið grundarlag undir føroysku kappingarlógini, so hevur kappingarmyndugleikin varnast, at feløg og persónar í ávísum føri hava havt trupult við at halda greiðu á galdandi arbeiðs- og heimildarbýti. Lógaruppskotið hevur til endamáls at taka burtur hesi ivamál við at gera tillagingar í kappingarlógini, ið greiðari áseta og endurspegla galdandi arbeiðs- og heimildarbýti millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið.

Í galdandi lóg er meginreglan tann, at Kappingarráðnum er heimilað at taka avgerðir. Í § 20, stk. 2, stendur tó, at Kappingareftirlitið hevur dagligu umsitingina av kappingarlógini um hendi. Víðari verður sagt í § 20, stk. 4, at landsstýrismaðurin ger fundarskipan fyri Kappingarráðið og reglur fyri virksemið hjá Kappingareftirlitinum. Í báðum hesum kunngerðum verður arbeiðs- og heimildarbýtið millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið greitt ásett.

Størsti vansin við verandi skipan er, at tey, ið bert lesa kappingarlógina, men ikki geva sær fær um tær reglur, sum eru heimilaðar í lógini, fáa eina skeiva fatan av arbeiðs- og heimildarbýtinum. Millum annað hava fyritøkur hildið, at avgerðir hjá Kappingareftirlitinum kunnu kærast til Kappingarráðið, hóast Kappingarráðið ikki er ein kærunevnd.

Styrkin í verandi skipan er, at arbeiðis- og heimildarbýtið millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið er skipað á mest effektivan hátt. Hetta merkir, at Kappingarráðið tekur avgerð í teimum málum, ið hava stóran ella prinsipiellan týdning, meðan Kappingareftirlitið hinvegin tekur allar aðrar avgerðir. Verandi skipan ger, at Kappingareftirlitið kann avgreiða mál uttan óneyðugar og formligar fyriskipanir, sum styttir um avgreiðslutíðina. Allar avgerðir, ið Kappingareftirlitið tekur, verða kunnaðar Kappingarráðnum á næstkomandi kappingarráðsfundi umframt leypandi, meðan eitt mál er til viðgerðar.

Við hesum uppskoti verða gjørdar formligar tillagingar, ið nágreina, hvussu verandi arbeiðs- og heimildarbýtið millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið er skipað, nevniliga at Kappingareftirlitið hevur dagligu umsitingina av lógini um hendi og tekur avgerðir vegna Kappingarráðið, meðan Kappingarráðið hevur umsjón við arbeiðinum hjá Kappingareftirlitinum og tekur avgerð í málum, ið hava stóran ella prinsipiellan týdning fyri føroyska samfelagið.

Ómaksgjald fyri samanleggingar
Í hesum lógaruppskoti verða ómaksgjøld ásett í sambandi við fráboðan av samanleggingum. Talan er um líknandi skipan, sum er galdandi í Danmark og Grønlandi.

Samanleggingar kunnu fráboðast eftir einføldum ella vanligum leisti. Um ein samanlegging verður fráboðað eftir einføldum leisti, er ómaksgjaldið ásett til 50.000 kr. Verður fráboðað eftir vanligum leisti, er ómaksgjaldið ásett til 0,1% av samlaða árliga umsetninginum hjá luttakandi fyritøkum í Føroyum, tó í mesta lagi 300.000 kr.

Orsøk til mun í ómaksgjaldi er, at samanleggingar fráboðaðar eftir einføldum leisti eru skjótari at málsviðgera, og fyritøkurnar skulu lata Kappingareftirlitinum færri upplýsingar, enn um samanborið verður við fráboðanir eftir vanligum leisti. Við samanleggingum fráboðaðar eftir einføldum leisti, ger Kappingareftirlitið í minni mun sjálvstøðugar kanningar av árinunum, sum samanlegging hevur á kappingina, tí Kappingareftirlitið nýtir upplýsingarnar, sum eru fráboðaðar, sum støði undir metingini og annars tær viðmerkingar, sum koma frá vinnuni í sambandi við hoyring. Um fráboðað verður eftir vanligum leisti, skulu fyritøkurnar lata Kappingareftirlitinum munandi fleiri upplýsingar um samanleggingina, og ger Kappingareftirlitið eisini aðrar kanningar til tess at kanna møgulig árin á kappingina. Samanleggingar fráboðaðar eftir vanligum leisti eru tískil meira umfatandi og krevja munandi meira arbeiðsorku.

Eins og í grannalondum okkara hevur kappingarmyndugleikin avmarkaða tíð at viðgera eitt samanleggingarmál. Er talan um samanlegging fráboðað eftir einføldum leisti, skal Kappingareftirlitið sum útgangsstøði hava tikið eina avgerð 30 yrkadagar frá tí, at fráboðan er fullfíggjað. Er talan um samanlegging fráboðað eftir vanligum leisti, er útgangsstøðið, at ein avgerð skal fyriliggja innan 90 yrkadagar.

Havandi tíðarfreistir í huga, er neyðugt hjá Kappingareftirlitinum at leggja alt annað eftirlitsarbeiði til viks, meðan ein samanlegging er til viðgerðar. Hetta merkir, at onnur kjarnuøki í kappingarlógini, sum Kappingareftirlitið hevur eftirlit við, so sum kappingaravlagandi avtalur, misnýtslu av ráðandi marknaðarstøðu ella kanningar av vinnugreinum mugu niðurraðfestast, meðan eitt samanleggingarmál er til viðgerðar. Kappingareftirlitið hevur harumframt aðrar bundnar uppgávur t.d. sambært § 8, § 9 og § 11, stk. 2 og 5 og § 12, stk. 6 í kappingarlógini.

Kjarnuuppgávan hjá Kappingareftirlitinum sambært kappingarlógini er at tryggja, at fyritøkur ikki gera kappingaravlagandi avtalur sínámillum ella misnýta eina ráðandi marknaðarstøðu. Hesi bæði kjarnuøki eiga tí at hava hægstu raðfesting í dagliga virkseminum hjá kappingarmyndugleikanum. Í praksis hevur tað tó víst seg, at samanleggingarmálini fylla ein lutfalsliga stóran part av arbeiðsorkuni og harvið av játtanini, sum eisini skal nýtast til hini kjarnuøkini. Ómaksgjaldið í hesum uppskoti gevur Kappingareftirlitinum møguleika at nýta størri part av játtanini og arbeiðsorkuni til hini kjarnuøkini.

Endamálið við ómaksgjaldinum er, at samanleggingareftirlitið í kappingarlógini skal hvíla í sær sjálvum.

Fyri samanleggingar fráboðaðar eftir einføldum leisti verður ómaksgjaldið ásett til 50.000 kr. Ómaksgjaldið skal dekka kostnaðin av málsviðgerðini av slíkum samanleggingum, sum vanliga tekur kappingarmyndugleikanum millum 3 og 4 vikur at avgreiða. Dømi um kostnaðir av málsviðgerðini eru: løn, umsiting, leiga o.a.

Fyri samanleggingar fráboðaðar eftir vanligum leisti verður ómaksgjaldið ásett til 0,1% av samlaða árliga umsetninginum hjá luttakandi fyritøkum, tó í mesta lagi 300.000 kr. Kappingareftirlitið metir at 0,1% tykist at vera rímiligt fyri samanleggingar av tílíkum slag, tí málsviðgerðin tekur vanliga millum 1 og 3 mánaðir at avgreiða. Hetta merkir, at ómaksgjaldið fyri samanleggingar fráboðaðar eftir vanligum leisti verður í minsta lagi 75.000 kr., tí ovara

umsetningsmark fyri, nær ein samanlegging skal fráboðast, er, tá ið árligi umsetningurin hjá luttakandi fyritøkum tilsamans er 75. mió. kr. Evsta ómaksgjald á 300.000 kr. er ásett í mun til longsta mark fyri, hvussu leingi Kappingareftirlitið kann viðgera eina samanlegging, fráboðað eftir vanligum leisti. Her skal viðmerkjast, at samanleggingar, sum strekkja seg yvir longri tíðarskeið t.d. 90 yrkadagar, mest sannlíkt eisini krevja, at kappingarmyndugleikin keypir tænastur og ráðgeving í sambandi við málsviðgerðina. Sum dømi um samanleggingar, sum hava tikið drúgva tíð hjá kappingarmyndugleikanum at málsviðgera, kunnu nevnast samanleggingin millum P/F Bakkafrost Holding og P/F Vestlax Holding og samanleggingin millum P/F TF Holding og Eik Banka Føroya P/F.

Síðan umsetningsmørkini í kappingarlógini vórðu broytt í 2012, hevur Kappingareftirlitið viðgjørt 27 samanleggingarmál. 18 av hesum málum eru avgreidd eftir einføldum leisti, meðan 9 eru avgreidd eftir vanligum leisti. Um ómaksgjøldini í hesum uppskoti høvdu verið galdandi, høvdu 7 av teimum 9 samanleggingunum, fráboðaðar eftir vanligum leisti, rindað 300.000 kr., meðan 2 samanleggingar høvdu rindað millum 165.000 kr. og 287.000 kr. í ómaksgjaldi.

Samlaða inntøkan frá ómaksgjøldum fyri samanleggingar fráboðaðar eftir einføldum og vanligum leisti høvdu fyri árini 2012-2022 verið 3.45 mió. kr.

Vísast skal eisini á, at bæði í Danmark og Grønlandi eru ómaksgjøld ásett í sambandi viðgerð av samanleggingum.

Í Danmark er ómaksgjaldið fyri samanleggingar fráboðaðar eftir einføldum leisti 50.000 kr., meðan ómaksgjaldið fyri fráboðanir eftir vanligum leisti er 0,015% av samlaða umsetninginum hjá luttakandi fyritøkunum, tó í mesta lagi 1.5 mió. kr. Í Danmark er skylda at boða frá samanlegging, um:

1) luttakandi fyritøkur hava ein samlaðan árligan umsetning í Danmark á minst 900 mió. kr., og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein árligan umsetning í Danmark á minst 100. mió., ella,
2) minst ein av luttakandi fyritøkunum hevur ein árligan umsetning í Danmark á 3.8 mia. kr., og minst ein av hinum luttakandi fyritøkunum hevur ein árligan umsetning á minst 3,8 mia. kr. á heimsstigi.

Í Grønlandi eru ómaksgjøldini tey somu sum í Danmark, meðan umsetningsmørkini er øðrvísi. Í Grønlandi er skylda at boða frá samanlegging, um:

1) luttakandi fyritøkur tilsamans hava ein umsetning á minst 100 mió. kr. á heimsstigi, og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein árligan umsetning á minst 50. mió. kr. á heimsstigi,
2) minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein árligan umsetning á minst 50. mió. kr. á heimsstigi, og
3) minst ein av luttakandi fyritøkunum er staðsett í Grønlandi.

Eftir hesum uppskoti verða ómaksgjøldini í Føroyum 50.000 kr. fyri samanleggingar fráboðaðar eftir einføldum leisti, meðan ómaksgjaldið fyri fráboðanir eftir vanligum leisti verða 0,1% av samlaða árliga umsetninginum hjá luttakandi fyritøkum, tó í mesta lagi 300.000 kr.

Í Føroyum er skylda at fráboða samanlegging, um:

1) luttakandi fyritøkurnar tilsamans hava ein árligan umsetning á minst 75. mió. kr. í Føroyum, og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein samlaðan árligan umsetning upp á minst 15. mió. kr. í Føroyum, ella
2) minst ein av luttakandi fyritøkunum hevur ein árliga umsetning í Føroyum upp á minst 75. mió. kr., og minst ein av hinum fyritøkunum hevur ein umsetning upp minst á 75. mió. kr. á heimsstigi.

Kappingareftirlitið metir ikki, at ómaksgjøldini fara at virka avmarkandi fyri talið av fráboðanum, tí ómaksgjaldið er vanliga bert ein brøkpartur av samlaða virðinum á samanleggingini.

Undantøk frá forboðnum um kappingaravlagandi avtalur
Lógaruppskotið hevur endamáls at gera tað lættari hjá fyritøkum at meta um, hvørt ein møgulig avtala, viðtøka millum samtøk av fyritøkum ella samstarvsskipan teirra millum er lóglig ella ei. Til tess at gera rættarstøðuna greiðari verður skotið upp at gera ávísar tillagingar í undantøkunum í § 7, stk. 1 í kappingarlógini.

Við broytingunum verður staðfest, at avtalur, sum lúka mørkini í § 7, stk. 1, og sum ikki hava til endamáls at avmarka kappingina, eru lógligar. Hinvegin eru avtalur, hvørs endamál er at avmarka kappingina, ikki fevndar av undantøkunum í § 7, stk. 1.

Sambært § 7, stk. 1 í galdandi lóg, er forboðið í § 6, stk. 1 ikki galdandi í teimum førum, har fyritøkur ella samskipan av fyritøkum hava ein árligan umsetning upp á minni enn 6,5 mió. kr., og har samlaði marknaðarparturin fyri ávísu vøruna ella tænastuna er minni enn 10 %, ella har samlaði árligi umsetningurin hjá luttakandi fyritøkum er minni enn 1. mió. kr. Hesi undantøk eru tó ikki galdandi, um fyritøkur ella samtøk av fyritøkum avtala, samskipa ella viðtaka: prísir, avmarkan av framleiðslu ella sølu, sundurbýting av marknaðum ella kundum ella skipan av boðum í sambandi við útboð.

Við hesi lógarbroyting verður sæð burtur frá umsetningsmørkunum í galdandi lóg. Ístaðin verða ásett nøkur markvirði í mun stødd á marknaðarpørtum til tess at staðfesta, hvørt viðkomandi avtala o.a. kann verða undantikin frá forboðnum í § 6, stk. 1.

Lógarbroytingin samsvarar við galdandi siðvenju frá ES-kommissiónini og ES-dómstólinum á økinum og verður tulkað samsvarandi.

Mett verður skynsamt, at markvirðini verða ásett til at fevna um avtalur, sum bert í avmarkaðan mun hava neiliga ávirkan á kappingina. Í hesum sambandi verður mett, at marknaðarpartar heldur enn umsetningur siga meira um marknaðarmáttin hjá luttakandi fyritøkum. Um talan er um smalt skilmarkaðan marknað, kann sjálvt ein fyritøkan við einum lítlum umsetningi hava marknaðarmegi. Hinvegin um talan um eina breiða skilmarking av viðkomandi marknaði, kunnu fyritøkur, hóast stóran umsetning, hava avmarkaðan marknaðarmátt. Umsetningurin hjá fyritøkunum er tískil ikki altíð ein nøktandi ábending um marknaðarmátt.

Í hesum sambandi verður skotið upp, at undantøkini til forboðið fyri kappingaravlagandi avtalum bert fevna um stødd á marknaðarpørtum, og at markvirðini eru tongd at, um avtalan er gjørd millum fyritøkur, sum eru ella møguliga kunnu vera kappingarneytar, ella um avtalan er gjørd millum fyritøkur, sum ikki eru verandi ella møguligir kappingarneytar. Fyri avtalur millum kappingarneytar verður skotið upp at áseta eitt markvirði á 10 prosent; fyri avtalur millum ikki kappingarneytar t.d. avtalur millum eina heilsølu og ein smásølu, verður skotið upp eitt markvirði á 15 prosent. Í teirri støðu at torført er at meta um, hvørt ein avtala er gjørd millum kappingarneytar ella ikki, verður skotið upp eitt markvirði á 10 prosent.

Herðing av revsing fyri luttøku í kartellvirksemi
Til tess at fremja og handhevja kappingarlógina verður skotið upp, at luttakarar í kartellavtalum kunnu revsast við fongsulsrevsing. Ein kartellavtala er ein avtala millum kappingarneytar um at avmarka ta kapping, sum annars vildi verið millum teirra, eitt nú við at avtala prísir, býti av marknaðum ella kundum sínámillum. Gerð av kartellavtalum er eitt hitt mest álvarsama brotið á kappingarlógina, tí slíkar avtalur seta virknu kappingina til viks og hava týðandi búskaparligar avleiðingar fyri brúkaran, kappingarneytar og samfelagið sum heild.

Skaðiligu árini av kartellavtalum koma millum annað til sjónddar í høgum prísum, avmarkingum í útboði ella væntandi nýmenning.

Til tess at seta revsingina fyri brot í mun til kartellvirksemi í kappingarlógini á hædd við revsingina fyri onnur fíggjarlig brotsverk, og fyri at ræða fyritøkur og persónar frá at gerast partur av eini kartellavtalu verður skotið upp at herða revsingina fyri kartellvirksemi í kappingarlógini. Í galdandi lóg, verður tann, sum ger kartellavtalu, revsaður við sekt.

Í hesum uppskoti verður tískil skotið upp, at revsingin fyri tann, sum í ósamsvari við forboðið í § 6, stk. 1 ger kartelavtalu, kann vera við fongsli í upp til 1 ár og 6 mánaðir. Fongsulsrevsing kemur bert upp á tal, um brotið er framt tilætlað ella av grovum ósketni - vísandi til vavið av brotinum ella til skaðiligu árini, sum brotið er egnað at hava við sær. Talan er um líknandi áseting, sum er galdandi í Danmark.

Fyrisitingarligt sektaruppskot
Uppskotið hevur til endamáls at gera tað møguligt hjá Kappingareftirlitinum á ein skjótan og ein einfaldan hátt at loka eitt revsirættarligt kappingarmál við at seta fram fyrisitingarligt sektaruppskot. Uppskotið er bert ætlað í málum, har fyritøka játtar seg sekan í at hava framt brot á kappingarlógina. Harafturat vil ásetingin bert vera galdandi í málum, har føst dómsvenja fyriliggur í mun til stødd á sekt.

Rættingar í lógarviðmerkingum
Í mun til galdandi lóg verða í hesum uppskoti gjørdar tillagingar og rættingar í lógarviðmerkingunum. Til fleiri ásetingar eru lógarviðmerkingarnar skrivaðar av nýggjum og í ávísum føri eru smærri rættingar framdar. Broytingarnar hava til endamáls at gera lógarviðmerkingarnar greiðari og í ávísum føri at rætta teir feilir, sum kappingarmyndugleikin er komin fram á í sambandi við umsiting av galdandi lóg.

Lógartekniskar rættingar
Umframt rættingar í lógarviðmerkingunum eru eisini smærri lógartekniskar rættingar gjørdar, t.d. har nøvn á myndugleikum eru broytt, og har feilur hevur verið í tilvísingum.

Broytingar í freistum
Við hesum uppskoti verður freistin hjá Kappingareftirlitinum at lata fyritøku avrit av øllum upplýsingum, ið Kappingareftirlitið hevur tikið úr speglaðum tilfari í sambandi við eftirlitskanningar, longd úr 25 til 40 yrkadagar. Mett verður neyðugt at gera hesa broyting, tí tað tilfar, sum myndugleikin innsavnar í sambandi við eina eftirlitskanning kann vera so mikið rúgvismikið, at trupult kann vera at yvirhalda galdandi freist. Freistin í uppskotinum er tann sama, sum er galdandi í Danmark í dag.

Við hesum uppskoti verður eisini freistin hjá Kærustovninum at taka avgerð í málum, sum eru løgd fyri hana, longd úr 6 til 8 vikur. Avgerð og tilfar í kappingarmálum er sum oftast rúgvismikið, og tí verður mett hóskandi, at freistin hjá Kærustovninum at taka avgerð verður longd við 2 vikum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Nýskipan í hesum uppskoti í mun til galdandi lóg er, at kappingarmyndugleikin við norðurlendsku samstarvsavtaluni m.a. fær heimild til at innheinta upplýsingar fyri aðrar myndugleikar, sum eru partar av avtaluni. Avtalan merkir hinvegin, at føroyski kappingarmyndugleikin kann heita á hinar avtalupartarnar um at innheita upplýsingar fyri føroyska myndugleikan. Avtalan hevur við sær, at tað gerst lættari hjá kappingarmyndugleikanum at føra eftirlit og at handhevja lógina.

Í hesum uppskoti verður arbeiðis- og heimildarbýtið millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið greiðari lýst. Talan er ikki um nakra beinleiðis nýskipan, men heldur um eina nágreinan av, hvussu verandi arbeiðs- og heimildarbýti er skipað.

Nýskipan í hesum uppskoti er, at ómaksgjald verður álagt í sambandi við fráboðan av samanleggingum. Av tí at kappingarmyndugleikin hevur avmarkaða tíð at viðgera eitt samanleggingarmál, og at aðrar eftirlitsuppgávur tískil mugu leggjast til viks, fer ómaksgjaldið at gera tað lættari hjá kappingarmyndugleikanum at skipa arbeiðið. Talan er um líknandi skipan, sum er galdandi í Danmark og Grønlandi. Kappingareftirlitið metir ikki, at ómaksgjøldini fara at virka avmarkandi fyri talið av fráboðanum, tí ásetta ómaksgjaldið vanliga bert er ein brøkpartur av samlaða virðinum á samanleggingini.

Lógaruppskotið hevur til endamáls at gera tað lættari hjá fyritøkum at meta um, hvørt ein møgulig avtala, viðtøka millum samtøk av fyritøkum ella samstarvsskipan teirra millum, er undantikin forboðnum í § 6, stk. 1, samanber tó við § 7.

Nýskipan við uppskotinum er eisini, at freistin hjá Kappingareftirlitinum at lata fyritøku avrit av speglaða tilfarinum í sambandi við eftirlitskanningar er longd úr 25 til 40 yrkadagar. Eisini er freistin hjá Kærustovninum at taka avgerð í kappingarmálum longd við 2 vikum.

Til tess at fremja og handhevja kappingarlógina verður revsingin fyri luttøku í kartellvirksemi herd. Í galdandi lóg er revsingin sekt. Við hesum uppskoti kann revsingin í sambandi við kartellvirksemi vera við fongsli í upp til 1 ár og 6 mánaðir. Grundað á samfelagsligu avleiðingarnar av kartellum verður mett hóskandi at herða revsiásetingarnar og harvið minka um áhugan millum løgfrøðiligar og likamligar persónar at gera kartellavtalur.

Nýskipan í mun til galdandi lóg er eisini, at Kappingareftirlitið á ein skjótan og einfaldan hátt kann loka eitt revsirættarligt kappingarmál við at seta fram fyrisitingarligt sektaruppskot.

Nýskipan í mun til galdandi lóg er eisini, at lógarviðmerkingarnar eru endurskoðaðar og í fleiri førum dagførdar.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Løgtingslógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá Brúkaraumboðnum, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Hugskotinum, Kommunufelagnum, TAKS og stjórnarráðunum. Eisini hevur løgtingslógaruppskotið verið til ummælis hjá Føroya Kærustovni..

Løgtingslógaruppskotið hevur harumframt verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum í tíðarskeiðinum 12. september 2022 til 12. oktober 2022.

Fiskimálaráðið, Heilsumálaráðið, og Uttanríkis- og vinnumálaráðið hava boðað frá, at tey ikki hava viðmerkingar til uppskotið. Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Kærustovnur og Kommunufelagið hava latið inn ummæli, fylgiskjal 3, 4, 5. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur viðmerkt ummælini í serskildum ummælisskjali, fylgiskjal 2.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna. Í uppskotinum verður álagt ómaksgjald í sambandi við, at samanleggingar verða fráboðaðar. Ómaksgjald er kortini ein lítil partur av samlaða virðinum á samanleggingini. Talan er um líknandi skipan, sum er galdandi í Danmark og Grønlandi, men gjaldið er lagað til føroysk viðurskifti.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Við hesum uppskoti kunnu Føroyar gerast partur av norðurlendsku samstarvsavtaluni í kappingarmálum frá 2017. Norðurlendska samstarvsavtalan hevur til endamáls at styrkja og

formskipa samstarvið millum norðurlendsku kappingarmyndugleikarnar og skal fremja og handhevja kappingarlógina í hesum londum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið er í samsvari við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Við lógaruppskotinum verður revsingin fyri luttøku í kartellvirksemi herd. Í galdandi lóg er revsingin sekt, men við lógaruppskotinum kann tann, sum ger eina kartellavtalu, verða revsaður við fongsli í upp í 1 ár og 6 mánaðir. Kartellavtalur eru eitt hitt mest álvarsama brotið á kappingarlógina, og mett verður rættast at herða revsingina fyri á tann hátt at minka um insitamentið at gera kartellavtalur. Verður uppskotið samtykt, verður eftir ætlan farið undir eina tilgongd at broyta revsilógina soleiðis, at tann, sum ger kartellavtalu, kann undir serliga skerpandi umstøðum verða revsaður við fongsli upp í 1 ár og 6 mánaðir. Talan er um líknandi áseting, sum er galdandi í Danmark, og víst verður til § 299 c í donsku revsilógini, sum er tøk.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Við uppskotinum verður ásett ómaksgjald í sambandi við fráboðan av samanleggingum. Í hesum sambandi verður víst til kapittul 1 á síðu 17-19. Ætlanin er, at samanlegginareftirlitið í kappingarlógini skal hvíla í sær sjálvum. Talan er um líknandi fyriskipan, sum er galdandi í Danmark og Grønlandi, tó tillagað føroysk viðurskifti.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur fyritøkum ikki at fremja eina samanlegging fevnd av kappingarlógini uttanum góðkenning ella undantaksloyvi. Í tann mun ein samanlegging er fráboðanarskyldig, skal fráboðan latast Kappingareftirlitinum í seinasta lagi 1 viku eftir, at sáttmálin um samanlegging er gjørdur, ella almenn fráboðan er gjørd um samanleggingina, ella at onkur ávísur hevur fingið ræðið á fyritøkuni.

Kappingarmyndugleikin kann eisini í sambandi við samanleggingareftirlit áleggja fyritøkum nærri treytir og geva boð fyri at tryggja, at luttakandi fyritøkur halda eina givna tilsøgn. Víst verður til samanleggingareftirlit í §§ 13-21.

Í sambandi við umsiting av lógini, kann Kappingareftirlitið krevja allar upplýsingar, eisini upplýsingar, sum verða viðgjørdar talgilt, sum Kappingareftirlitið metir vera neyðugar fyri

virksemi sítt ella fyri at gera av, um ávís viðurskifti eru partur av øki lógarinnar. Kappingareftirlitið kann eisini sum liður í arbeiðinum krevja at fáa upplýsingar og skjøl frá øðrum myndugleikum óheft av tagnarskyldu teirra.

Í lógini er heimilað Kappingareftirlitinum at gera kanningar av vinnugreinum ella ávísum sløgum av avtalum innan fyri ymiskar vinnugreinar við tí endamáli at fáa kunnleika til ella innlit í kappingarstøðuna innan fyri ávísu vinnugreinina ella ávísu vinnugreinarnar. Í sambandi við slíkar kanningar er heimilað Kappingareftirlitinum at savna inn upplýsingar.

Kappingareftirlitið kann eisini krevja inn upplýsingar, um Kappingareftirlitið skal hjálpa kappingarmyndugleikum í øðrum Norðanlondum at handhevja kappingarlógina í hesum londum.

Í sambandi við eftirlitskanningar kann kappingarmyndugleikin m.a. krevja at fáa atgongd til høli hjá fyritøkum ella samtaki av fyritøkum. Eisini kann Kappingarmyndugleikin krevja munnligar frágreiðingar og krevja, at persónar vísa fram innihaldið í teirra lummum, taskum o.ø. við tí endamáli, at Kappingareftirlitið kann kunna seg um innihaldið og møguliga taka avrit av hesum.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Sambært § 2, stk. 4, er tað álagt landsstýrismanninum, ið varðar av viðkomandi regluverki, at gera av, hvørt ein kappingaravmarking er fevnd av § 2, stk. 2. Í tann mun Kappingarráðið hevur latið eina frágreiðing til landsstýrismannin, sum vísir á møgulig skaðilig árin á kappingina, skal avvarðandi landsstýrismaður, sum varðar av viðkomandi regluverki, í samráð við landsstýrismannin í kappingarmálum svara Kappingarráðnum í seinasta lagi 4 mánaðir eftir móttøku av ummæli ráðsins sambært § 2, stk. 5.

Landsstýrismanninum er heimilað at áseta nærri reglur um, hvat er at skilja við eina avtalu o.a. innanfyri somu fyritøku ella samtøku sambært § 4, stk. 2.

Landsstýrismanninum er heimilað eftir ummæli frá Kappingareftirlitinum at áseta nærri reglur um útrokning av umsetningi og øðrum viðurskiftum, sum hava týdning í sambandi við útrokning av marknaðarpørtum sambært § 7, stk. 6.

Sambært § 10, stk. 1 er heimilað landsstýrismanninum í kunngerð og eftir ummæli frá Kappingareftirlitinum at áseta reglur um almenna frítøku frá forboðnum í § 6, stk. 1 fyri bólkar av avtalum, viðtøkum og samskipanum, ið lúka treytirnar í § 8, stk. 1.

Sambært § 12, stk. 4, er heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um, at boð sambært § 12, stk. 1, um afturgjald av stuðli, eisini kann gevast til ávíst vinnuvirksemi, sum heilt ella partvíst er almenn ogn, ið verður rikið í partafelagslíknandi formi.

Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild at áseta nærri reglur um útrokning av umsetningi í sambandi við samanleggingareftirlitið sambært § 14, stk. 4.

Sambært § 23, stk. 4 skal landsstýrismaðurin góðkenna fundarskipan og reglur fyri virksemið hjá Kappingareftirlitinum.

Landsstýrismaðurin kann gera reglur um at nýta talgilt samskifti til og frá kappingarmyndugleikunum og Kærustovninum og í hesum sambandi reglur um talgilda undirskrift sambært § 25.

Landsstýrismaðurin kann eftir avtalu við løgreglumyndugleikan gera reglur í sambandi við, at løgreglumyndugleikin skal hjálpa Kappingareftirlitinum at útinna heimildirnar í § 30, stk. 1-3, 5 og 12-13, sum viðvíkja eftirlitskanningum.

Landsstýrismanninum er heimilað í § 31, stk. 3, at áseta nærri reglur um, hvussu upplýsingar, fevndar av tagnarskyldu kappingarmyndugleikans kunnu latast øðrum kappingarmyndugleikum. Talan er um somu heimildir, sum eru í galdandi lóg.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur Kappingareftirlitinum atgongd til høli og flutningsamboð hjá fyritøkum og samtøkum fyri at gera eftirlitskanningar. Kappingareftirlitið kann gera seg kunnugt við og taka avrit av øllum upplýsingum, sum hava týdning fyri at fremja eftirlit sambært lógini. Kappingareftirlitið kann eisini í sambandi við eftirlitskanningar krevja munnligar frágreiðingar og krevja, at persónar, fevndir av eftirlitskanningini, vísa fram innihaldið í lummum, taskum o.ø. so Kappingareftirlitið kann gera seg kunnugt við og møguliga taka avrit av hesum innihaldi.

Eru upplýsingar hjá fyritøkum í uttanhýsisvarðveitslu ella verða upplýsingarnar viðgjørdar uttanhýsis, hevur Kappingareftirlitið somu atgongd sambært lógini til varðveitslustaðið.

Eftirlitskanningin kann bara gerast við rættarúrskurði og ímóti at vísa samleikaprógv.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Talan er um endamálsgrein.

Endamálið við kappingarlógini er at virka fyri eini fulldyggari samfelagsligari tilfeingisnýtslu til gangs fyri fyritøkur og brúkarar. Amboðið at náa endamálinum er virkin kapping.

Fulldygg samfelagslig tilfeingisnýtsla merkir, at tilfeingið til eina og hvørja tíð verður gagnnýtt á mest skynsama hátt. Hetta merkir í fyrsta lagi, at vørur og tænastur verða framleiddar og útbreiddar til lægst møguligan kostnað og við hægstu dygd, at vørur og tænastur í mongd og úrvali samsvara við sertokkan hjá brúkaranum, og at tilfeingið verður brúkt, har tørvurin er størstur. Í øðrum lagi merkir hetta, at fyritøkur megna at tillaga sítt virksemi so hvørt, sum tørvurin hjá brúkarunum broytist. Virkin kapping ger, at fyritøkur verða tvungnar at tillaga sítt virksemi til broytandi marknaðarumstøður.

Samfelagsligur fulldyggleiki fevnir bæði um statiskan og dynamiskan fulldyggleika. Hugsanin handan samfelagsligan fulldyggleika er, at brúkarin fær mest møguliga vælferð, tá tilfeingið í samfelagnum verður gagnnýtt á fulldyggan hátt. Statiskur fulldyggleiki er, tá ið samfelagsliga tilfeingisnýtslan verður brúkt á fulldyggan hátt í løtuni (short-term), meðan dynamiskur fulldyggleiki er, tá ið samfelagsliga tilfeingisnýtslan verður brúkt á fulldyggan hátt í longdini (long-term).

Í endamálsgreinini framgongur, at virkin kapping er amboðið, sum tryggjar fulldygga tilfeingisnýtslu. Hugtakið virkin kapping, fevnir bæði um bygnaðarlig viðurskifti og um atburð á marknaðinum. Bygnaðarlig viðurskifti fevna t.d. um: tal á fyritøkum, stórrakstrar fyrimunir og atgongd til marknaðin. Fyri at atburðurin á marknaðinum stuðlar undir virknari kapping, hevur tað m.a. týdning, at fyritøkurnar hava sjálvstøðugan atburð á marknaðinum.

Virkin kapping skal vera fyritøkum og brúkarum at gangi. Her verður hugsað um fyrilit fyri vinnufrælsinum og brúkarafyrilit. Hugtakið vinnufrælsi hevur fleiri týdningar. Í fyrsta lagi merkir hetta rætturin hjá einum og hvørjum at byrja vinnuvirksemi. Í øðrum lagi merkir hetta trygd ímóti ójavna millum vinnurekandi ella órímiligar fyritreytir fyri útinnan av vinnuvirksemi. Brúkarafyrilitið verður tryggjað umvegis virkna kapping, ið fremur hægri tænastustøði og dygd, umframt breiðkar um úrval av vørum og tænastum.

Á flestu marknaðum vil virkin kapping hava við sær eina fulldygga tilfeingisnýtslu, men í ávísum førum, tá ið talan er um sokallað natúrlig monopol, kunnu fyrimunirnir við at hava monopol verða størri enn undir virknari kapping. T.d. tá ið talan er um týðandi undirstøðukervi. Í tílíkum førum er týðandi at tryggja, at endamál lógarinnar framvegis verður rokkið, nú við at krevja javnbjóðis atgongd til tílík kervi ella at tryggja, at monopolstøðan ikki verður misnýtt.

Endamálið við lógini verður tryggjað við reglum um, at fyritøkur ikki gera kappingaravlagandi avtalur o.a., sum hava við sær, at fyritøkurnar frásiga sær rættin at kappast sjálvstøðugt á marknaðinum, at fyritøkur við ráðandi marknaðarstøðu ikki misnýta hesa støðu, at óheimilaður

almennur stuðul verður steðgaður, og at samanleggingar, sum møguliga kunnu skaða kappingina, verða steðgaðar ella góðkendar við treytum.

Til § 2

§ 2, stk. 1
Endamálið við ásetingini er at allýsa nýtsluøki lógarinnar.

Í greinini verður alment og privat vinnuvirksemi javnsett. Sum meginregla er alt vinnuvirksemi fevnt av lógini.

Hugtakið vinnuvirksemi er meginhugtakið í lógaruppskotinum og skal skiljast í breiðari merking. Tískil vil eitt og hvørt búskaparligt virksemi, ið fer fram á einum marknaði fyri vørur og tænastur verða fevnt av lógini. Tað er einki krav um búskaparligan vinning, og vil tí t.d. non-profit virksemi eisini verða fevnt av hugtakinum vinnuvirksemi. Val av vinnufelagsformi er heldur ikki avgerandi fyri nýtsluøki lógarinnar. Eitt nú er óviðkomandi, hvørt talan er um vinnufeløg, sjálvsognarstovnar ella almennar ella kommunalar eindir/stovnar. Avgerandi er, hvørt búskaparligt virksemi fer fram á einum marknaði fyri vørur og tænastur.

Sum meginregla er útinnan av myndugleika ikki fevnt av nýtsluøki lógarinnar. Tá ið ein almennur myndugleiki letur stuðul til privat vinnuvirksemi, er talan vanliga um útinnan av myndugleika. Tó er ásett í kapittul 4 í lógini, at kappingaravlagandi stuðul er fevndur av nýtsluøki lógarinnar.

§ 2, stk. 2
Sambært § 2, stk. 2 eru tær kappingaravmarkingar, sum eru ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering o.ø. undantiknar reglunum í 2. og 3. kapitli. Í slíkum førum kann kappingarmyndugleikin tó lata avvarðandi landsstýrismanni eina almenna áheitan, har gjørt verður vart við skaðiligu árinini á kappingina, sbrt. § 2, stk. 5 í lógini.

Ásetingin hevur til endamáls at tryggja, at politiskt ásettar reguleringar og avgerðir tiknar við heimild í lóg, ikki skulu kunnu gerast ógildugar av kappingarmyndugleikanum. Tílíkar reguleringar og avgerðir hava stundum onnur samfelagslig atlit enn atlit til kappingina.

Ein kappingaravmarking er ein beinleiðis fylgja av almennari regulering, um kappingaravmarkingin beinleiðis er ásett í lóggávuni, ella um hon greitt og eyðsæð er loyvd sambært almennu reguleringini. Avgerandi er, at lóggevari hevur fyrihildið seg til, at ein kappingaravmarking verður framd av almennu reguleringini, men at kappingaravmarkingin er neyðug grundað á serligu viðurskiftini, sum eru tilstaðar á viðkomandi øki.

Ein kappingaravmarking er ein neyðug fylgja av almennari regulering, tá ið almenna reguleringin ikki kann haldast uttan at fremja kappingaravmarkingina. Ein fyritøka, sum er áløgd at halda eina almenna regulering, hevur sostatt ikki annan møguleika enn at fremja kappingaravmarkingina. Tískil er tað almenna reguleringin og ikki atferðin hjá fyritøkuni, sum er atvoldin til kappingaravmarkingina. Um almenna reguleringin hinvegin gevur fyritøkum ávíst rásarúm, er kappingaravmarkingin ikki ein neyðug fylgja av almennu reguleringini.

Ein almenn regulering fevnir m.a. um lóggávu, kunngerðir, almennar fíggjarætlanarreglur, fíggjarnevndarskjøl og avgerðir innan fyri mørkini í kommunufulltrúnni. Ítøkiligar kommunalar avgerðir, reglur og reglugerðir eru ikki fevndar av hugtakinum almenn regulering.

Ein kappingaravmarking, sum er ásett av einum kommunustýri, er bert ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering, um tríggjar treytir eru loknar. Í fyrsta lagi skal kappingaravmarkingin vera ásett av einum kommunustýri. Í øðrum lagi skal kappingaravmarkingin vera neyðug, til tess at kommunustýrið kann útinna uppgávuna og í triðja lagi, at kappingaravmarkingin er áløgd sambært lóggávu.

Kommunufulltrúin er partur av hugtakinum almenn regulering og loyvir kommunufulltrúin kommunum at útinna ymsar kommunalar uppgávur. Talan er tó ikki um eina skyldu áløgd við lóg, um ein kommuna velur at byrja vinnuvirksemi við heimild í kommunufulltrúnni, og eru kapittul 2 og 3 tí galdandi.

Tað er týdningarmikið at hava í huga, at kappingarlógin fevnir um vinnuvirksemi og almennan stuðul til vinnuvirksemi, sambært § 2, stk. 1 í kappingarlógini. Hetta merkir, at myndugleikaútinnan og egin framleiðsla eru undantikin nýtsluøki lógarinnar.

Í tann mun eitt kommunustýri tekur avgerð um, at kommunan skal útinna vinnuvirksemi sambært kommunufulltrúnni, er talan ikki um eina uppgávu, sum er áløgd kommununi sambært lóg. Hetta er ein uppgáva, sum kommunan av egnum ávum hevur átikið sær. Tí eru kapittul 2 og 3 í kappingarlógini galdandi fyri tær kappingaravmarkingar, sum kunnu taka seg upp í hesum sambandi. Tað hevur týdning at hava í huga, at ein slík kappingaravmarking hevur avleiðingar fyri onkran, t.d. eina fyritøku, endabrúkara ella skattgjaldara í kommununi.

Í sambandi við kappingarliga regulering av kommunalum vinnuvirksemi er týðandi at minnast, at vinnuvirksemi, sum landsstovnar útinna, somuleiðis er fevnt av kap. 2 og 3 í kappingarlógini. Kappingareftirlitið hevur t.d. viðgjørt mál mótvegis Landssjúkrahúsinum og Strandfaraskipum landsins. Tað, at vinnuvirksemi útint við heimild í kommunufulltrúnni verður regulerað av kap. 2 og 3 í kappingarlógini, avmarkar tískil ikki frælsið hjá kommununum, meiri enn tað avmarkar frælsið hjá landsmyndugleikum.

Tey krøv, sum verða sett til kommunur, sum útinna vinnuvirksemi, eru vanliga tey somu, sum verða sett til vinnuvirksemið hjá landsstovnum. Um t.d. alment ella kommunalt vinnuvirksemi er í kapping við privat vinnuvirksemi, kann ikki seljast undir kostprís, og hevur alment ella kommunalt vinnuvirksemi monopol, kunnu okursprísir ikki ásetast. Hóast privat bjóða út sama vinnuvirksemi, so hevur kommunan rætt til at hava framleiðslu til egið brúk, og hetta er ikki at meta sum vinnuvirksemi, sum er fevnt av kappingarlógini. Ein kommuna kann reka eina kantinu á einum skúla ella elliseimi. Velur kommunan afturat hesum at selja til almenningin, so er hetta virksemi vinnuvirksemi fevnt av kappingarlógini.

Kommunan hevur møguleika at veita eina ískoytistænastu og kann selja ein møguligan yvirskotskapasitet. Men vinnuliga virksemið skal tó sjálvsagt kappast undir somu treytum sum privat vinnuvirksemi. Kommunur kunnu sostatt virka á einum marknaði, men hesar skulu kappast á jøvnum føti við privat vinnuvirksemi.

Skulu kommunur ella landsstovnar útinna vinnuvirksemi, sum er kappingaravlagandi, er krav um heimild í lóg. Vísast skal á, at ein avgerð tikin við støði í kommunufulltrúnni fer ikki ígjøgnum somu eftirkanning sum ein løgtingslóg.

§ 2, stk. 3
Greinin ásetir, at avgerðir tiknar av kommunalum felagsskapum sambært §51 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin) eru javnsettar við avgerðir tiknar av kommunustýrum. Orsøkin til hetta er, at heimildirnar hjá kommunustýrunum eru fluttar til kommunala felagsskapin við avtalu, ið er góðkend eftir § 51 í kommunustýrislógini. Kommunali felagsskapurin virkar ikki vegna kommununa eftir delegatión, men hevur egnar heimildir.

Avgerðir tiknar av einum kommunalum felagsskapi eru bert undantiknar kapittul 2 og 3 í kappingarlógini, um treytirnar í § 2, stk. 2 eru loknar.

Onnur kommunal samstørv, har kommunur varðveita sínar heimildir, eru ikki fevnd av ásetingini.

§ 2, stk. 4
Ásett verður, at Kappingareftirlitið ikki hevur heimild taka avgerð um, hvørt ein regulering er fevnd av stk. 2. Tað er altíð landsstýrismaður við ábyrgd av málsøkinum, ið tekur avgerðina.

Til tess at tryggja, at Kappingareftirlitið ikki kann seta til síðis politiskt ásettar reguleringar, sum er treytaðar av øðrum fyrilitum enn fyrilitum fyri kapping, er henda reglan ásett.

Hvørki Kappingareftirlitið ella Kærustovnurin hava heimild at royna avgerðina hjá landsstýrismanninum. Bert dómstólarnir kunnu royna avgerðina hjá landsstýrismanninum.

Tá Kappingareftirlitið vendir sær til avvarðandi landsstýrismann í sambandi við, at landsstýrismaðurin skal taka avgerðir eftir § 2, stk. 4, skal Kappingareftirlitið greiða nærri frá tí kappingaravmarking, ið møguliga stavar frá almennu reguleringini. Kappingareftirlitið skal somuleiðis vísa á lóggávu, sum møguliga er orsøk til kappingaravmarkingina. Metir Kappingareftirlitið, at almenna reguleringin kann útinnast uttan kappingaravmarkingina ella á minni kappingaravlagandi hátt, eigur Kappingareftirlitið at vísa á hesi viðurskifti.

Um avvarðandi landsstýrismaður svarar, at ein kappingaravmarking er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering, kann Kappingareftirlitið senda avvarðandi landsstýrismanni eina frágreiðing, sbrt. § 2, stk. 5 í kappingarlógini.

§ 2, stk. 5
Um almenn regulering ella stuðulsskipan hevur heimild í lóg, kann Kappingarráðið senda avvarðandi landsstýrismanni eina frágreiðing, ið vísir á skaðiligu árinini á kappingina, og koma við uppskoti um, hvussu kappingin kann fremjast.

Ásetingin gevur Kappingarráðnum eitt amboð at fremja kapping í teimum førum, har lógarheimild er fyri kappingaravmarkingini. Ein slík áheitan kann t.d. latast avvarðandi landsstýrismanni, tá ið almenn skipan t.d. løggilding hevur við sær, at talið av vinnurekandi á einum marknaði verður avmarkað. Í tílíkum føri er talan ikki um, at fyritøkur hava gjørt kappingaravlagandi avtalur ella at fyritøkur misnýta sína ráðandi støðu, hóast atgongdin til marknaðin verður avmarkað.

Eingi formkrøv eru til svarið frá avvarðandi landsstýrismanni. Til dømis kann landsstýrismaðurin velja at svara, at lógin ella stuðulsskipan verður broytt, at málið verður kannað nærri, ella at kappingaratlit vórðu umrødd í sambandi við lógararbeiðið, men at onnur atlit enn atlitið til kappingina vórðu tikin framum.

Áheitan frá kappingarmyndugleikanum og svarið frá landsstýrismanninum eftir § 2, stk. 5 skulu almannakunngerast, sambært § 19, stk. 2, nr. 1 í kappingarlógini

§ 2, stk. 6
Í greinini verður heimilað Kappingareftirlitinum at geva boð um bókhaldsligan skilnað millum virksemi, sum á ein ella annan hátt er vart fyri frælsari kapping orsakað av almennum einkarætti, stuðulsskipanum ella aðrari vernd og tann partin av rakstrinum, sum er í frælsari kapping.

Ásetingin skal skiljast í breiðari merking. Ein og hvør alment latin kappingarligur fyrimunur er tískil fevndur av ásetingini. Fyrimunurin nýtist ikki at vera latin beinleiðis, men kann eisini vera ein óbeinleiðis avleiðing av t.d. almennari regulering.

Ásetingin hevur til endamáls at tryggja, at krossstuðul ikki kann fara fram millum virkisøki, sum hava ein kappingarfyrimun, sum beinleiðis ella óbeinleiðis er latin av tí almenna, við virkisøki, sum er í frælsari kapping. Við hesum verður tryggjað, at árinini á kappingina av fyrimununum ikki gerast størri enn neyðugt.

Til § 3
Sambært ásetingini er kappingarlógin ikki galdandi fyri lønar- og arbeiðsviðurskifti. Hetta kemst av, at talan er um viðurskifti, ið er úrslit av samráðingum millum tveir sjálvstøðugar partar, sum hava øvugt áhugamál. Talan er tí ikki um einsæris prísáseting. Somuleiðis er talan um viðurskifti, sum, um úrslitið av samráðingum er úrslitaleyst, kunnu leggjast fyri aðrar stovnar.

Lønar- og arbeiðsviðurskifti eru avmarkað til viðurskifti millum arbeiðstakara og arbeiðsgevara. Er talan um viðurskifti, ið eisini snúgva seg um vinnuvirksemi ella vinnuáhugamál hjá triðja persóni, er kappingarlógin hinvegin galdandi.

Kappingareftirlitið kann krevja upplýsingar um lønar- og arbeiðsviðurskifti, um hesi er neyðug fyri, at Kappingareftirlitið kann útinna sítt virksemi.

Til § 4
Sambært § 4, stk. 1 eru avtalur, viðtøkur og samskipað framferð innanfyri somu fyritøku ella samtøku undantiknar kapittul 2 í kappingarlógini.

Hetta merkir at avtalur, viðtøkur og samskipað framferð millum móðurfyritøku og dótturfyritøkur ella millum dótturfyritøkur, har sama móðurfyritøka hevur avgerandi ávirkan, eru undantiknar kapittul 2 í kappingarlógini. Hetta er treytað av, at fyritøkurnar eru at meta sum ein fíggjarlig eind, har dótturfyritøkur ella dótturfyritøkurnar ikki hava sjálvstøðugan avgerðarrætt viðvíkjandi síni ella teirra framferð á marknaðinum.

Um ein móðurfyritøka og dótturfyritøka ella dótturfyritøkur hinvegin hava eina felags ráðandi marknaðarstøðu kunnu avtalur, viðtøkur og samskipað framferð vera brot á § 11 í kappingarlógini. Hetta kemst av, at § 4, stk. 1 undantekur bert kapittul 2 í kappingarlógini.

Samtøkuhugtakið í kappingarlógini verður tulkað í samsvari við samtøkuhugtakið í ES-rættinum.

§ 4, stk. 2
Eingin viðmerking er til ásetingina.

Til § 5
Í greinini verður staðfest, hvørji viðurskifti skulu kannast, tá viðkomandi marknaður skal skilmarkast. Skilmarkingin hevur til endamáls at staðfesta tær kappingarumstøður, sum ávirka luttakandi fyritøkurnar. Greinin snýr seg um varaseting, substitution,

Ásetingin avmarkar ikki, at Kappingareftirlitið kann nýta onnur metingarstøði til tess at skilmarka viðkomandi marknað.

§ 5, stk. 1
Skilmarkingin fer fram við at staðfesta ein viðkomandi vørumarknað og ein viðkomandi landafrøðiligan marknað. Endamálið við hesum er at staðfesta, hvørjir kappingarneytar kunnu leggja luttakandi fyritøkur undir kappingarligt trýst, soleiðis at hesar ikki kunnu virka óheft á marknaðinum.

Viðkomandi vørumarknaður fevnir um tær vørur og tænastur, sum brúkarin metir kunnu koma í staðin fyri hvørja aðra orsakað av teirra eyðkennum, prísum og nýtslu.

Viðkomandi landafrøðiligi marknaður fevnir um tey øki, har luttakandi fyritøkur virka, og har kappingarligu umstøðurnar eru somikið eins, og sum skilja seg frá kappingarumstøðum í grannaøkjum.

Skilmarkingin av viðkomandi marknaði verður framd við at kanna eftirspurnings- og útboðsvarasetingina og um neyðugt møguliga kapping. Hesi trý viðurskifti leggja eitt kappingartrýst á einstøku fyritøkuna og tryggja harvið, at fyritøka ikki kann virka óheft á marknaðinum.

Endamálið við eini eftirspurningsvaraseting er at kanna, hvørjar vørur og tænastur ein brúkari metir kunnu koma í staðin fyri eina ávísa vøru ella tænastu. Endamálið við eini útboðsvaraseting

er at kanna, um aðrir veitarar innan styttri skotbrá kunnu umstilla sína framleiðslu til viðkomandi vøru ella tænastu, og kunnu marknaðarføra hesar uttan týðandi meirkostnað og váða.

Um kanning av eftirspurnings- og útboðsvarasetingini kemur til ta niðurstøðu, at kappingarstøðan á marknaðinum er ivasom, skal møgulig kapping á marknaðinum kannast. Endamálið við at kanna møguliga kapping, er at fáa staðfest, hvørt tað eru fyritøkur, sum ikki eru á marknaðinum í dag, men sum innan styttri tíðarskeið, kunnu trína inn á marknaðinum og taka kappingina upp við verandi fyritøkur.

Skilmarkingin av viðkomandi marknað fer fram eftir somu meginreglum sum ES-kommissiónin nýtir. Vegleiðing frá ES-kommissiónini um skilmarking av viðkomandi marknað nr. C/372 frá 1997, er eisini ískoyti til tulking av § 5 í kappingarlógini.

§ 5, stk. 2
Eingin viðmerking er til ásetingina.

Til § 6

§ 6, stk. 1
Ásetingin inniheldur generelt forboð fyri kappingaravlagandi avtalum. Ásetingin setir forboð fyri avtalum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis hava til endamáls ella sum avleiðing at avlaga kappingina á marknaðinum.

Forboðið rakar bæði avtalur, sum hava til endamáls at avlaga kappingina, sjálvt um tær ikki hava hesa avleiðing, og avtalur, sum ikki hava til endamáls at avmarka kappingina, men har avleiðingin av avtaluni er, at kappingin verður avmarkað.

Til tess at meta um, hvørt ein avtala hevur til endamáls at avlaga kappingina, er neyðugt at kanna innihald, ætlan og rættarliga- og vinnuliga samanhangin avtalan er partur av.

Ein avtala hevur sum fylgju at avmarka kappingina, tá hon hevur eina munandi avmarkandi ávirkan á ein av kappingarparametrunum á marknaðinum, so sum; prís, framleiðslu, góðsku, úrval og nýskapan. Tá metast skal um fylgjuna, skal samanbering gerast millum støðuna, har avtalan hevur virknað, og í tí føri har hon ikki er galdandi.

Í greinini er ikki ásett, at kappingaravmarkingin skal vera munandi. Henda meginregla er íkomin gjøgnum rættarsiðvenjuna.

Forboðið fevnir bæði um loddrættar og vatnrættar avtalur. Loddrættar avtalur eru avtalur, ið eru gjørdar millum ymsu søluliðini, eitt nú millum heilsølu og smásølu. Vatnrættar avtalur eru avtalur, ið er gjørdar millum fyritøkur í sama søluliði, t.d. millum heilsølur.

Í teirri støðu, at ein avtala o.a. bæði er brot á § 6 og § 11, skal málið loysast sum eitt mál um brot eftir § 6 í kappingarlógini. Hetta er t.d. støðan, um fyritøkur við kollektivari marknaðarráðandi støðu gera kappingaravlagandi avtalur sínámillum. Ger marknaðarráðandi fyritøka kappingaravlagandi avtalu og sigast kann, at hennara støða hevur ført til komnu avtaluna, er hinvegin talan um hvør sítt brot á ávikavist § 6 og § 11.

Avtaluhugatakið í kappingarrættinum skal skiljast breiðari enn avtaluhugtakið í obligatiónsrættinum. Sambært obligatiónsrættinum er ein bindandi avtala gjørd, tá eitt tilboð hevur fingið samsvarandi góðkenning. Avgerandi fyri, hvørt ein avtala er gjørd sambært kappingarrættinum er, um minst tvær fyritøkur hava sýnt felags vilja um ávísa atferð á marknaðinum. Avtaluhugatakið verður í § 6, stk. 3 eisini víðkað til at fevna um viðtøkur millum samtøk av fyritøkum og samskipaðan atburð millum fyritøkur.

Ásetingin samsvarar við artikkul 101 í ES-sáttmálanum, undantikið er tó kravið um millumlanda ávirkan.

§ 6, stk. 2
Ásetingin inniheldur ymisk dømi um, nær ein avtala o.a. kann vera kappingaravlagandi. Talan er ikki um ein úttømandi lista.

§ 6, stk. 2, nr. 1
Forboðið fyri at áseta keyps-, sølu ella aðrar viðskiftatreytir merkir millum annað, at fyritøkur ikki kunnu avtala felags innkeyps- ella søluprísir sínámillum ella avtala felags gjaldstreytir, avsláttur ella aðrar sølutreytir. Undir hesum koma eisini avtalur um felagspríshækkingar, bindandi víðarisøluprísir og t.d. tá eitt vinnugreinafelag almannakunnger vegleiðandi prísir.

§ 6, stk. 2, nr. 2
Forboð er eisini fyri at kappingarneytar gera avtalur, sum hava til endamáls at avmarka útboðið og harvið ávirka prísstøðið.

Forboðið fyri at avmarka útboðið fevnir m.a. um støður, har fyritøkur avtala at avmarka framleiðslu, framleiðsluorku ella seløki.

§ 6, stk. 2, nr. 3
Øll sløg av avtalum, har kappingarneytar avtala at býta sínámillum marknaðir, viðskiftafólk ella landafrøðilig øki, eru ólóglig.

§ 6, stk. 2, nr. 4
Ásetingin ásetir, at forboð er fyri, at kappingarneytar gera avtalur, har mismunur verður framdur á keyparum, sum eru í somu støðu, ella um keyparar verða viðfarnir eins, sum ikki eru í somu støðu, uttan at sakligar orsakir fyriliggja.

§ 6, stk. 2, nr. 5
Talan kann eisini vera um brot á § 6 um vørur og tænastur vera bundnar saman. Í tí føri har keyp av eini vøru er treytað av keyp av aðrari vøru, sum hvørki natúrliga ella eftir handilsligari siðvenju hoyra sama, er talan um brot á § 6.

§ 6, stk. 2, nr. 6
Stovnan av samváða (joint-venture), sum ikki varandi hevur um hendur allar funktiónir í eini sjálvstøðugari fyritøku, kemur undir avtaluhugtakið í § 6. Forboð er fyri at stovna tílíkar

samváðar, um avtalan hevur við sær eina samskipan av kappingarligu atferðini hjá luttakandi fyritøkum.

Avtalur um samváða koma antin undir avtaluhugtakið í kapitli 2 ella undir samanleggingarhugtakið í § 13. Avgerandi fyri um samváðin kemur undir samanleggingarhugtakið er, hvørt samváðin hevur um hendi allar funktiónir í eini sjálvstøðugar fyritøku.

Talan er um brot á § 6 um fyritøkur stovna ein ikki sjálvstøðugan samváða, sum hevur við sær eina samskipan av kappingarligu atferðini hjá luttakandi fyritøkum.

§ 6, stk. 2, nr. 7
Eftir § 6, stk. 1 er tað forboðið fyritøkum at gera avtalur um keyps- ella søluprísir - bæði tá tað ræður um vatnrættar og loddrættar prísavtalur. Herundir koma eisini avtalur um bindandi víðari søluprísir o.a.

Tí er ásett í hesi grein, at tilstuðlan frá einum veitara at fáa ein ella fleiri handilsfelagar til ikki at víkja frá vegleiðandi søluprísum, er forboðin. Hetta óansæð, um tilstuðlanin verður framd við at løna teir handilsfelagar, sum gera eftir boðum, ella at revsa teir handilsfelagar, sum ikki gera eftir boðum.

§ 6, stk. 3
Ásetingin víðkar avtaluhugtakið í stk. 1 til eisini at fevna um viðtøkur millum samtøk av fyritøkum og samskipaðan atburð millum fyritøkur.

Hugtakið viðtøka kann bæði fevna um viðtøkur, avgerðir og fráboðanir. Tað er einki krav, at viðtøkan er løgfrøðiliga bindandi fyri limirnar. Hugtakið samtak av fyritøkum, fevnir um øll sløg av vinnugreinafeløgum og samskipaðum samstarvi í einum og hvørjum sniði millum fyritøkur. Sum dømi um viðtøkur kunnu nevnast viðtøkurnar hjá vinnugreinafeløgum, annaðhvørt tær eru bindandi ella vegleiðandi fyri limirnar, og viðtøkur, ið eru gjørdar innan fyri eitt samtak av fyritøkum.

Samskipað virksemi merkir, at tvær ella fleiri fyritøkur samskipa teirra atburð, uttan tó at hava gjørt eina veruliga avtalu. Slíkur atburður kemur undir forboðið, sbrt. § 6. Hetta er tó treytað av, at samband hevur verið millum fyritøkurnar, t.d. fundir o.tíl.. Samskipaður atburður fevnir um eitt og hvørt beinleiðis ella óbeinleiðis samband millum fyritøkur, sum hevur til endamáls ella sum avleiðing, annaðhvørt at ávirka marknaðaratburðin hjá einum møguligum kappingarneyta, ella at upplýsa ein slíkan kappingarneyta um tann marknaðaratburð, sum ein fyritøka fremur ella ætlar at fremja. Fyritøkur, ið hava meinlíkan atburð á marknaðinum, verða ikki raktar av forboðnum uttan so, at talan er um ætlaða tillaging, ið er úrslit av samskipaðum atburði.

§ 6, stk. 4

Ásetingin gevur Kappingareftirlitinum heimild til bæði eftir kæru ella ex officio at geva boð. Kappingareftirlitið kann eisini enda eitt mál við at gera tilsøgn, sum fyritøkur hava latið bindandi sbrt. § 27, uttan at Kappingareftirlitið skal taka avgerð, um brot er framt á § 6.

§ 6, stk. 5
Einans tær ásetingar í avtaluni, sum eru kappingaravlagandi, hava ikki gildi. Sjálv avtalan er galdandi uttan so, at tær ásetingar, sum eru kappingaravlagandi, ikki kunnu skiljast burturúr avtaluni.

Ógildi fær virknað millum partarnar og eisini triðjamann. Avleiðingarnar av ógildan vera staðfestar við støði í vanligu reglunum í obligatiónsrættinum.

Til § 7

§ 7, stk. 1. nr. 1
Sambært § 7, stk. 1, nr. 1. er forboðið í § 6, stk. 1 um kappingaravlagandi avtalur ikki galdandi, um samlaðu marknaðarpartarnir hjá luttakandi fyritøkum, innanfyri ávísu vøru ella tænastuveitingina, ikki eru hægri enn 10 prosent á nøkrum av teimum viðkomandi marknaðum, sum avtalan o.a. viðvíkur, tá avtalan er gjørd millum fyritøkur, sum eru, ella sum kunnu vera møguligir kappingarneytar á einum av hesum marknaðum (avtalur millum kappingarneytar).

Til tess at ein fyritøka skal kunna rokna seg fram til, um treytirnar viðvíkjandi marknaðarparti eru loknar, er neyðugt at skilmarka viðkomandi marknað, sum í tí ítøkiliga føri verður ávirkaður av avtaluni o.a. Hetta fer fram við at skilmarka viðkomandi marknað fyri ávísu vøruna ella tænastuna og landafrøðiliga marknaðin, sbrt. § 5 í kappingarlógini.
Sambært ásetingini fevna *avtalur o.a.* um avtalur millum fyritøkur, viðtøkur millum samtøk av fyritøkum og samskipan millum fyritøkur.

Ivast ein fyritøka í, um ein avtala o.a. lýkur treytirnar fyri undantøku frá forboðsásetingunum í § 6, stk. 1, kann fyritøkan heita á Kappingareftirlitið um váttan sambært § 9.

§ 7, stk. 1, nr. 2
Eftir § 7, stk. 1, nr. 1. er forboðið í § 6, stk. 1 ikki galdandi, um marknaðarpartar hjá luttakandi fyritøkum, hvørt í sær, ikki eru hægri enn 15 prosent á nøkrum av viðkomandi marknaðum, sum avtalan o.a. viðvíkur, og at luttakandi fyritøkur ikki eru ella møguliga kunnu vera kappingarneytar á hesum marknaðum, t.d. avtalur millum heil- og smásølulið (avtalur millum ikki kappingarneytar). Í slíkum føri mugu hvørki marknaðarpartarnir hjá heil- ella smásølu vera hægri enn 15 % á nøkrum av viðkomandi marknaðum, sum avtalan o.a. viðvíkur.

ES-Kommissiónin hevur í sínum leiðreglum (EUT 2011 C11/1) um nýtslu av TEUF artikkul 101 til horisontalar samstarvsavtalur skilmarkað í pkt. 10, at tvær fyritøkur eru kappingarneytar, um hesar virka á sama viðkomandi marknaði. Ein fyritøka er ein møguligur kappingarneyti til aðra fyritøku, um tað uttan avtalu er sannlíkt, at fyrrnevnda fyritøka, í teirri støðu at ein lítil og varandi príshækking kemur, innan stutta tíð vil gera neyðugar íløgur ella rinda neyðugan skiftiskostnað til tess at koma inn á viðkomandi marknað, har hin fyritøkan er virkin. Tað er ikki nóg mikið at

bert ein ástøðiligur møguligi er fyri at fyritøkan kemur inn á marknaðin; metingin skal byggja á veruleikakend viðurskifti.

§ 7, stk. 2
Í § 7, stk. 2 er ásett, at í teimum førum har trupult er at meta um, hvørt avtala o.a. er gjørd millum kappingarneytar ella ikki, skal markvirði á 10 % sambært § 7, stk. 1, nr. 1 nýtast sum grundarlag.

Til 7, stk. 3
Í 7, stk. 3 verður ásett, at undantøkini í § 7, stk. 1, ikki eru galdandi, um avtalan, viðtøkan ella samskipanin millum fyritøkur hevur til endamáls at avmarka kappingina. Undantøkini eru sostatt bert galdandi, um avtalan hevur sum fylgju at avmarka kappingina.

Til tess at meta um, hvørt ein avtala o.a. hevur til endamáls at avmarka kappingina, verður hugt nærri at innihaldinum í avtaluni, hvør ætlanin er við avtaluni, og hvussu avtalan rættar- og vinnuliga er skipað.

Ásetingin hevur við sær, at avtalur, sum eftir ítøkiliga meting, kunnu metast at hava til endamáls at avlaga kappingina, ikki eru fevndar av undantøkunum í § 7, stk. 1. Hetta merkir hinvegin, at avtalur, sum ikki hava til endamáls at avmarka kappingina ikki eru fevndar av forboðnum í § 6, stk. 1, um hesar lúka treytirnar í § 7, stk. 1, hóast hesar avtalurnar hava sum fylgju at avmarka kappingina.

Um ein avtala hevur til endamáls at avmarka kappingina, er rættarsiðvenjan hon, at tað ikki er neyðugt at prógva, at kappingaravlaging er farin fram, til tess at staðfesta brot á § 6. Um ein avtala ikki hevur til endamáls at avmarka kappingina, er neyðugt, til tess at staðfesta um hon er ólóglig sambært § 6, at kanna, um avtalan hevur veruligar ella møguligar ásýnligar kappingaravmarkingar við sær.

Ásetingin verður tulkað í samsvari við fráboðan C291/1 frá ES-Kommissiónini.

Til § 7, stk. 4
Í § 7, stk. 4 verður ásett, at forboðið í § 6, stk. 1, óansæð markvirðini í § 7, stk. 1, er galdandi fyri kappingaravmarkandi avtalur o.a. um avtalan saman við líknandi avtalum avmarkar kappingina.

Ásetingin merkir, at um ein kappingaravmarking fer fram vegna samlaða virknaðin av líknandi avtalum, skal tann einstaka avtalan ikki kunnu vera undantikin sambært § 7, stk. 1 og 2, tá avtalan er viðvirkandi til samlaðu kappingaravmarkingina.

Ásetingin verður tulkað í samsvari við pkt. 10 í fráboðan C291/1 frá ES-Kommissiónini.

Til 7, stk. 5
Eftir § 7, stk. 5, eru kappingaravmarkandi avtalur, har samlaðu marknaðarpartarnir hjá luttakandi fyritøkum eru niðanfyri markvirðini í § 7, stk. 1, ikki fevndar av forboðnum í § 6, stk. 1, um marknaðarpartarnir tvey fylgjandi álmanakka ár bert í minni mun fara útum ásettu mørk.

Ásetingin verður tulkað í samsvari við fráboðan C291/1 frá ES-Kommissiónini. Sambært fráboðanini verður ein hækking á 2 prosent stig tvey fylgjandi álmanakka ár mett at verða innanfyri ásettu mørk.

§ 7, stk. 6
Eingin viðmerking er til § 7, stk. 6.

Til § 8

§ 8, stk. 1
§ 8, stk. 1 er ein undantaksregla frá forboðnum í § 6, stk. 1. T.v.s. at talan er um avtalu o.tíl., sum er í ósamsvari við § 6, stk. 1, men sum orsakað av, at avtalan førir við sær aðrar fyrimunir, verður frítikin frá forboðnum í § 6, stk. 1. Slík avtala skal tó vera í samsvari við almenna setningin í § 1 um fulldygga almenna tilfeingisnýtslu.

Rætturin, men ikki skyldan, til at boða frá avtalu
Ein avtala, sum er í ósamsvari við § 6, men sum lýkur treytirnar fyri frítøku í § 8 er í sær sjálvum frítikin frá forboðnum í kappingarlógini, tí hon lýkur treytirnar fyri frítøku eftir § 8, stk. 1, pkt. 1-4. Tað er tí ikki neyðugt, at avtalan verður fráboðað kappingarmyndugleikanum.

Fyritøkan kann sjálv meta um, hvørt avtalan er í ósamsvari við § 6, stk. 1, og um treytirnar í § 8, stk. 1, pkt. 1-4, eru loknar. Verður ivi sáddur um rættleikan av hesum, er tað upp til fyritøkuna at føra prógv fyri, at avtalan er frítikin.

Endamálið við § 8, stk. 1 er tí einans at geva fyritøkum møguleika til at venda sær til kappingarmyndugleikan fyri at fáa váttað, at avtalan er frítikin. Á henda hátt sleppur fyritøkan undan tí vanda, sum liggur í, at metingin hjá fyritøkuni seinni verður kolldømd av kappingarmyndugleikanum.

Ásetingin skal ikki skiljast soleiðis, at tað áliggur nøkur skylda hjá fyritøkum at fráboða avtalur til kappingarmyndugleikan. Heldur ikki skal ásetingin skiljast soleiðis, at ein treyt fyri frítøku sambært § 8, stk. 1 er, at avtalan er fráboðað kappingarmyndugleikanum.

Fráboðaða avtalan hevur órin fyri sekt frá tí, at avtalan er fráboðað og fram til, at Kappingareftirlitið hevur tikið avgerð.

Treytir fyri frítøku
Treytirnar í § 8, stk. 1, nr. 1-4 skulu vera loknar, áðrenn avtala, ið er í ósamsvari við forboðið í § 6, stk. 1, er frítikin sambært § 8, stk. 1. Talan er um tvær positivar treytir, har tann fyrra inniheldur ávísar valmøguleikar og tvær negativar treytir. Allar treytir skulu vera loknar, áðrenn

avtalan er frítikin sambært § 8, stk. 1. Avtalur, sum ikki lúka hesar treytir, kunnu ikki frítakast, og tí kann tað vera ein fyrimunur at kanna fyrst ta treyt, sum størst ivi er um, at avtalan lýkur.

Orsøkin til, at avtala, sum er fevnd av forboðnum í § 6, stk. 1, kann frítakast eftir § 8, stk. 1 er, at avtalur, sum lúka treytirnar í § 8, stk. 1 nr. 1-4, hava við sær batar fyri samfelagið, sum á nøktandi hátt viga upp ímóti tí kappingarliga bága, sum avtalan hevur við sær.

Fyrsta treyt
1) fremur fulldygga framleiðslu ella útbreiðslu av vørum ella tænastuveitingum, ella fremur tøkniliga ella búskaparliga menning
Fyrsta treytin fyri frítøku er, at avtalan førir til styrkt virkisføri innan framleiðslu og útbreiðslu av vørum ella tænastum, ella stuðlar undir tøkniliga ella búskaparliga menning. Fyrsta treytin er ikki einans lokin við, at vísast kann á ein rakstrarligan bata hjá einstøkum fyritøkum. Fyri at lúka fyrstu treytina er neyðugt at vísa á, at avtalan hevur við sær, at samfelagsliga tilfeingið verður gagnnýtt betur enn áður. Talan skal sostatt vera um objektivar fyrimunir.

Fyri at tryggja, at avtalan hevur við sær størri batar enn bágar, er fyrst og fremst neyðugt at staðfesta eitt samband millum avtalu og tað uppáhald um bata av samfelagsliga tilfeinginum, sum er sett fram, og virðið á hesum bata.

Avtalupartarnir skulu tí mótvegis kappingarmyndugleikanum skjalprógva:
a) hvat slag av batum talan er um,
b) at samband er millum avtalu og styrkt virkisføri,
c) sannlíkindi og stødd á ávístum batum,
d) nær og hvussu hvør bati verður rokkin.

Staðfesting av, hvat slag av bata talan er um, gevur kappingarmyndugleikanum møguleika at taka støðu til, um batin er samfelagsliga gagnligur ella einans til fyrimuns fyri avtalupartarnar. Talan er t.d. ikki um objektiva betran, tá ið tvær fyritøkur gera avtalu um fastan prís, tí tílík avtala styrkir ikki virkisførið á nakran hátt. Talan er einans um, at virði verða flutt frá brúkarunum til avtalupartarnar.

Tað skal vera møguligt at staðfesta, at samband er millum avtaluna og tað styrkta virkisførið. Kappingarmyndugleikin skal hava vissu fyri, at ávísti batin kemur av avtaluni og ikki av øðrum viðurskiftum, sum onki hava við avtaluna at gera.

Í síni meting av, um samband er millum avtaluna og tað styrkta virkisførið, skal kappingarmyndugleikin leggja dent á, um sambandið er beinleiðis ella óbeinleiðis. Kann beinleiðis samband ávísast millum avtaluna og styrkta virkisførið, verður vanliga mett, at samband er millum avtaluna og tað styrkta virkisførið. Eitt nú er talan um beinleiðis samband, tá ið ein avtala um útbreiðslu hevur við sær betri møguleikar at býta út vørur og tænastur og fyri lægri kostnað.

Megna avtalupartarnir einans at vísa á eitt óbeinleiðis samband millum avtalu og styrkt virkisføri, vil kappingarmyndugleikin vanliga meta, at samband er ikki millum avtaluna og styrkta virkisførið. Dømi um slíkt óbeinleiðis samband er, tá hildið verður uppá, at ein avtala, sum hevur

við sær hægri vinning, fer at hava við sær, at avtalupartarnir kunnu nýta meira pening til gransking og menning.

Fyritøkurnar skulu antin skjalprógva batarnar ella gera metingar av virðinum av teimum batum, sum hildið verður uppá, eru til staðar. Somuleiðis skulu fyritøkurnar skjalprógva batarnar ella meta um, nær og hvussu hesir batar verða framdir.

Onnur treyt
2) tryggjar brúkarunum rímiligan part av tí fyrimuni, sum kappingaravmarkingin hevur við sær

Onnur treytin ásetir, at brúkarin skal hava ein part av tí fyrimuni, sum avtalan hevur við sær. Orðið, brúkarin, merkir í hesum føri, at brúkararnir eru allir beinleiðis og óbeinleiðis brúkarar av vøruni ella tænastuni, eitt nú framleiðslufyritøkur, sum brúka eina vøru til egna framleiðslu, heilsølur og handlar, sum keypa eina vøru við víðarisølu fyri eyga, og at enda brúkarar, sum keypa eina vøru til privata nýtslu. Hugtakið, brúkari, fevnir sostatt um øll seinni sølulið og endabrúkaran.

Teir fyrimunir, sum kunnu ávísast, eru m.a. lægri prísir, betri vørugóðska, betri tænastugóðska ella betri útbreiðslunet. Hægri tænastustøði og trygd eru eisini dømi um fyrimunir, sum vísast kann á.

Triðja treyt
3) ikki áleggur fyritøkum avmarkingar, sum eru óneyðugar fyri at náa hesum endamálum

Triðja treytin fyri frítøku er, at avtalan ikki áleggur avtalupørtunum óneyðugar avmarkingar fyri at fáa teir batar, sum avtalan hevur við sær. Tað eru tvær fortreytir, sum skulu vera til staðar, um triðja treytin skal metast at vera lokin. Fyrst og fremst skal avtalan í sær sjálvum vera neyðug fyri, at virkisførið verður styrkt. Í øðrum lagi skulu tær einstøku kappingaravmarkingar, sum avtalan hevur við sær, vera neyðugar fyri at kunna styrkja um virkisførið.

Metingarstøðið er tí, at avtalan og einstøku kappingaravmarkingarnar skulu hava við sær, at ávíst virksemi verður fulldyggari framt við avtaluni, enn um avtalan og einstøku kappingaravmarkingarnar ikki vóru galdandi millum partarnar.

Kappingarmyndugleikin kannar, um teir ávístu batarnir eru sermerktir fyri avtaluna soleiðis, at tað ikki er møguligt at náa somu batar á annan hátt. Kappingarmyndugleikin kann krevja, at partarnir greiða frá, hví ávís onnur alternativ, ið ikki hava við sær somu avmarking av kappingini, ikki eru møgulig, ella ikki eru líka munagóð.

Tá ið tað er staðfest, at avtalan er neyðug fyri, at virkisførið verður styrkt, skal støða takast til, um hvør einstøk kappingaravmarking er ein neyðug fortreyt fyri, at virkisførið verður styrkt. Ein kappingaravmarking er neyðug, tá ið teir batar í virkisføri, sum avtalan hevur við sær, hvørva ella minka munandi um kappingaravmarkingina. Jú meira umfatandi ein kappingaravmarking er, tess størri er kravið til avtalupartarnar at skjalprógva, at kappingaravmarkingin er neyðug. Tað er ósannlíkt, at ávísar hardcore kappingaravmarkingar, sum t.d. prísásetan, avmarking av framleiðslu og sølu, og sundurbýti av marknaðum ella kundum, yvirhøvur kunnu metast sum

neyðugar, tí høvuðsendamálið við slíkum avmarkingum er altíð at avmarka kappingina, og við hesum at skapa avtalupørtunum størri vinning.

Tá ið metast skal um, hvussu neyðug ein kappingaravmarking er fyri at røkka ávísum bata av virkisføri, skulu veruligu umstøðurnar, har avtalan er galdandi, takast við í metingina. Serliga skal takast við, hvussu struktururin er á marknaðinum og tann handilsligi váði, sum avtalupartarnir taka á seg í sambandi við avtaluna. Jú meira óvist tað er, um vøran ella tænastan, sum avtalan fevnir um, fer at verða væl móttikin, tess meira neyðugt kann tað verða fyri avtalupartarnar, at kappingaravmarkingin sleppur at vera galdandi, møguliga einans í eitt stutt tíðarskeið.

Fjórða treyt
4) ikki gevur fyritøkunum møguleikan at forða fyri kapping innan ein týðandi part av ávísu vøruni ella tænastuveitingini

Fjórða treytin fyri frítøku hevur til endamáls at tryggja, at ávís kapping framhaldandi verður á tí marknaði, har avtalan er galdandi. Ásannandi, at kapping millum fyritøkur er ein týðandi fyritreyt fyri búskaparligum virkisføri, er neyðugt at tryggja, at virkin kapping er á marknaðinum eisini eftir, at avtala er komin í gildi. Hvørvur kappingin á marknaðinum, orsakað av eini avtalu, fer tað samfelagsliga gagnið, sum avtalan skapar, í longdini at javnast av øðrum samfelagsligum missum, t.d. hægri prísum, vánaligari nýtslu av tilfeingi, minni framburði og menning.

Fyri at tryggja, at fjórða treytin er lokin, er neyðugt at kanna, hvussu kappingin fer fram á marknaðinum, hvørjum slagi av kappingarligum trýsti, avtalupartarnir eru undir, og hvørja ávirkan avtalan hevur á tað kappingarliga trýstið, sum avtalupartarnir eru undir. Atlit skal takast til bæði veruliga og møguliga kapping.

Marknaðarparturin hjá avtalupørtunum hevur týdning, tá metast skal um fjórðu treytina, men er ikki avgerandi fyri metingina. Sostatt kann ikki sigast, at ein marknaðarráðandi fyritøka ongantíð kann fáa avtalu frítikna eftir § 8. Hinvegin kann sigast, at ein avtala, sum hevur við sær, at ein marknaðarráðandi støða verður misnýtt, kann ikki fáa frítøku eftir § 8. Neyðugt er í hvørjum einstøkum føri at staðfesta, um kappingarneytarnir hava møguleika at kappast við avtalupartarnar, og í hvønn mun teir eru eggjaðir til at gera tað.

Tað er somuleiðis neyðugt at staðfesta, hvørja kappingarliga avleiðing, avtalan hevur fyri marknaðin. Ein avtala, sum beinir burtur týðandi tættir í kappingini um prískapping, nýskapan og menning av nýggjum vørum, lýkur sjáldan fjórðu treytina.

Atburðurin hjá avtalupørtunum á marknaðinum, eftir at avtalan er komin í gildi, kann geva ábending um, hvørt fjórða treytin er lokin. Um avtalupartarnir hava hækkað prísstøðið munandi, síðan avtalan kom í gildi, ella um t.d. handilstreytirnar eru herdar munandi, kann hetta vera tekin um, at avtalupartarnir ikki eru undir veruligum kappingarligum trýsti, og at fjórða treytin ikki er lokin, av tí at kapping innan ein týðandi part av ávísu vøruni er forðað.

Kappingarliga støðan, áðrenn avtalan kom í gildi, kann eisini geva ábending um, hvørja ávirkan avtalan fer at hava á kappingina. Ein fyritøka kann forða kapping innan ein týðandi part av ávísu vøruni við at fáa avtalu í lag við ein kappingarneyta, sum áðrenn avtaluna førdi seg fram sum

maverick-fyritøka, t.e. ein fyritøka, sum ikki vil fylgja einum samskipaðum ráki á einum marknaði. Tílík avtala kann broyta hugburðin hjá maverick-fyritøkuni, og sostatt hvørvur ein týðandi kelda til kapping á marknaðinum.

Veita avtalupartarnir vørur á sama marknaði, er neyðugt at kanna, í hvønn mun hesar kunnu varasetast fyri hvørja aðra, tí vørur, sum kunnu varasetast, leggja kappingarligt trýst á hvørja aðra. Jú meira vørurnar kunnu varasetast, tess størri kappingaravmarkandi virknað kann ein avtala hava, og tískil er tað lítið sannlíkt, at fjórða treyt tá er lokin.

Umframt at kanna veruliga kapping er eisini neyðugt at kanna møguligu kappingina. Hetta krevur, at tað verður kannað, hvussu atgongdin til marknaðin er hjá fyritøkum, sum ikki longu hava virksemi á viðkomandi marknaði. Eitt og hvørt uppáhald frá pørtunum um, at góð atgongd er til marknaðin, skal skjalprógvast, og partarnir skulu skjalprógva, hví møgulig kapping í serstaka førinum kann leggja eitt veruligt kappingarligt trýst á avtalupartarnar.

§ 8, stk. 2
Í § 8, stk. 2-4 verða ásettar reglurnar í sambandi við umbøn um váttan um frítøku og leingjan av frítøku.

Sambært stk. 2 skulu fráboðanir latast Kappingareftirlitinum. Ásetingin gevur fyritøkum rætt til at fráboða Kappingareftirlitinum eina avtalu fyri at fáa eina váttan uppá, at avtalan er frítikin frá forboðnum í § 6, stk. 1. Sum áður nevnt, er talan ikki um eina fráboðanarskyldu, men um ein rætt, sum fyritøkur hava.

Ein kappingaravlagandi avtala, samskipan ella viðtøka kann fráboðast av hvørji einstakari fyritøku ella av fleiri fyritøkum í felag. Vanliga mannagongdin er, at fyritøkur velja eitt felags umboð, sum tekur sær av øllum samskifti við kappingarmyndugleikan.

Um Kappingareftirlitið staðfestir, at upplýsingar mangla ella ikki eru nøktandi, skal Kappingareftirlitið geva boð um hetta og skal seta eina rímiliga freist til at fáa vantandi upplýsingarnar til vegar.

§ 8, stk. 3
Eftir § 8, stk. 3 skal ein frítøka eftir § 8, stk. 1 tilskila, nær hon kemur í gildi og hvussu leingi, hon er galdandi. Vanliga er frítøkan galdandi frá tí degi, hon er fráboðað, men um tað verður mett meira hóskandi, kann avgerð takast um, at frítøkan er galdandi frá tí degi, avtalan var gjørd. Kappingarráðið kann leggja treytir við eini frítøku eftir § 8, stk. 1.

Longdin á frítøkuni verður m.a. grundað á, hvussu stór vissa er fyri teimum viðurskiftum, sum eru grundarlag undir frítøkuni, undir hesum serliga við atliti til gongdina í framtíðini. Jú meira óvissa er um viðurskiftini, tess styttri verður gildistíðin.

Um so er, at viðurskifti í avtaluni eru broytt eftir fráboðanina, og hesi viðurskifti hava verið avgerandi fyri, at Kappingareftirlitið gav frítøku, fær (nýggja) frítøkan gildi, tá broytingarnar eru fráboðaðar og góðkendar av Kappingareftirlitinum.

Í sambandi við frítøku kunnu ymiskar treytir leggjast við. Hvørjar treytir valdast, hvat slag av frítøku talan er um. Treytir kunnu vera sjálvstøðugt bindandi, t.d. um støðuga fráboðanarskyldu, ella treytir, ið skulu verða loknar, áðrenn ein frítøka kann fráboðast.

§ 8, stk. 4
Eftir § 8, stk. 4 kann Kappingareftirlitið eftir áheitan leingja eina frítøku, um so er, at treytirnar í stk. 1 framvegis eru loknar. Kravt verður tó, at avtalan verður fráboðað Kappingareftirlitinum av nýggjum, so staðfestast kann, um treytirnar í § 8, stk. 1 framvegis eru loknar. Kappingareftirlitið kann eisini broyta treytirnar, um tørvur er á hesum. Verður frítøka longd eftir § 8, stk. 4, skal tilskilast, nær frítøkan kemur í gildi, og hvussu leingi frítøkan er galdandi.

Tilskilanin til stk. 3 merkir, at ein avgerð um at leingja eina frítøku skal skilmarka tíðarskeiðið har frítøka er galdandi. Kappingareftirlitið kann áseta og broyta treytir í sambandi við longda frítøku.

§ 8, stk. 5
§ 8, stk. 5 ásetir reglur fyri afturtøku og broyting av frítøku. Vanliga er ein broyting av eini frítøku at meta sum eitt minni inntriv enn ein afturtøka. Kappingarmyndugleikin eigur tí eftir fyrisitingarligu lutfalsmeginregluni altíð at meta um, hvørt ein broyting er nøktandi, ella um neyðugt er við eini afturtøku.

Reglurnar í hesi grein eru bert galdandi, tá ið ein fyrisitingarlig avgerð til fyrimuns fyri avtalupartarnar verður broytt til eina fyrisitingarliga avgerð, sum í minni mun er til fyrimuns fyri avtalupartarnar. Hetta merkir, at avgerðir eftir § 8, stk. 5, nr. 1-3, skulu sendast til hoyringar hjá pørtunum eftir reglunum í fyrisitingarlógini.

Tað eru tríggjar støður, sum hvør sær kunnu hava við sær, at ein avgerð um frítøku eftir stk. 2 ella stk. 4 verður tikin aftur, ella at broyting verður framd í henni. Talan er um gjølliga uppreksan.

Viðurskiftini broytast munandi
Eftir § 8, stk. 5, nr. 1 kann Kappingareftirlitið broyta ella taka aftur eina frítøku, um viðurskiftini, ið vóru grundarlag undir avgerðini, eru munandi broytt. Talan er í hesum føri um verulig viðurskifti, sum Kappingareftirlitið ikki hevði kunnleika til frammanundan.

Í ásetingini er ein meginregla um, at broytingin skal vera munandi. Hetta merkir, at smávegis broytingar í veruligu viðurskiftunum vanliga ikki kunnu vera grundarlag undir eini afturtøku, serstakliga ikki, um frítøkan er givin fyri eitt styttri tíðarskeið. Um frítøkan er givin fyri eitt longri áramál, og broytingar í marknaðarviðurskiftunum hava við sær, at frítøkan skaðar kappingina álvarsamt, kann ein afturtøka vera neyðug.

Er talan bert um smávegis broytingar í veruligu viðurskiftunum, kann grundarlag vera fyri at gera broytingar í eini frítøku, men Kappingareftirlitið eigur at brúka hesa heimild við varsemi. Er neyðugt at taka aftur eina frítøku, tí veruligu umstøðurnar eru munandi broyttar, fáa avtalupartarnir eina eftir umstøðunum hóskandi freist til at broyta sína avtalu o.tíl. soleiðis, at avtalan ikki er fevnd av forboðnum í § 6.

Vantandi eftirlíkan av treytum
Eftir § 8, stk. 5, nr. 2 kann Kappingareftirltið broyta ella taka aftur eina frítøku, um avtalupartarnir ikki halda tær treytir, sum settar eru í sambandi við frítøkuna. Sambært vanligu fyrisitingarligu lutfalsmeginregluni fara smærri brot á treytirnar ikki at hava við sær, at frítøkan verður tikin aftur.

Skeivar ella villleiðandi upplýsingar
Hava avtalupartarnir latið Kappingareftirlitinum skeivar ella villleiðandi upplýsingar, kann frítøkan vanliga verða tikin aftur. Í tílíkum førum er avgerðin tikin á skeivum grundarlagi uttan so, at talan er um upplýsingar, sum ikki hava havt týdning fyri metingina av, um treytirnar fyri frítøku vóru loknar.

Tað eru einans upplýsingar, sum avtalupartarnir eru komnir við, sum kunnu hava við sær, at frítøkan verður tikin aftur. Er talan um skeivar ella villleiðandi upplýsingar, sum Kappingareftirlitið sjálvt hevur fingið frá øðrum enn avtalupørtunum ella teirra umboðum, kann frítøkan ikki takast aftur eftir § 8, stk. 5, nr. 3.

Til § 9
Ásetingin gevur Kappingareftirlitinum heimild til, eftir áheitan frá eini fyritøku ella samtaki av fyritøkum, at vátta, at ein avtala eftir teimum viðurskiftum, sum Kappingareftirlitið hevur kunnleika til, ikki er fevnd av forboðnum í § 6, stk. 1, og at ongin orsøk tí er at gera inntriv eftir § 6, stk. 4, sbr. tó § 9.

Treytin fyri at veita slíka váttan um ikki-uppílegging er, at ein áheitan skal verða latin Kappingareftirlitinum. Er áheitan latin inn, er Kappingareftirlitinum eftir hesi grein álagt at taka avgerð um, hvørt váttan kann latast.

Ein váttan eftir § 9 er í útgangsstøði bindandi fyri Kappingareftirlitið. Váttanin verður tó altíð grundað á tey viðurskifti, sum Kappingareftirlitið hevur kunnleika til. Hetta merkir, at tað eru tríggjar støður, sum kunnu hava við sær, at váttanin missir sín bindandi virknað fyri Kappingareftirlitið:

1) Um sjálvt grundarlagið undir avgerðini broytist, t.d. við at marknaðarviðurskifti broytast munandi.
2) Um tað vísir seg, at viðurskifti av týdning ikki hava verið partur av grundarlagnum, sum avgerðin er tikin á, og at Kappingareftirlitið ikki hevði kunnleika og ikki kundi væntast at hava kunnleika til hesi viðurskifti, tá váttanin var givin.
3) Um avgerðin er tikin eftir skeivum ella villleiðandi upplýsingum, og hesar upplýsingar eru latnar inn av avtalupørtunum ella umboðum teirra.

Fyrimunurin hjá fyritøkum við eini váttan um ikki-uppílegging er, at um Kappingareftirlitið seinni broytir støðu sína til tey viðurskifti, sum ein váttan er grundað á, kunnu avtalupartarnir neyvan áleggjast sekt eftir § 35, tí fortreytin í § 35 um grovt ósketni ella tilætlað brot er neyvan til staðar í tílíkum máli.

Metir Kappingareftirlitið, at váttan um ikki-uppílegging ikki kann gevast, er talan um avtalu, sum er fevnd av forboðnum í § 6. Hevur fyritøkan ikki latið inn fráboðan um frítøku eftir § 8, kann sekt áleggjast sambært § 35, stk. 1, nr. 1. Víst verður til viðmerkingar til § 8, stk. 1.

Velur fyritøkan at lata inn fráboðan um frítøku, hava partarnir órin fyri sekt frá tí, at fráboðanin er latin inn, og fram til avgerð er tikin.

Kappingareftirlitið kann ikki av sínum eintingum kanna, um ein avtala, sum er fráboðað eftir § 9, lýkur treytirnar fyri frítøku eftir § 8. Hinvegin hava fyritøkurnar møguleika at søkja um bæði váttan eftir § 9 og frítøku eftir § 8. Kappingareftirlitið fer altíð, uttan mun til, um søkt verður um frítøku eftir § 8 ella váttan eftir § 9, í fyrsta lagi at kanna, um talan er um avtalu, sum er fevnd av forboðnum í § 6, stk. 1. Vísir kanningin, at avtalan ikki er fevnd av § 6, og søkt er um váttan eftir § 9, verður váttan latin. Vísir kanningin, at avtalan er fevnd av § 6, verður kannað, um treytirnar fyri frítøku eftir § 8 eru loknar.

Til § 10
Í § 10 er ásett, at landsstýrismaðurin, eftir ummæli frá Kappingareftirlitinum, hevur heimild til at gera reglur um almenna frítøku frá forboðnum í § 6 fyri bólkar av avtalum, viðtøkum og samskipaðum, sum lúka treytirnar í § 8, stk. 1.

Bólkafrítøkur eru grundaðar á, at ávís sløg av kappingaravmarkandi avtalum hava við sær samfelagsbúskaparligar fyrimunir, ið eru størri enn teir vansar, sum kappingaravmarkingin hevur við sær.

Bólkafrítøkur av hesum slagi skulu ásetast eftir somu treytum, sum er galdandi fyri at fáa stakfrítøku eftir ásetingini í § 8, stk. 1. Talan kann í hesum sambandi vera um at áseta mørk, har avtalur o.tíl. undir eitt ávíst markvirði, kunnu verða undantiknar eftir nærri treytum.

§ 10, stk. 2
Kappingareftirlitið kann broyta ella seta úr gildi eina bólkafrítøku eftir § 10, um so er, at viðurskifti, ið høvdu avgerandi týdning fyri, at bólkafrítøkan varð givin, eru broytt. Í tílíkum førum verður ásett ein tillagingartíð fyri tær avtalur, ið vóru fevndar av upprunaligu bólkafrítøkuni. Við tí endamáli, at sleppast skal undan at landsstýrismaðurin tekur avgerð í einkultmálum viðvíkjandi ítøkiligum viðurskiftum hjá fyritøkum, verður skotið upp, at Kappingareftirlitið fær eina sjálvstøðuga heimild til, í ítøkiligum førum, at afturkalla eina bólkafrítøku.

At ein bólkafrítøka verður afturkallað merkir ikki, at avtalur o.tíl. hjá fyritøkunum verða ólógligar. Spurningurin, um avtala o.tíl. er ólóglig, veldst um ítøkiliga meting hjá Kappingareftirlitinum. Kappingareftirlitið kann taka serskilda avgerð um at afturkalla bólkafrítøku í sambandi við, at ítøkilig støða verður tikin til sameiningina við § 6 og møgulig boð eftir § 26. Avgerð hjá Kappingareftirlitinum um at afturkalla eina bólkafrítøku og møgulig boð eftir § 26 kunnu leggjast fyri Kærustovnin.

Til § 11

§ 11, stk. 1
Áseting er vend ímóti fyritøkum, ið hava eina ráðandi marknaðarstøðu. Áseting setir forboð fyri, at at marknaðarráðandi fyritøkur misnýta sína ráðandi støðu.

Tað er ikki í ósamsvari við § 11 at hava eina marknaðarráðandi støðu, hinvegin er áløgd ein serlig skylda á hesar fyritøkum um ikki við teirra framferð at avlaga kappingina á marknaðinum.

§ 11 er galdandi uttan mun til um ein, ella fleiri sjálvstøðugar fyritøkur í felag, misnýta sína ráðandi støðu. Hinvegin um tvær ella fleiri sjálvstøðugar fyritøku misnýta eina ráðandi støðu, og henda misnýtsla er úrslit av eini avtalu, viðtøku ella samskipaðari atferð, skal slík framferð viðgerast eftir § 6.

§ 11 er eisini galdandi í tí føri at ein almenn fyritøka misnýtir sína ráðandi støðu, uttan um til, um ráðandi støðan er úrslit av lógarásettum einarætti.

Ráðandi støða
Hugtakið ráðandi støða, skal altíð gerast ítøkiligt í mun til viðkomandi marknað. Við støði í skilmarkingini av viðkomandi marknað, sbrt. § 5, verður mett, hvørt ein ella fleiri fyritøkur hava eina ráðandi støðu á viðkomandi marknað.

Talan er um eina ráðandi støðu, tá ein fyritøka hevur eina so ráðandi búskaparliga støðu, at fyritøkan hevur møguleika at forða virknari kapping á marknaðinum, av tí at støðan gevur fyritøkuni møguleika fyri óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, viðskiftafólki og í síðstu atløgu brúkarunum.

Marknaðarparturin er eitt týdningarmikið metingarstøði, tá støða skal taka til, um talan er um ráðandi støðu. Marknaðarpartur er fyrsta ábendingin um støðuna á marknaðinum, men onnur viðurskifti so sum kappingarligt trýst, møguleiki fyri øktari kapping og bygnaðar- og atburðarlig viðurskifti eru eisini viðkomandi metingarstøði.

Er marknaðarparturin 25% ella lægri, er í flestu førum ikki nóg mikið at staðfesta eina ráðandi støðu. Við so avmarkaðum marknaðarparti er ein fyritøkan sjáldan før fyri at forða virknu kappingini á marknaðinum.

Marknaðarpartar millum 25% og 40% eru somuleiðis í flestu førum ikki nóg mikið til tess at staðfesta ráðandi støðu á viðkomandi marknaði, men aðrar marknaðarumstøður kunnu hava við sær, at fyritøka tó hevur eina ráðandi støðu.

Ein marknaðarpartur, ið er meiri enn 50 %, kann í sjálvum sær vera prógv um eina marknaðarráðandi støðu, serliga um kappingarneytarnir hava smáar marknaðarpartar.

Ein marknaðarráðandi støða er treytað av, at ráðandi støðan varir í eitt longri tíðarskeið og kann væntast at halda áfram yvir eitt longri tíðarskeið. Ein stórur marknaðarpartur í styttri tíðarskeið er vanliga ikki nóg mikið til tess at staðfesta eina marknaðarráðandi støðu.

Misnýtsla
Tað er ikki í ósamsvari við § 11 at hava eina marknaðarráðandi støðu. Tað er hinvegin misnýtslan av hesi ráðandi støðu, sum er ólóglig sambært § 11. § 11 skilmarkar ikki, hvat misnýtsla er, men forðar fyritøkum generelt at misnýta sína ráðandi støðu. Í § 11, stk. 3, nr. 1-4 verða nevnd dømi um, hvat ein misnýtslan kann vera. Talan er ikki um ein úttømandi lista. Ein framferð kann soleiðis verða í ósamsvari við § 11, hóast framferðin ikki er nevnd í § 11, stk. 3.

Ein ráðandi fyritøka kann misnýta sína støðu, um hon nýtir sína støðu til tess at nýta onnur amboð enn tey, sum eru vanlig í vanligari kapping. Ein ráðandi fyritøka hevur eina serliga skyldu við síni framferð ikki at skaða virknu kappingina.

Brot á § 11 verða vanliga bólkað sum útnyttandi og útihúsandi framferð.

Útnyttandi framferð er til dømis, tá ið ein ráðandi fyritøka tekur sær ov høgan vinning, soleiðis at prísurin á vøruni er órímiliga høgur í mun til búskaparliga virðið á vøruni og sammet við sambærligar vørur.

Útihýsandi framferð fevnir um meira enn bara at útihýsa einum kappingarneyta av marknaðinum. Ein framferð sum hevur til endamál ella avleiðing at avmarka ein kappingarneyta frá pørtum av marknaðinum er eisini útihýsandi framferð.

ES-rættarsiðvenjan í mun til skilmarkan av misnýtsluhugtakinum er vegleiðandi í mun til nýtslu av § 11 í kappingarlógini.

§ 11, stk. 2
Sambært ásetingini kunnu fyritøkur biðja Kappingareftirlitið um eina váttan um, hvørt fyritøkan hevur eina marknaðarráðandi støðu ella ikki. Váttanin hevur gildi til Kappingareftirlitið tekur váttanina aftur.

Hevur fyritøka sent áheitan sambært § 11, stk. 2, hevur Kappingareftirlitið skyldu at taka avgerð.

Ein váttan kann verða afturkallað, um t.d. fyritøkan tilætlað ella av grovum ósketni hevur latið skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tagt um upplýsingar av týdningi fyri eina avgerð sambært § 11, stk. 2. Slík brot kunnu revsast, sambært § 35, stk. 1, nr. 11.
Ein afturtøka kann eisini fremjast, um veruligu umstøðurnar eru broyttar ella at nýggjar upplýsingar eru komnar fram. Í slíkum førum skal Kappingareftirlitið taka eina nýggja avgerð sambært § 11, stk. 2 um, at fyritøkan nú hevur eina ráðandi støðu á marknaðinum.

Hevur ein fyritøka móttikið eina váttan sambært § 11, stk. 2, kann fyritøkuni ikki áleggjast sekt eftir § 35, stk. 1, um Kappingareftirlitið seinni velur at afturtaka váttanina. Hetta tí, at kravið um tilviltað ella av grovum ósketni ikki er lokið. Undantakið fyri hesa reglu er, um afturtøkan skyldast, at fyritøkan hevur latið skeivar ella villeiðandi upplýsingar av týdningi fyri um at gera váttanina av fyrstan tíð.

§ 11, stk. 3
§ 11, stk. 3 ásetir dømi um møgulig brot á § 11, stk. 1. Talan er um ikki ein úttømandi lista.

§ 11, stk. 3, nr. 1
Ásetingin fevnir um órímiliga høgar prísir, órímiliga lágar prísir, úrveljandi lágar prísir, avlopsklemmu (margin squeez) og eksklusivitets avsláttur.

Ein prísur er órímiliga høgur, um hann ikki stendur mát við virðið á viðkomandi vøru- ella tænastu. Í hesum sambandi skal kannast, um prísurin ella vinningurin, greitt er hægri enn hann vildi verið á einum marknað við virknari kapping. Tvær treytir mugu vera loknar fyri at staðfestast kann, um ein prísur er órímiliga høgur. Í fyrsta lagi, um munurin á kostnaðinum samanhildin við søluprísinum er ov høgur, og í øðrum lagi, um ásetti søluprísur antin er órímiligur í sær sjálvum ella órímiligur í mun til sambærligar vørur.

Lágir prísir, stórt úrval og høg góðska eru ynskilig endamál við fríari kapping, men í førum kann ein ráðandi fyritøka misnýta sína ráðandi støðu við at selja til lágar prísir í styttri tíðarskeið fyri á tann hátt at útihýsa kappingarneytar av marknaðinum ella pørtum av marknaðinum. Sokallað ránspríseting (predatory pricing) er skaðilig fyri kappingina, tí endamálið við henni er at avmarka kappingina fyri seinni at kunna áseta okursprís o.a.

Fyritreytin fyri, at talan er um ránsprísir, er, at lági prísurin ikki er íkomin orsakað av stórrakstrar virkisføri, men einans er treytaður av størri fíggjarligari styrki.

Ein ráðandi fyritøka nýtir úrveljandi lágar prísir, tá hon ásetir lægri prísir til útvaldar kundar við tí endamáli at útihýsa kappingarneytum frá marknaðinum, sbrt. 11, stk. 3, nr. 1.

Ein ráðandi fyritøka kann eisini misnýta sína ráðandi støðu við at nýta eina avlopsklemmu (margin squeez). Ein avlopsklemma er tilstaðar, tá ein ráðandi fyritøka er virkin á einum ovara og niðara søluliði og í hesum sambandi kann áseta høgar prísir á ovara søluliði, har hon t.d. hevur monopol, og lágar prísir á niðara søluliði, har hon er í kapping.

Ein ráðandi fyritøka kann eisini misnýta sína ráðandi støðu við at binda kundarnar soleiðis, at hesir skulu nøkta allan ella part av sínum tørvi hjá ráðandi fyritøkuni. Talan kann eisini vera um støður, har ráðandi fyritøkan gevur kundunum avsláttur, um hesir velja at savna sítt keyp hjá fyritøkuni. Sum meginregla verður ikki mett, at mongdaravsláttur hevur skaðilig árin á kappingina. Tað er ráðandi fyritøkan, sum skal prógva, at veittur mongdaravsláttur er kostnaðargrundaður. Annar avsláttur, sum tvingar kundarnar at nøkta allan ella bróðurpart av sínum tørvi hjá ráðandi fyritøkuni, er sum meginregla í ósamsvari við § 11, stk. 3 nr. 1.

§ 11, stk. 3, nr. 1 fevnir eisini um viðskiftatreytir, har ráðandi fyritøkan treytar sær, at seinni sølulið skal selja vøruna til ávísan prís ella við ávísum vinning. Forboðið fevnir um viðskiftatreytir, sum er vendar ímóti seinni søluliði, ella ávísari fyritøku.

§ 11, stk. 3, nr 2
Sum meginregla avgerð ein fyritøka sjálv, hvønn fyritøkan ynskir at handla við. Men í ávísum førum kann ein sýtan at selja vørur ella tænastur vera kappingaravlagandi. Tað er serliga í teimum førum, har kappingarneytar á einum niðara søluliði vera vinnuliga avmarkaðir, tí at ráðandi fyritøkan ikki vil selja vørur ella tænastur til teirra.

Veiturnarnoktan fevnir sum hugtak um meira enn ta støðu, har ein ráðandi fyritøka noktar ella steðgar við at lata eina vøru ella tænastu. Hugtakið fevnir eisini um støður, har tað verður noktað at geva atgongd til upplýsingar, loyvisnoktan og ella atgongd til kervi o.a.

Fýra teytir skulu vera loknar, áðrenn veitingarnoktan fyriliggur sambært § 11, stk. 3, nr. 2:

1) Ráðandi fyritøkan skal nokta at veita vøru- ella tænastu.
2) Talan skal vera um tveir ymiskar marknaðir.
3) Veitingarnoktanin skal fevna um vørur ella tænastur, sum eru neyðugar til tess fremja ávísa vinnu.
4) Veitingarnoktanin skal kunnu viðføra at kappingin á øðrum av marknaðunum verður útilokað.

§ 11, stk. 3, nr. 3
Ásetingin setir forboð fyri, at ráðandi fyritøkur fremja mismun mótvegis handilsfelagum. Hetta fer fram, tá handilsfelagir í somu støðu ikki fáa somu sømdir, og tá handisfelagar, sum ikki eru í somu støðu, fáa somu sømdir. Fyri at talan skal vera um mismun, skulu tvær treytir vera loknar. Í fyrsta lagi skal talan vera um veitingar av líknandi virði, sum verða veittar við ólíka treytum, og í øðrum lagi skal talan vera um, at handilsfelagar vera stillaðir verri í kappingini beinleiðis orskað av framda mismuninum.

§ 11, stk. 3, nr. 4
Ásetingin setir forboð fyri, at ein ráðandi fyritøka, sum hevur eina marknaðarráðandi støðu á marknaði fyri ávísa vøru, bindur sølu av hesari vøru við aðrar vøru.

1) Fýra kumulativar treytir skulu vera til staðar til tess at staðfestast kann misnýtsla eftir hesi áseting:
2) Fyritøkan skal vera ráðandi á marknaðinum fyri ávísu vøruna
3) Bundnu vørurnar skulu kunnu fráskiljast
4) Fyritøkan loyvir ikki at vørurnar verða keyptar hvør sær
5) Atgerðin hjá fyritøkuni skal vera egnað til at avmarka kappingina

§ 11, stk. 4
Ásetingin í § 11, stk. 4 gevur Kappingareftirlitinum, eftir kæru ella ex officio, heimild til at geva fyritøkum kravboð um at steðga atburði, ið er fevndur av stk. 1.

Í kravboðnum verður staðfest, at talan er um misnýtslu av ráðandi støðu, ið er bannað eftir § 11, stk. 1. Harumframt verður álagt fyritøkuni at steðga framferðini.

Eini kravboð kunnu verða givin beinanvegin, Kappingareftirlitið gerst varugt við, at ásetingin í stk. 1 er brotin.

Meginreglan er, at ein atburður skal steðga tann dagin, kravboðini verða givin. Í serligum førum kann Kappingareftirlitið áseta eina freist, tá ólógliga framferðin skal verða steðgað. Metast skal millum praktisku møguleikarnar hjá fyritøkuni, beinleiðis at steðga framferðini øðrumegin og hinvegin fyrilit fyri, at kappingin verður fingin í rættlag aftur, undir hesum serliga fyriliti til tær fyritøkur, ið beinleiðis eru raktar av kappingaravmarkingini.

.
Eini kravboð kunnu hava serligar treytir, eitt nú, at fyritøkan skal broyta sínar handilstreytir, at fyritøkan skal lata vørur ella tænastur til eina ávísa fyritøku eftir nærri treytum o.a. Lutfall má vera millum treytirnar, ið settar verða, og slagið av kappingaravmarkingini.

Kravboð sambært § 11, stk. 4, ið verða brotin, verða revsað við sekt eftir § 35, stk. 1 nr. 7. Harumframt kann áleggjast daglig ella vikulig sekt til tess at fáa fyritøku at gera eftir boðum sambært § 11, stk. 4, og sambært § 34, stk. 1.

§ 11, stk. 5
Sambært ásetingini kunnu fyritøkur biðja Kappingareftirlitið um eina váttan um, hvørt ávís atferð sambært teimum upplýsingum, sum Kappingareftirlitið hevur upplýsingar um, ikki kemur undir forboðið í § 11, stk. 1 og tað tí ikki er grundarlag at gera boð sambært § 11, stk. 4.

Ein váttan hevur gildi, til Kappingareftirlitið tekur váttanina aftur.

Hevur fyritøka sent áheitan sambært § 11, stk. 5, hevur Kappingareftirlitið skyldu at taka avgerð.

Ein váttan kann verða afturkallað, um t.d. fyritøkan tilætlað ella av grovum ósketni hevur latið skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tagt um upplýsingar av týdningi fyri eina avgerð sambært § 11, stk. 5.

Ein afturtøka kann eisini fremjast, um veruligu umstøðurnar eru broyttar ella at nýggjar upplýsingar eru komnar fram. Í slíkum førum skal Kappingareftirlitið taka eina nýggja avgerð sambært § 11, stk. 5, um at fyritøkan nú hevur eina ráðandi støðu á marknaðinum.

Hevur ein fyritøka móttikið eina váttan sambært § 11, stk. 5, kann fyritøkuni ikki áleggjast sekt eftir § 35, stk. 1, um Kappingareftirlitið seinni velur at taka váttanina aftur. Hetta tí, at kravið um tilætlað ella av grovum ósketni ikki er lokið. Undantakið fyri hesa reglu er, um afturtøkan skyldast, at fyritøkan hevur latið skeivar ella villleiðandi upplýsingar av týdningi fyri um at geva váttanina av fyrstan tíð.

Metir Kappingareftirlitið seg ikki kunna lata eina váttan sambært stk. 5, merkir hetta, at atferðin er í ósamsvari við § 11, stk. 1. Í tílíkum føri kann fyritøkan revsast við sekt sambært § 35, stk. 1, nr. 3.

§ 11, stk. 6
Ongin viðmerking er til ásetingina.

Til § 12
Eftir § 12 hevur Kappingareftirlitið heimild til at krevja, at kappingaravlagandi vinnustuðul, sum ikki er lógarheimilaður, skal steðgast. Heimilað verður eisini Kappingareftirlitinum at geva boð um, at veittur stuðul skal afturrindast. Stuðulin kann bæði vera beinleiðis, eitt nú sum fluttur stuðul, ella sum stuðlað lán ella óbeinleiðis, við eitt nú, at ein partur av útreiðslunum til tað stuðlaðu fyritøkuna, ella tað stuðlaða virksemið er stuðlað, eitt nú húsaleiga, útgerð og líknandi.

Boð kunnu gevast, um stuðulin beinleiðis ella óbeinleiðis hevur til endamáls ella sum avleiðing at avlaga kappingina á føroyska marknaðinum og ikki er lógligur sambært almennari regulering. Ásetingin í § 12 skal eins og aðrar ásetingar í kappingarlógini víkja frá aðrari almennari regulering. Sambært § 50, stk. 1 og 2 í kommunustýrislógini (Ll. nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, sum seinasta broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018) kann kommuna einans taka lut í vinnuligum virksemi, um so er, at virksemið tænir almannagagnligum endamáli og ikki hevur vinning fyri eyga. Víðari er ásett, at kommunan kann seta almenn tiltøk í verk, um so er, at hetta er til frama fyri vinnulívið á staðnum. Stuðul til einstaklingar ella einstakt virksemi má ikki latast, uttan so at serligar orsakir eru.

§ 12, stk. 1
Stuðul fevnir um bæði beinleiðis kontantan stuðul og um óbeinleiðis stuðul. Stuðulin fevnir um bæði fíggjarligar fyrimunur til ávísar vinnufyritøkur í mun til annað vinnuligt virksemi, ella framleiðslu á føroyska marknaðinum. Slíkir fyrimunir kunnu eitt nú vera rentulættar, veðhald og annar stuðul.

Krossstuðul frá einum øki til annað í einari fyritøku, ella í einari samtøku, kann vera fevndur av stuðulshugtakinum. Verða útreiðslur hjá einari fyritøku fjaldar til virksemi á einum marknaði við inntøku á øðrum marknaði, er talan um krossstuðul. Krossstuðul merkir ikki í sjálvum sær, at kappingin verður avlagað. Kappingin verður bert avlagað, um eitt øki uttan kapping stuðlar einum øki í kapping á ein slíkan hátt, sum ikki er í samsvari við marknaðarbúskaparligar íleggjarameginreglur. Talan er ikki um krossstuðul, um prísásetingin í sambandi við virksemi í kapping fer fram soleiðis, at prísurin dekkar útreiðslurnar, um so var, at virksemið í kapping var sundurskilt frá virkseminum uttan kapping.

Kappingarráðið kann geva boð viðvíkjandi stuðli, veittur tá boðið verður givið og boð viðvíkjandi stuðli, veittur frammanundan.

Talan er um veittan stuðul, tá stuðulin er goldin ella verður goldin til eina ella fleiri fyritøkur. Fyrningarfreistin uppá 5 ár sambært § 12, stk. 5, setir tó mark fyri, hvussu langt farast kann aftur í tíð, tá Kappingareftirlitið gevur boð eftir stk. 1.

Fyri at Kappingareftirlitið kann geva boð eftir § 12, stk. 1, skal stuðulin vera veittur til fyrimuns fyri ávísar vinnufyritøkur. At ein stuðul er til fyrimuns merkir, at stuðulin skal geva móttakaranum ein fíggjarligan fyrimun, sum móttakarin ikki vildi fingið undir vanligum marknaðarumstøðum.

Til tess at meta um, hvørt stuðulin er veittur eftir vanligum marknaðartreytum, kann Kappingareftirlitið nýta meginregluna um vinnuliga íleggjaran (markedsøkonomisk investorprincip). Hetta merkir, at Kappingareftirlitið skal kanna, um almenni myndugleikin, sum hevur veitt stuðulin, hevur virkað eftir somu búskaparligu parametrum, sum ein privatur íleggjari vildi nýtt, tá m.a. nýggjur partapeningur verður innskotin, ella tá lán verður veitt aðrari fyritøku. Í hesum sambandi verður samanbering gjørd av tí átaki, sum er sett í verk av einum almennum íleggjara, tá hesin fylgir ávísum búskaparligum málum, og tí framferðarhátti, sum ein privatur íleggjari vildi nýtt.

Stuðulin skal harumframt vera til ávísar vinnufyritøkur, sum merkir, at stuðulin er úrveljandi (selektivur).

Stuðulshugtakið verður tulkað í samsvari við ES-siðvenju.

§ 12, stk. 2, nr. 1
Treytirnar fyri, at Kappingareftirlitið kann geva boð eftir § 12, stk. 1 eru, at stuðulin beinleiðis ella óbeinleiðis hevur til endamáls at avlaga kappingina, og at stuðulin ikki er lógligur sambært almennari regulering. Báðar treytirnar skulu vera loknar.

Fyrsta treytin fyri, at Kappingareftirlitið kann geva boð eftir § 12, stk. 1 er, at stuðulin antin beinleiðis ella óbeinleiðis hevur til endamáls at avlaga kappingina á føroyska marknaðinum ella partar av marknaðinum. Hetta hevur við sær, at bæði stuðul, sum veruliga avlagar kappingina og stuðul, sum bert hevur til endamáls at avlaga kappingina, eru fevndir. Við øðrum øðrum er tað ikki ein treyt, at tað er farin ein kappingaravlaging fram, orsakað av stuðlinum.

Stuðul verður sum meginregla ikki mettur sum kappingaravlagandi, um stuðulin er veittur eftir útboði undir alment galdandi, ikki-diskriminerandi og gjøgnumskygdum treytum.

§ 12, stk. 2 nr. 2
Onnur treytir fyri at Kappingareftirlitið kann geva boð sambært stk. 1 er, at stuðul er lógligur sambært almennari regulering. Metingin eftir stk. 2, nr. 2 um stuðulin er lógligur sambært almennari regulering, verður gjørd av avvarðandi landsstýrismanni ella kommunalum eftirlitsmyndugleika.

§ 12, stk. 3
Ásett verður, hvør myndugleiki avgerð, hvørt veittur stuðul er lógligur sambært almennari regulering. Tá ið talan er um landsmyndugleika, er tað avvarðandi landsstýrismaðurin, sum ger metingina. Á kommunala økinum er tað kommunali eftirlitsmyndugleikin.

§ 12, stk. 4
Kappingareftirlitið kann geva boð um afturgjald av stuðli til privatar fyritøkur, sjálvsognarstovnar, almennar fyritøkur og stovnar.

§ 12, stk. 5
Fyrningarfreistin at geva boð sambært stk. 1 um, at almennur stuðul skal afturrindast er 5 ár eftir at stuðulin er latin. Freistin byrjar frá tí at stuðulin er útgoldin. Tað er uttan týdning fyri fyrningarfreistina um avgerðin um at veita stuðul er tikin, áðrenn stuðulin verður útgoldin.

Fyrningarfreistin kann verða sett úr gildi, um Kappingarráðið av egnum ávum ella vegna kæru tekur mál upp til viðgerðar og fram til ein møguliga avgerð hjá Kappingareftirlitinum fyriliggur. Kappingareftirlitið roknar rentu frá tí, at ólógligi stuðulin var til taks hjá stuðulsmóttakarum og til stuðulin er afturgoldin. Renta verður ásett sambært lov nr. 638 af 21. december 1977 om renter ved forsinket betaling, m.v (rentulógin).

§ 12, stk. 6

Kappingareftirlitið kann eftir áheitan vátta, at almennur stuðul eftir teimum viðurskiftum sum Kappingareftirlitið hevur kunnleika um, ikki er kappingaravlagandi. Almennir myndugleikar kunnu lata Kappingareftirlitinum áheitan, áðrenn ætlaður stuðul verður latin.

Ein váttan sambært stk. 6 hevur við sær, at boð ikki kunnu vera givin um at støðga og um at afturgjalda stuðulin. Avleiðingarnar av einari váttan eftir stk. 6 eru, at boð ikki seinni kunnu gevast, um Kappingareftirlitið broytir støðu viðvíkjandi somu viðurskiftum. Treytin er tó, at myndugleikin, tá fráboðaða áheitanin er latin Kappingareftirlitinum, ikki hevur latið skeivar ella villleiðandi upplýsingar.

Til § 13
Ásetingin allýsir samanleggingarhugtakið í kappingarlógini. Samanleggingarhugtakið fevnir um veruligar samanleggingar, samanleggingar í fluttari merking, virkisyvirtøkur og samanleggingar, og harumframt stovnan av einum samváða (joint venture), sum á varandi grundarlagi hevur um hendur allar funktiónir eins og hjá eini sjálvstøðugari fyritøku.

Samanleggingarhugtakið í føroysku kappingarlógini verður tulkað í samsvari við allýsingina í ES fyriskipan nr. 139/2004 um eftirlit við miðsavnan. Tær vegleiðingar, sum ES-kommissiónin hevur latið gera í tilknýti til áðurnevndu fyriskipan, eru eisini ískoyti til tulking av § 13 í kappingarlógini.

Endamálið við samanleggingareftirlitinum er at hava umsjón við tiltøkum, sum varandi broyta bygnaðin á einum marknaði, og møguliga at forbjóða teimum tiltøkum, sum føra til, at kappingin verður avmarkað.

Bygnaðurin á einum marknaði kann broytast varandi, um tvær ella fleiri sjálvstøðugar fyritøkur halda uppat at virka sum sjálvstøðugar eindir, ella tá fyritøkur missa sítt sjálvræði í sambandi við, at ein onnur fyritøku á varandi grundarlagi tekur ræði á teimum.

Samanleggingar, sum fara fram innanhýsis í eini samtøku, eru ikki fevndar av ásetingini, tí talan er um fyritøkur, sum ikki eru sjálvstøðugar, og sum tí ikki missa sítt sjálvræði. Innanhýsis samanlegging er, tá ið fyritøkurnar, sum eru partar av samanleggingini, longu eru undir ræði av sama persóni ella fyritøku, t.d. um eitt dótturfelag verður lagt saman við sínum móðurfelagi.

§ 13, stk. 1, nr. 1
Orðingin í § 13, stk. 1, nr. 1 samsvarar við art. 3, stk. 1, litra a í ES-fráboðan nr. 139/2004 og verður tulkað í samsvari við hesa. ES-kommissiónin hevur í sambandi við áðurnevndu fráboðan latið úr hondum ES-vegleiðing 2008/C 95/01 frá 16. apríl 2008: Samanskrivaða vegleiðing um jurisdiktión í sambandi við fráboðan nr. 139/2004. Henda vegleiðing verður vegleiðandi fyri, hvussu Kappingarráðið tulkar § 13, stk. 1, nr. 1

Sambært ásetingini er talan um samanlegging eftir § 13, stk. 1, nr. 1, tá ið tvær ella fleiri sjálvstøðugar fyritøkur verða lagdar saman til eina nýggja fyritøku. Hetta merkir, at samanløgdu fyritøkurnar hvørva sum sjálvstøðugar løgfrøðiligar eindir. Tílík samanlegging verður nevnd verulig samanlegging. Ásetingin fevnir eisini um samanlegging í fluttari merking, har ein fyritøka uttan beinleiðis avtøku verður upploys við, at allar ognir og skyldur verða yvirtiknar av aðrari fyritøku.

Tá sjálvstøðugar fyritøkur leggja sítt virksemi saman, uttan at tær tó í einum løgfrøðiligum týdningi leggja saman, kann talan vera um eina samanlegging eftir stk. 1, nr. 1. Avgerandi fyri, um talan er um samanlegging í slíkum føri, er, um ein serstøk búskaparlig eind verður skapað. Hetta kann vera støðan, um t.d. tvær ella fleiri fyritøkur, hóast tær halda fram sum sjálvstøðugar fyritøkur, avtala at hava eina felags leiðslu. Við hesum verður ein felags búskaparlig eind skapað, ein sokallað horisontal samtøka, og tí er talan um eina transaktión, sum er fevnd av § 13, stk. 1, nr. 1.

Ein fortreyt fyri, at talan er um eina felags búskaparliga eind, er, at hon hevur eina felags og fasta leiðslu. Onnur viðkomandi viðurskifti, sum kunnu stuðla undir, at talan er um eina felags búskaparliga eind eru, um yvirskot og undirskot verða útjavnað innanhýsis millum fyritøkurnar, og um tær hefta í felag. Harumframt kann krosseigaraskapur millum fyritøkurnar stuðla undir, at talan er um eina de facto samanlegging.

Tað er vanliga ikki nakar trupulleiki at staðfesta, um talan er um eina veruliga samanlegging, sum er fevnd av § 13, stk. 1, nr. 1. Hinvegin kann tað vera torførari at staðfesta, um ein transaktión er ein samanlegging í fluttari merking ella ein de facto samanlegging. Her er tað avgerandi, hvussu ræðisviðurskiftini eru í fyritøkunum. Í hesum sambandi verður víst til stk. 3.

§ 13, stk. 1, nr. 2
Sambært ásetingini er talan um samanlegging, tá ið ein ella fleiri persónar ella fyritøkur, sum longu hava ræði á minst einari fyritøku, fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á allari ella pørtum av eini ella fleiri fyritøkum.

Almennir stovnar koma undir hugtakið, fyritøka.

Talan er bara um eina samanlegging, um ræðisrætturin verður varandi broyttur. Tá samtøkur fremja eina innanhýsis umskipan, t.d. við at tvey dótturfeløg verða løgd saman, er ikki talan um samanlegging eftir kappingarlógini. Somuleiðis er vanliga ikki talan um samanlegging, um ein fyritøka, sum longu hevur 80 prosent av atkvøðunum í einari aðrari fyritøku, yvirtekur tey írestandi 20 prosentini av atkvøðunum, av tí at fyritøkan, sum tekur yvir tey 20 prosentini, frammanundan hevur fult ræði.

Ein serlig støða kann vera, tá ið bæði tann yvirtikna fyritøkan og tann yvirtakandi fyritøkan eru ogn hjá sama almenna stovni. Hvørt talan tá er um eina samanlegging eftir § 13, stk. 1, nr. 2, ella um talan er um eina innanhýsis umskipan, verður avgjørt eftir, um fyritøkurnar frammanundan vóru partar av somu búskaparligu eind. Vóru fyritøkurnar frammanundan yvirtøkuna partar av hvør sínari búskaparligu eind við egnum sjálvsavgerðarrætti, verður yvirtøkan at meta sum ein samanlegging og ikki sum ein innanhýsis umskipan. Hoyra fyritøkurnar hinvegin til t.d. sama almenna holdingfelag, hava tær sjáldan ein sjálvstøðugan avgerðarrætt.

Tá ið avgerð skal takast um, hvørt talan er um samanlegging eftir § 13, stk. 1, nr. 2, eru ræðisviðurskiftini í fyritøkunum avgerandi fyri, um talan er um eina samanlegging. Í hesum sambandi verður víst til stk. 3.

Orðingin í § 13, stk. 1, nr. 2 samsvarar við art. 3, stk. 1, litra b í ES-fráboðan nr. 139/2004 og verður tulkað í samsvari við hesa.

§ 13, stk. 2
Afturat teimum í § 13, stk. 1, nr. 1 og 2 nevndu tiltøkum er eisini eftir § 13, stk. 2 talan um eina samanlegging eftir kappingarlógini, tá ið ein samváði verður settur á stovn, sum hevur um hendur allar funktiónir hjá eini sjálvstøðugari fyritøku.

Orðingin í § 13, stk. 1, nr. 1 samsvarar við art. 3, stk. 4 í ES-fráboðan nr. 139/2004 og verður tulkað í samsvari við hesa. Vegleiðingin til fráboðan 139/2004 verður vegleiðandi fyri, hvussu Kappingarráðið tulkar § 13, stk. 2.

Tríggjar treytir skulu vera loknar, áðrenn ein samváði er fevndur av samanleggingarhugtakinum

Fyrsta treyt
Fyrsta treytin er, at tvær ella fleiri fyritøkur hava ræði í felag, t.e. at talan skal vera um felagsræði. Fortreytin fyri, at talan er um felagsræði, er, at allar fyritøkurnar hava møguleika at hava avgerandi ávirkan á samváðan.

Hugtakið, felagsræði, verður lýst nærri í viðmerkingunum til stk. 3.

Onnur treyt
Onnur treytin er, at samváðin skal hava um hendur allar funktiónir hjá eini sjálvstøðugari fyritøku. Hetta merkir, at samváðin skal hava virksemi á einum marknaði, og í hesum sambandi røkja allar tær rakstraruppgávur, sum aðrar fyritøkur á sama marknaði vanliga røkja. Fyri at ein samváði kann sigast at røkja allar vanligar rakstraruppgávur, skal hann hava eina leiðslu, sum tekur sær av dagligu leiðsluni, og hava atgongd til nøktandi tilfeingi. Hetta merkir, at stovnararnir skulu lata samváðanum tað tilfeingið, sum er neyðugt fyri at reka handilsligt virksemi á einum varandi grundarlagi, t.e. nøktandi fígging og starvsfólk, eins og materiellar og ómateriellar ognir.

Ein samváði er ikki sjálvstøðugur, um hesin einans yvirtekur eina ávísa rakstraruppgávu frá einum av stovnarunum, uttan harvið at fáa atgongd til ein marknað. Hetta er t.d. støðan, tá ið samváðin einans hevur gransking og menning ella framleiðslu um hendi. Grundarlagið undir tílíkum samváða er at hava um hendur eina ávísa rakstraruppgávu hjá stovnarunum. Sama er galdandi, um samváðin einans tekur sær av sølu og útbreiðslu av vørunum hjá stovnarunum. Í tílíkum førum er samváðin meira líkur einum umboðssøluvirki, t.e. agenturvirksemi.

Samváðin kann nýta sølu- og útbreiðslunet hjá stovnarunum, uttan at tað merkir, at hesin ikki er sjálvstøðugur. Kravið er tó, at stovnararnir einans virka sum umboðssøluvirkir fyri samváðan.

Samváðin kann í byrjanini vera óbeinleiðis bundin til einans at selja ella keypa frá stovnarunum, tí tað kann taka tíð, áðrenn samváðin fær fastatøkur á marknaðinum. Slíkt byrjunartíðarskeið fer ikki í sær sjálvum at gera, at mett verður, at talan ikki er um sjálvstøðugan samváða.

Sambært siðvenju hjá ES-kommissiónini eigur byrjanartíðarskeið ikki at vera longri enn trý ár. Kappingarráðið fer í síni meting av, hvussu langt slíkt byrjanartíðarskeið eigur at vera, at leggja seg uppat siðvenjuni hjá ES-kommissiónini.

Er ætlanin hinvegin, at samváðin skal selja til stovnararnar í eitt longri tíðarskeið, er tað av týdningi, um samváðin, uttan mun til søluna til stovnararnar, verður virkin á marknaðinum annars. Avgerandi í hesum sambandi er, hvussu stórur partur av samlaða umsetninginum hjá samváðanum stavar frá sølu til stovnararnar, og um selt verður eftir vanligum handilstreytum.

Tá ið umræður veitingar frá teimum fyritøkunum, ið stovna nevnda samváðan, kann ivi serliga vera um, hvørt umrøddi samváðin kann metast at vera ein sjálvstøðug virkandi fyritøka, um ikki samváðin sjálvur í ávísan mun virðisøkir umrøddu vørurnar ella tænasturnar. Í slíkum førum skal umrøddi samváðin heldur metast at vera eitt felags umboðssøluvirki.

Hinvegin fer samváði, sum hevur virksemi á einum marknaði, og sum hevur tær rakstraruppgávur um hendur, sum fyritøkur á sama marknaði vanliga hava um hendur, vanliga ikki einans at virka sum eitt umboðssøluvirki fyri stovnararnar, men heldur sum ein sjálvstøðug fyritøka. Hetta er treytað av, at samváðin ræður yvir neyðugum hentleikum og hevur møguleika at fáa veitingar frá øðrum enn stovnarunum.

Triðja treyt
Triðja treytin er, at samváðin skal verða stovnaður við tí ætlan at virka á einum varandi grundarlagi. Henda treytin er vanliga lokin, um stovnararnir lata samváðanum tað neyðuga tilfeingið.

Í eini samváðaavtalu er hædd vanliga tikin fyri tí støðu, at ætlanin ikki heldur, ella at ósemjur standast, og ásetingar kunnu eitt nú vera um upploysn av samstarvinum, ella um undir hvørjum umstøðum stovnararnir kunnu taka seg burtur úr samstarvinum.

Tílíkar ásetingar merkja ikki, at stovnanin ikki er á einum varandi grundarlagi. Áseting kann somuleiðis vera um, at samváðin einans skal virka í eitt ávíst tíðarskeið. Í slíkum føri er treytin um stovnan á varandi grundarlagi lokin, um í fyrsta lagi hetta tíðarskeiðið er nóg langt til, at bygnaðurin hjá stovnarunum verður varandi broyttur, ella í øðrum lagi, um ásett er, at samváðin kann halda áfram eftir, at ásetta tíðarskeiðið er útgingið.

Hinvegin er stovnanin ikki á einum varandi grundarlagi, um samváðin er settur á stovn fyri eitt stutt, avmarkað tíðarskeið, eitt nú um samváðin verður settur á stovn fyri at fremja ávísa verkætlan, t.d. at lata eina framleiðslueind gera, men har samváðin ikki fer at hava um hendur raksturin av eindini.

Eftir siðvenjuni hjá ES-kommissiónini er eitt tíðarskeið upp á hálvtsjeynda ár vanliga nóg mikið til at staðfesta, at samváðin er stovnaður á varandi grundarlagi. Hinvegin vísir siðvenjan hjá ES-kommissiónini, at eitt tíðarskeið upp á trý ár ikki er nóg mikið til at staðfesta, at samváðin er stovnaður á varandi grundarlagi.

Stovnan av einum samváða eftir § 13, stk. 2, kann beinleiðis føra til eina samskipan av kappingarliga atburðinum hjá stovnarunum, sbrt. § 15, stk. 3.

Samváðar eftir § 13, stk. 2, sum ikki røkka umsetningsmørkunum í § 13, stk. 1, nr. 1-2 eru ikki fevndir av reglunum um samanleggingar. Viðurskiftini viðvíkjandi samskipan kunnu í slíkum

føri verða kannað eftir § 6 um forboð fyri kappingaravlagandi avtalum, eins og frítøka eftir § 8, stk. 1 kann søkjast.

Verður mett, at samváðin ikki er stovnaður á einum varandi grundarlagi, er avleiðingin, at talan ikki er um eina samanlegging eftir § 13, stk. 2.

Kappingareftirlitið fer í tílíkum føri at kanna, um samváðaavtalan og møguligar aðrar atknýttar avmarkingar koma undir forboðið í § 6, stk. 1 í kappingarlógini. Henda mannagongd er í samsvari við siðvenju hjá ES-kommissiónini.

§ 13, stk. 3
Samanleggingarhugtakið í kappingarrættinum fevnir um øll tiltøk, sum føra til eina varandi broyting av ræðisrættinum á luttakandi fyritøkum og við hesum eina varandi broyting av marknaðarbygnaðinum.

Ræðishugtakið, sum verður allýst í § 13, stk. 3, er tí grundleggjandi fyri, hvørji tiltøk verða skilmarkað sum samanleggingar, og hvørji fella uttanfyri.

Orðingin í § 13, stk. 3, samsvarar við art. 3, stk. 3 í ES-fráboðan nr. 139/2004 frá 20. januar 2004 og verður tulkað í samsvari við ES-siðvenjuna á økinum. Fráboðanin, vegleiðingin og ES-siðvenja annars vera vegleiðandi fyri, hvussu Kappingareftirlitið tulkar § 13, stk. 3.

Eftir hesi siðvenju fæst ræði á eini fyritøku gjøgnum ognar- ella brúksrætt yvir fænum hjá fyritøkuni ella pørtum av fænum, ella um rættindi verða útvegað, ið geva avgerandi ávirkan á, hvussu leiðslueindir verða settar saman, teirra atkvøðugreiðslur ella avgerðir.

Ræði á rættarligum grundarlagi
Ræði kann fáast á rættarligum grundarlagi. Hetta er m.a. støðan, tá ein fyritøka við keypi av partabrøvum fær meirilutan av atkvøðunum í einari aðrari fyritøku. Hóast ein fyritøka við keypi av partabrøvum ikki fær meirilutan av atkvøðunum, kann hon framvegis hava fingið avgerandi ávirkan á eina aðra fyritøku. Hetta kann m.a. verða støðan, um tað sambært viðtøkunum hjá fyritøkuni, hvørs partabrøv verða keypt, eru ávís partabrøv, ið hava fleiri atkvøður. Somuleiðis kunnu vera ásetingar í viðtøkunum, sum geva minnilutapartaeigarum størri vald, enn galdandi vinnulóggávan gevur teimum. Tað er m.a. støðan, um tað í viðtøkunum er krav um serligan meiriluta í sambandi við avgerðir av stórum handilsligum týdningi.

Ein partaeigaraavtala kann saman við eini minnilutapartabrævaogn geva einum ella fleiri eigarum ræði á fyritøkuni. Hetta kann m.a. verða støðan, um avtalað er felags útinnan av atkvøðurætti ella felags útinnan at rætti til at velja nevndar- ella stjórnarlimir.

Ræði við støði í veruligu viðurskiftunum
Ræði á eini fyritøku kann eisini staðfestast við støði í eini meting av teimum veruligu viðurskiftunum, undir hesum teimum búskaparligum sambondunum. Búskaparligur bundinskapur, t.d. ein sera víðfevnd langtíðaravtala um veiting ella lán, latin av veitara ella kunda, saman við øðrum sambondum, kann hava við sær, at tað hendingaferð kann sigast, at ræði er fingið á fyritøkuni.

Tað er ongin treyt, at ræðið verður útint, t.e. at møguleikin fyri avgerandi ávirkan verður nýttur. Ásetingin er galdandi, um møguleikin fyri avgerandi ávirkan er til staðar.

Í ávísum førum kann skilnaður vera millum handhava av ráðandi partabrævaogn og tann, sum hevur rættin at útinna tey rættindi, sum partabrævaognin gevur. Í tílíkum førum verður ræðið mett at vera hjá tí, sum í veruleikanum hevur staðið fyri yvirtøkuni, og sum hevur veruliga ræðið á fyritøkuni.

Einaræði og felagsræði
Sambært § 13, stk. 1, nr. 2 kann annaðhvørt ein persónur ella ein fyritøka fáa ræði á eini aðrari fyritøku. Hetta verður nevnt einaræði. Er talan um, at fleiri persónar ella fyritøkur í felag fáa ræði á einari fyritøku er talan um felagsræði.

Einræði á fyritøku fæst vanliga við keypi av partabrævaogn, ið gevur meirilutan av atkvøðunum á aðalfundinum hjá eini fyritøku. Tað er sjálv yvirtøkan av atkvøðurættindunum, sum hevur týdning fyri, um møguleiki er fyri, at avgerandi ávirkan á raksturin í eini fyritøku er fingin. Vanliga hevur tað ikki týdning, um 51 prosent ella 100 prosent av atkvøðurættindunum eru yvirtikin.

Felagsræði er fingið, um tveir ella fleiri persónar ella tvær ella fleiri fyritøkur hava fingið møguleika fyri avgerandi ávirkan á raksturin í eini fyritøku. Avgerandi fyri, um felagsræði er millum tveir ella fleiri partar, er, um partarnir hvør sær kunnu forða hinum í at samtykkja avgerðir av týdningi. Er hetta støðan, eru partarnir sínámillum sambundnir og noyðast tí at semjast um ein felags leist at útinna ræðið eftir.

Tey viðurskifti, sum kunnu benda á, at felagsræði er millum fyritøkur, eru m.a. um atkvøðurættindini ella rættindini at velja nevndar- ella stjórnarlimir, vetorættur ella felags útinnan av atkvøðum eru javnt býtt partanna millum.

§ 13, stk. 4
Í tveimum førum verður yvirtøka av ræði ikki at meta sum ein samanlegging eftir hesum uppskoti, og hesi føri eru tí undantikin frá fráboðanarskylduni í § 16, stk. 1.

Sambært § 13, stk. 4, nr. 1 er ikki talan um samanlegging, um fyritøkur, hvørs vanliga virksemi fevnir um handil við virðisbrøvum fyri egna ella fremmanda rokning, ogna sær partar í øðrum fyritøkum í sambandi við sítt virksemi, og einans hava hesar partar sum ogn í eitt stutt tíðarskeið.

Treytirnar fyri undantøku eftir § 13, stk. 4, nr. 1:

1) Undantøkan er einans galdandi fyri peningastovnar, tryggingarfyritøkur ella aðrar fíggjarligar fyritøkur, ið vanliga hava slíkt virksemi um hendi.
2) Virðisbrøvini skulu verða útvegað við víðarisølu fyri eyga. Hetta merkir, at peningastovnurin o.tíl., sum hevur ognað sær partabrøvini, ikki má útinna sínar atkvøður ella einans má útinna hesar við tí endamáli at fyrireika eina samlaða ella partvísa sølu av fyritøkuni, ella ognum ella virðisbrøvum tess.
3) At enda skal peningastovnurin ella tílíkt, innan eitt ár er liðið, hava minkað sína partabrævaogn so mikið, at hann ikki hevur ræðið á fyritøkuni longur.

Sambært § 13, stk. 4, nr. 2 er ikki talan um samanlegging eftir hesi lóg, tá ein persónur, sum sambært lov nr. 444 af 28. august 1984 om konkurs, som sat i kraft ved kongelig anordning nr. 183 af 15. marts 1989, hevur fingið ræði á eini fyritøku. Persónur sambært § 13, stk. 4, nr. 2 er vanliga ein bústjóri í einum trotabúgvi.

Undantøkini í § 13, stk. 4, nr. 1-2 eru vanliga ikki galdandi fyri royndir hjá peningastovnum o.tíl. at endurskipa fyritøkur. Hóast slík endurskipan ofta hevur til endamáls at víðariselja fyritøkuna, verður undantaksreglan í § 13, stk. 4, nr. 1 aloftast ikki lokin. Orsøkin til hetta er, at endurskipan vanliga krevur, at ræðið verður brúkt til at áseta leistin, ið fyritøkan skal rekast eftir frameftir.

Somuleiðis verður tað torført at fremja eina endurskipan av eini fyritøku og selja hana, innan eitt ár er liðið.

Til § 14

§ 14, stk. 1
Í ásetingini eru ásettar treytir um, hvussu stóran umsetning fyritøkurnar skulu hava, áðrenn ein samanlegging kemur undir fráboðanarskyldu. Endamálið við hesi áseting er, at einans fyritøkur við eini ávísari búskaparligari styrki skulu kannast av kappingarmyndugleikanum.

Treytin um, at einans fyritøkur við ávísari búskaparligari styrki skulu kannast, verður framd við at seta mørk við støði í umsetninginum hjá fyritøkunum. Við at nýta umsetningsmørk verður ein sera einføld avmarking gjørd fyri, nær ein samanlegging skal fráboðast Kappingareftirlitinum.

Umsetningurin hjá luttakandi fyritøku fevnir um egnan umsetning og umsetningin hjá øllum fyritøkum, sum eru í sama samtaki. Hetta merkir, at sum meginregla verður støðið tikið í samtaksumsetninginum hjá luttakandi fyritøkunum. Tó verður innanhýsis søla frádrigin.

Umsetningur eftir § 14, stk. 1, nr. 1 og 2 er at skilja sum nettoumsetningur eftir § 7, stk. 3, nr. 2 í Anordning nr. 1355 frá 9 december 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven. Nærri útgreinan av, hvussu umsetningurin verður gjørdur upp, er ásett í kunngerð nr. 9 frá 11. mars 2008 um útrokning av umsetningi í kappingarlógini.

Í § 14 stk. 1, nr. 1 og 2 eru ásett umsetningsmørk fyri, nær samanleggingar eru fevndar av fráboðanarskylduni í kappingarlógini. Í stk. 1, nr. 1 eru treytir fyri, nær innanlands samanleggingar eru fevndar av lógini, og í stk. 1, nr. 2 eru treytir fyri, nær samanleggingar millum útlendskar fyritøkur og føroyskar fyritøkur eru fevndar av lógini.

Samanleggingar innanlands
Samanlegging er fevnd av stk. 1, nr. 1, um luttakandi fyritøkurnar tilsamans hava ein umsetning upp á í minsta lagi 75 mió. kr. í Føroyum, og um minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein umsetning upp á í minsta lagi 15 mió. kr. í Føroyum.

Bæði umsetningsmørkini skulu vera rokkin, áðrenn samanleggingin er fevnd av fráboðanarskylduni.

Ein samanlegging millum tríggjar fyritøkur, har samlaði umsetningurin er oman fyri 75 mió. kr., men har einans ein av fyritøkunum hevur ein umsetning oman fyri 15 mió. kr., ikki verður fevnd av fráboðanarskylduni. Somuleiðis verður ein samanlegging millum tvær fyritøkur, sum hvør sær hava 15 mió. kr. í umsetningi, ikki fevnd av fráboðanarskylduni.

Samanlegging tvørtur um landamark
Eftir stk. 1, nr. 2 er ein samanlegging fevnd av fráboðanarskylduni, um minst ein av luttakandi fyritøkunum hevur ein umsetning upp á 75 mió. kr. í Føroyum, og minst ein onnur fyritøku hevur ein umsetning upp á 75 mió. kr. á heimsstigi.

Ætlanin við hesi áseting er, at samanleggingar millum størri føroyskar fyritøkur og útlendskar fyritøkur koma undir fráboðanarskylduna. Mett verður, at tað er rætt, at kappingarmyndugleikin hevur eitt ávíst eftirlit við slíkum samanleggingum.

Í ávísum førum kunnu tílíkar samanleggingar, har einans ein av luttakandi fyritøkunum hevur umsetning í Føroyum, hava neiliga ávirkan á kappingina í Føroyum, t.d. um ein stór føroysk fyritøka yvirtekur eina útlendska fyritøku, sum ynskir at koma á føroyska marknaðin, ella um ein stór fyritøka, sum umvegis føroyska umboðan hevur umsetning í Føroyum, velur at keypa ein føroyskan kappingarneyta. Møguleiki er fyri, at tílík samanlegging kann hindra virknari kapping í Føroyum.

Mett verður tó, at samanleggingar millum føroyskar og útlendskar fyritøkur vanliga fara at styrkja kappingina í Føroyum. Tí er eisini avgjørt, at samanleggingar, sum koma undir stk. 1, nr. 2, skulu kunna fráboðast eftir einføldum leisti. Heimild til hetta verður ásett í reglugerðini um fráboðan av samanleggingum.

Luttakandi fyritøkur
Í § 14, stk. 1, eins og í øðrum lógarásetingum, verður hugtakið *luttakandi fyritøkur* nýtt. Hetta hugtak verður tulkað í samsvari við siðvenjuna hjá ES-kommissiónini, sum m.a. verður nærri útgreinað í vegleiðingini til fráboðan nr. 139/2004.

Í sambandi við eina samanlegging av fleiri sjálvstøðugum fyritøkum til eina nýggja fyritøku fevna luttakandi fyritøkur um tær fyritøkur, sum leggja saman. Hetta merkir, at tað er samtaksumsetningurin hjá samanløgdu fyritøkunum, sum støðið skal takast í, tá metast skal um, hvørt umsetningsmørkini eru rokkin. Eftir § 14, stk. 1, nr. 1 er tað umsetningurin í Føroyum, meðan tað eftir § 14, stk.1, nr. 2 er umsetningurin bæði í Føroyum og á heimsstigi.

Tá talan er um yvirtøku, skal skilnaður gerast millum einaræði og felagsræði. Í sambandi við yvirtøku av einaræði í fyritøku eru luttakandi fyritøkurnar tann fyritøkan, sum yvirtekur, og tann fyritøkan, sum verður yvirtikin.

Verður einræði fingið á einum parti av aðrari fyritøku, er tað umsetningurin hjá tí yvirtakandi fyritøkuni og umsetningurin frá tí parti, sum verður yvirtikin, sum skal íroknast, sbrt. § 14, stk. 2. Hetta er tó ikki galdandi, um talan er um eina stigvísa yvirtøku av fyritøku, sbrt. § 14, stk. 3.

Verður einræði fingið umvegis eitt dótturfelag í eini samtøku, er dótturfelagið at meta sum luttakandi fyritøka, men umsetningurin hjá allari samtøkuni skal roknast við.

Verður felagsræði fingið á fyritøku, sum er nýstovnað, eru luttakandi fyritøkurnar tær yvirtakandi fyritøkurnar, meðan nýstovnaða fyritøkan ikki er at meta sum luttakandi fyritøka, tí hon hevur ongan umsetning.

Verður felagsræði fingið á eini verandi fyritøku, eru luttakandi fyritøkurnar tær, sum fáa felagsræðið, og fyritøkan, sum verður yvirtikin. Hevur fyritøka einaræði á aðrari fyritøku, har ein ella fleiri nýggjar fyritøkur fáa felagsræðið saman við fyritøkuni, sum hevði einaræði, eru luttakandi fyritøkurnar hvør einstøk av teimum fyritøkunum, sum hava felagsræði, undir hesum fyritøkan, sum hevði einaræði. Fyritøkan, sum er undir felagsræði, er ikki ein av luttakandi fyritøkunum.

Verður farið frá felagsræði til einaræði, eru luttakandi fyritøkurnar tann eftirverandi fyritøkan og fyritøkan undir einaræði. Fyritøkur, sum avhenda sítt ræði, eru ikki at meta sum luttakandi fyritøkur.

Fer fram broyting í eigaraskapinum á fyritøkum, sum hava felagsræði á aðrari fyritøku, og slík broyting er at meta sum ein samanlegging eftir hesum uppskoti, eru luttakandi fyritøkurnar bæði verandi og nýggar fyritøkur, sum útinna felagsræði, og fyritøkan undir felagsræði.

Fær privatpersónur ræði á eini fyritøku, er talan um eina samanlegging, um hesin sjálvur hevur annað búskaparligt virksemi um hendi, t.e. um hesin hevur einræði ella felagsræði á einari aðrari fyritøku. Í tílíkum føri eru luttakandi fyritøkurnar keyparin sjálvur og fyritøkan, sum ræðið fæst á. Tá støða skal takast til, um umsetningsmørkini í § 14, stk. 1, nr. 1 ella 2 eru rokkin, skal umsetningurin hjá teimum fyritøkum, sum keyparin hevði ræðið á undan yvirtøkuni, leggjast saman við umsetninginum hjá fyritøkuni, sum keyparin hevur fingið ræðið á.

§ 14, stk. 2
Tá ið bert ein partur av eini ella fleiri fyritøkum verður yvirtiknin, skal einans tann parturin, sum verður yvirtikin, takast við, tá metast skal um, hvørt umsetningsmørkini er rokkin. Hetta merkir, at verður eitt dótturfelag yvirtikið, skal einans umsetningurin hjá hesum takast við, meðan restin av samtakinum skal ikki íroknast. Sama er galdandi, um talan er um yvirtøku av ognum. Í tílíkum føri skal bara tann umsetningur takast við, sum hevur tilknýti til yvirtiknu ognirnar.

§ 14, stk. 3
Sambært ásetingini skulu tvær ella fleiri yvirtøkur sbrt. § 12, stk. 2, millum somu persónar ella fyritøkur, og sum eru farnar fram í einum tvey ára tíðarskeiði, metast sum ein samanlegging, sum verður framd, tá seinasta yvirtøkan fer fram.

Ásetingin skal tryggja, at ikki kann sleppast undan fráboðanarskylduni við eini stigvísari yvirtøku av pørtum av eini fyritøku. Við hesi áseting fer ein stigvís yvirtøka at føra til fráboðanarskyldu, um umsetningsmørkini yvir eitt tvey ára tíðarskeið verða rokkin.

§ 14, stk. 4
Við ásetingini verður heimilað landstýrismanninum í kunngerð at áseta reglur um, hvussu umsetningurin verður roknaður eftir § 14.

Til § 15

§ 15, stk. 1
Ásetingin heimilar Kappingareftirlitinum at góðkenna, at treyta eina góðkenning ella at forbjóða eini samanlegging.

§ 15, stk. 2
Ásett verða metingarstøði fyri, nær ein samanlegging skal góðkennast ella forbjóðast.

Kannast skal eftir, um ein samanlegging førir til, at kappingin verður skerd, av tí at ein marknaðarráðandi støða verður skapað ella styrkist. Kemur Kappingareftirlitið til ta niðurstøðu, at virkna kappingin verður skerd, er álagt Kappingareftirlitinum at forbjóða samanleggingini, sbr. § 15, stk. 1. Í hesum sambandi skal vísast á, at sambært § 15, stk. 1 kann Kappingareftirlitið treyta góðkenningina av eini samanlegging. Við at treyta eina samanlegging kann Kappingareftirlitið tryggja sær, at ein samanlegging, sum annars hevði hindrað kappingini, ikki hevur hesa avleiðing, og tí kann góðkennast. § 15, stk. 2, 2. pkt. áleggur Kappingareftirlitinum at góðkenna samanleggingar, sum ikki hindra virknari kapping, serstakliga av tí, at ein marknaðarráðandi støða verður skapað ella styrkist.

SIEC-kanning
Kanningin, sum verður gjørd í sambandi við metingina av, um ein samanlegging skal góðkennast ella forbjóðast, er ein sokallað SIEC-kanning, Significant Impediment of Effective Competition. Hetta er tann sama kanningin, sum ES-kommissiónin og einstøku nationalu kappingarmyndugleikarnir í ES nýta. Við eini SIEC-kanning verður kannað, hvørt ætlaða samanleggingin kann hindra virknari kapping á marknaðinum.

Fyrimunurin við eini SIEC-kanningin er, at hon ikki setir marknaðarráðandi støðu sum einasta metingarstøðið fyri, nær samanlegging skal forbjóðast ella góðkennast. Kappingareftirlitið kann tí forbjóða eini samanlegging, tí hon fer at avmarka kappingina munandi, uttan mun til, um marknaðarráðandi støða verður skapað ella styrkist. Marknaðarráðandi støðan verður tó framvegis ein týðandi ábending um, hvørt ein samanlegging fer at hindra virknari kapping.

Savnandi hugtakið í SIEC-kanningini er hugtakið, virkin kapping. Virkin kapping er til fyrimuns fyri brúkaran, tí hon tryggjar brúkarunum lægri prísir, hægri góðsku, betri vøruúrval og nýskapan. Endamálið við eini SIEC-kanning er at forða samanleggingum, sum sannlíkt frátaka brúkarunum teir fyrimunir, sum eru við virknari kapping.

Marknaðarráðandi støða
Talan er um eina marknaðarráðandi støðu, tá ein fyritøka hevur eina so ráðandi búskaparliga støðu, at fyritøkan hevur møguleika at forða fyri virknari kapping á marknaðinum, av tí at nevnda støða gevur fyritøkuni møguleika fyri óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, viðskiftafólki og í síðstu atløgu endabrúkarunum.

Hugtakið, marknaðarráðandi støða, fevnir bæði um støður, har ein fyritøka hevur marknaðarráðandi støðu, og um kollektiva marknaðarráðandi støðu. Ein kollektiv marknaðarráðandi støða er til staðar, tá tvær ella fleiri fyritøkur, ið eru løgfrøðiliga óheftar hvør av aðrari, hava eina framferð sum ein kollektiv eind.

ES-kommissisónin hevur í sambandi við *Fráboðan nr. 139/2004* latið úr hondum *Vegleiðing til metan av ikki-horisontalum samanleggingum* (ES-vegleiðing nr. 2008/C 265/07) og *Vegleiðing til metan av horisontalum samanleggingum* (ES-vegleiðing nr. 2004/C 31/03). Fráboðanin, vegleiðingarnar og ES-siðvenjan annars vera vegleiðandi fyri, hvussu Kappingareftirlitið metir um marknaðarráðandi støðu og hindran av kapping.

Atknýttar avmarkingar
Í sambandi við góðkenning av eini samanlegging skal Kappingareftirlitið eisini taka støðu til aðrar atknýttar avmarkingar, sum eru neyðugar fyri, at samanleggingin kann góðkennast.

Atknýttar avmarkingar eru tílíkar, sum luttakandi fyritøkurnar hava samtykt í felag, og sum avmarka teirra virkisfrælsi á marknaðinum. Atknýttar avmarkingar eru slíkar, sum ikki eru til ampa fyri triðjamann.

Atknýttar avmarkingar skulu eisini hava tilknýti til sjálva samanleggingina. Avmarkingar, sum onki beinleiðis tilknýti hava til sjálva samanleggingina, eru ikki at meta sum atknýttar avmarkingar og koma tí undir § 6 í kappingarlógini.

At enda er tað ein treyt, at avmarkingarnar eru neyðugar fyri at gjøgnumføra samanleggingina. Hetta merkir, at samanleggingin ikki uttan hesar avmarkingar kann fremjast ella bert kann fremjast við størri váða, við munandi hægri kostnaðum, yvir eitt munandi longri tíðarskeið, ella við munandi færri møguleikum fyri einum hepnum úrsliti. Tá ið metast skal um hetta, skal atlit takast til lutfalsmeginregluna. Hetta hevur við sær, at gildistíðin á avmarkingunum, umframt materiella og landafrøðiliga virkisøki teirra, ikki má fara út um tað, sum verður mett neyðugt við atliti til at fremja samanleggingina. Um aðrir møguleikar eru, sum kunnu hava við sær, at ætlaða endamálið eins væl verður rokkið, mugu fyritøkurnar velja ta loysnina, sum objektivt grundað tykist minst kappingaravmarkandi.

Tá støða skal takast til atknýttu avmarkingina, fer Kappingareftirlitið m.a. at meta um, hvørt gildistíð og landafrøðiligt og vinnuligt gildisøki ikki er víðari, enn neyðugt er, fyri at samanleggingin kann fremjast. Eru fleiri valmøguleikar fyri, hvussu ein atknýtt avmarking kann evnast til, fyri at samanleggingin kann fremjast, skal tann leistur veljast, sum er minst avmarkandi fyri kappingina.

ES-kommissiónin hevur í sambandi við ES-fráboðan nr. 139/2004 latið úr hondum *Vegleiðing um kappingaravmarkingar, sum eru beinleiðis atknýttar og neyðugar í samanleggingum* (ES-vegleiðing nr. 2005/C 56/03) frá 5. mars 2005). Fráboðanin, vegleiðingin og ES-siðvenjan annars vera vegleiðandi fyri, hvussu Kappingareftirlitið metir um atknýttar avmarkingar.

§ 15, stk. 3 og 4
Greinin ásetir metingarstøðið, sum Kappingareftirlitið skal nýta í sambandi við sína meting av teimum samváða-avtalum, sum koma undir samanleggingareftirlitið, sbr. § 13, stk. 2.

Metingin fer fram eftir einum tvíbýttum leisti. Í fyrsta lagi skal Kappingareftirlitið kanna, hvørja ávirkan stovnanin hevur á kappingina á viðkomandi marknaði, t.e. um stovnanin fer at hindra virknari kapping, serliga við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapað ella styrkt. Í øðrum

lagi skal Kappingareftirlitið kanna eftir, um stovnanin hevur til endamáls ella sum fylgju at samskipa kappingarligu framferðina hjá stovnarunum. Hesin partur av kanningini fer fram eftir § 6, sum forbjóðar kappingaravmarkandi avtalum.

Orðingin í § 15, stk. 3 og 4 samsvarar við art. 2, stk. 4 og 5 í ES-fráboðan nr. 139/2004 og verður tulkað í samsvari við hesa. ES-kommissiónin hevur í sambandi við áðurnevndu fráboðan latið úr hondum ES-vegleiðing nr. 2008/C 95/01 frá 16. apríl 2008. Henda vegleiðing verður vegleiðandi fyri, hvussu Kappingareftirlitið tulkar § 15, stk. 3 og 4.

§ 15, stk. 5
Við ásetingini verður forboð sett luttakandi fyritøkum at fremja eina samanlegging, áðrenn Kappingareftirlitið hevur givið sína góðkenning. Saman við § 16, stk. 1, 2. pkt. merkir hetta, at ein samanlegging ikki kann fremjast, áðrenn fráboðan er latin, og áðrenn góðkenning er givin.

Ein og hvør transaktión, hvørs endamál ella úrslit er at fremja samanleggingina, er fevnd av forboðnum. Hetta merkir m.a., at útskifting av leiðslu, gjald av keypspeningi o.tíl. ikki kann fara fram, áðrenn samanleggingin er góðkend.

Forboðið heldur uppat, tá ið Kappingareftirlitið eftir § 15, stk. 2, 1. pkt. hevur góðkent samanleggingina, ella tá Kappingareftirlitið eftir § 15, stk. 5 hevur góðkent samanleggingina, ella um freistirnar í § 18, eru farnar.

§ 15, stk. 6
Sambært stk. 6 kann Kappingareftirlitið tó geva undantaksloyvi fyri forboðnum. Undantaksreglan í hesi grein er serliga ætlað teimum samanleggingum, sum verða fráboðaðar eftir einføldum leisti, og í minni mun teimum samanleggingum, sum verða fráboðaðar eftir vanligum leisti.

Ein serlig støða er, tá ið almenn fráboðan um yvirtøku er gjørd. Í slíkari støðu kann sjálv yvirtøkan setast í gongd treytað av, at fráboðan verður send Kappingareftirlitinum beinanvegin, sbr. § 16, og yvirtakandi fyritøkan ikki á annan hátt fremur samanleggingina. Yvirtakandi fyritøkan kann í hesum sambandi ikki nýta síni atkvøðurættindi fyrr enn góðkenning er fingin uttan so, at hesi rættindi verða nýtt til at tryggja virðið á íløguni, og undantaksloyvi er fingið frá Kappingareftirlitinum.

Verður samanlegging framd, áðrenn góðkenning er fingin frá Kappingareftirlitinum, kann sekt áleggjast eftir § 35, stk. 1, nr. 6.

§ 15, stk. 7
Ásetingin gevur Kappingareftirlitinum heimild til at góðkenna samanleggingar eftir einfalda málsviðgerð. Hetta merkir, at um Kappingareftirlitið metir, at tað hvørki er neyðugt at forbjóða ella treyta eina samanlegging, so hevur Kappingareftirlitið heimild til at góðkenna samanleggingina endaliga.

Galdandi fyri allar fráboðanir verður, at upplýsingar um samanleggingina verða almannakunngjørdar, og við tí fáa kundar, kappingarneytar og veitarar møguleika fyri at vísa á møguligar kappingarligar trupulleikar, sum ávís samanlegging kann skapa.

Tær samanleggingar, sum verða góðkendar eftir einfaldari málsviðgerð, eru tær, sum verða fráboðaðar eftir einføldum leisti, og tær, sum eru fráboðaðar eftir vanligum leisti, men har Kappingareftirlitið kemur til ta niðurstøðu, at samanleggingin ikki skapar kappingarligar trupulleikar.

Mannagongdin í sambandi við einfalda málsviðgerð er tann, at Kappingareftirlitið, eftir at hava móttikið eina fráboðan, antin eftir vanligum ella einføldum leisti, almannakunnger fráboðanina og ásetir eina stutta freist hjá triðjamanni, t.d. kappingarneytum, kundum og veitarum, at koma við møguligum viðmerkingum til samanleggingina. Afturat hesum kunnar Kappingareftirlitið beinleiðis mest týðandi veitarar, kundar og kappingarneytar fyri at fáa møguligar viðmerkingar.

Tá talan er um samanleggingar, sum eru fráboðaðar eftir einføldum leisti, er málsviðgerðin avmarkað til áðurnevndu hoyring og gjøgnumgongd av fráboðanini. Kappingareftirlitið eftirkannar ikki fráboðanina og ger ikki egnar kanningar. Talan er um eina góðkenning, sum verður givin við støði í teimum upplýsingum, sum partarnir hava latið, og møguligar viðmerkingar frá triðjaparti. Eftir § 2, stk. 3, hevur Kappingarráðið heimild til at taka aftur eina góðkenning, um avgerðin er grundað á skeivar ella villleiðandi upplýsingar.

Afturat teimum samanleggingum, sum verða fráboðaðar eftir einføldum leisti, kann Kappingareftirlitið eftir einfalda málsviðgerð góðkenna eina samanlegging, sum er fráboðað eftir vanligum leisti. Tá ein samanlegging er fráboðað á fullgóðan hátt eftir vanligum leisti, hevur Kappingareftirlitið 30 dagar til at kanna fráboðanina og gera egnar kanningar. Kemur Kappingareftirlitið innan freistina fram til, at samanleggingin ikki førir til kappingarligar trupulleikar, kann Kappingareftirlitið góðkenna samanleggingina eftir heimildini í hesi grein um einfalda málsviðgerð.

Sostatt fær Kappingareftirlitið heimild til at taka avgerð um góðkenning av samanleggingum, har góðkenningin er treytaleys, og Kappingareftirlitið kunnar Kappingarráðið um avgerðina á fyrstkomandi fundi í Kappingarráðnum.

Til § 16

§ 16, stk. 1
Ásett verður nær fráboðanarskyldugar samanleggingar, sum koma undir § 13, skulu fráboðast Kappingareftirlitinum. Fráboðanarfreistin er í seinasta lagi 1 viku eftir, antin tá sáttmáli um samanlegging er gjørdur, tá almenn fráboðan um samanlegging er gjørd ella tá onkur ávísur hevur fingið ræðið á fyritøkuni.

Í § 15, stk. 6 er ásett, at fráboðanarskyldug samanlegging ikki kann fremjast fyrr enn góðkenning er fingin frá Kappingareftirlitinum ella at undantaksloyvi er fingið til tess frammanundan.

§ 16, stk. 2
Við ásetingini verður heimilað Kappingareftirlitinum at almannakunngera fráboðaðar samanleggingar. Heimildin at almannakunngera er avmarkað til navn á luttakandi fyritøkum, slag av samanlegging og viðkomandi vinnugreinum.

Almannakunngering fer fram umvegis heimasíðuna hjá Kappingareftirlitinum, har kappingarneytar, veitarar, viðskiftafólk og almenningurin annars fær høvið at lata Kappingareftirlitinum møguligar viðmerkingar. Kappingareftirlitið kann harumframt venda sær beinleiðis til kappingarneytar, veitarar o.o. fyri at fáa møguligar viðmerkingar til samanleggingina.

Sum meginregla verður freistin at lata Kappingareftirlitinum viðmerkingar til samanleggingina ásett at vera 1 viku frá tí, at fráboðanin er almannakunngjørd.

§ 16, stk. 3
Heimilað verður Kappingareftirlitinum at áseta nærri reglur um fráboðan av samanleggingum o.a.

Til § 17

Til § 17, stk. 1
Sambært ásetingini kunnu samanleggingar fráboðast eftir einføldum ella vanligum leisti. Við heimild í § 16, stk. 3 í galdandi lóg, hevur kappingarmyndugleikin gjørt reglugerð nr. 2 frá 20. juli 2012 um fráboðan av samanleggingum. Í reglugerðini verður skilmarkað, hvørjar samanleggingar kunnu fráboðast eftir einføldum og vanligum leisti.

Til § 17, stk. 2
Í § 17, stk. 2 verður ásett ómaksgjald á 50.000 kr. fyri samanleggingar fráboðaðar eftir einføldum leisti. Tá ið fráboðað verður eftir einføldum leisti, skulu fyritøkurnar lata Kappingareftirlitinum færri upplýsingar enn um fráboðað verður eftir vanligum leisti. Samanleggingar, ið verða fráboðaðar sum einfaldar, kunnu enda við støði í einari einfaldari málsviðgerð. Av hesum orsøkum er ómaksgjaldið á samanleggingum fráboðaðar eftir einføldum leisti lægri enn um fráboðað verður eftir vanligum leisti.

Til § 17, stk. 3
Í § 17, stk. 3 verður ásett, at ómaksgjald fyri samanleggingar fráboðaðar eftir vanligum leisti er 0,1 % av samlaða árliga umsetninginum hjá luttakandi fyritøkunum í Føroyum, tó í mesta lagi 300.000 kr. Í § 14, stk. 4 í galdandi lóg er heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur um útrokning av umsetningi. Í kunngerð nr. 9 frá 11. mars 2008 hevur landsstýrismaðurin ásett nærri reglur um útrokning av umsetningi.

Til § 17, stk. 4
Um Kappingareftirlitið undir viðgerðini av eini samanlegging fráboðað eftir einfaldum leisti kemur til ta niðurstøðu, at samanleggingin skal fráboðast eftir vanligum leisti, verður í stk. 4 ásett, at ein fráboðan eftir vanligum leisti skal latast Kappingareftirlitinum saman við skjalprógvi um, at ómaksgjaldið er rindað sambært stk. 4 við frádrátti av tí ómaksgjaldið, ið frammanundan er goldið sambært stk. 2.

Tá ið freistirnar hjá Kappingareftirlitinum til viðgerð av eini samanlegging byrja frá tí degi ein fráboðan er fullfíggjað, og skjalprógv er fingið fyri goldið ómaksgjald sambært stk. 4, hevur krav um fráboðan eftir vanligum leisti við sær, at freist til viðgerð verður sett í bíðistøðu. Í tílíkum

føri verða teir dagar, sum Kappingareftirlitið longu hevur brúkt í Fasu I, mótroknaðir í tí nýggju Fasu I, tá ið viðgerðin av samanleggingini, fráboðað eftir vanligum leisti, byrjar.

Til § 17, stk. 5
Ásett verður, at ómaksgjald í stk. 2-4 skal rindast Kappingareftirlitinum, og at ómaksgjaldið skal rindast í seinasta lagi, tá ið fráboðan verður latin Kappingareftirlitinum. Krevur Kappingareftirlitið, at fráboðað verður eftir vanligum leisti, skal ómaksgjald rindast samstundis sum fráboðan um samanlegging eftir vanligum leisti verður latin Kappingareftirlitinum. Ómaksgjaldið verður goldið av luttakandi fyritøkunum, og skotið verður upp sbrt. § 16, stk. 1, at freistin byrjar, tá ið Kappingareftirlitið hevur móttikið fullfíggjaða fráboðan og skjalprógv um rindað ómaksgjald.

Til § 17, stk. 6
Í stk. 6, 1. pkt. verður ásett, at virknaðurin av, at eitt ómaksgjald fyri fráboðanir eftir einføldum ella vanligum leisti sambært stk. 1-2, er, at samanlegging ikki verður mett sum fráboðað, hóast ákrav ikki er goldið. Hetta er galdandi, um ómaksgjald ikki er goldið, ella um ov lítið ómaksgjald er goldið. Í hesum støðum er tað eitt krav, at Kappingareftirlitið setir fram ákrav um gjald innan 5 yrkadagar.

Í stk. 6, 2. pkt. verður ásett, at virknaðurin av, at eitt ómaksgjald sambært stk. 4 ikki er goldið, er, at fráboðanin er at meta sum fallin burtur. Tað er tó eitt krav, at Kappingareftirlitið hevur sett fram ákrav um, at ómaksgjaldið skal rindast innan 5 yrkadagar. Um ómaksgjaldið ikki verður rindað innan 5 yrkadagar, er fráboðanin um samanlegging at meta sum fallin burtur. Ein fráboðan verður eisini at meta sum fallin burtur, um hon ikki verður latin inn sum fráboðan eftir vanligum leisti sambært stk. 4, hóast rykkjarar frá Kappingareftirlitinum,

Um ikki harðari revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður við sekt revsaður tann, sum tilætlað ella av grovum ósketni ikki heldur fráboðanarskylduna í § 16, stk. 1, ella ikki heldur vanligu fráboðanarfreistina í § 20, stk. 3, sambært § 35, stk. 1, nr. 5 í kappingarlógini.

Til § 17, stk. 7. nr. 1-3
Av teirri orsøk, at kappingarmyndugleikin nýtir nógva arbeiðsorku at viðgera samanleggingar, verður í stk. 7 ásett, at rindað ómaksgjald sambært stk. 2-4 ikki verður afturrindað, um fráboðan verður tikin aftur ella um fráboðan er at meta sum fallin burtur, sambært stk. 6, 2. pkt. Tó kunnu serlig viðurskifti gera, at rindað ómaksgjald verður afturrindað.
Í § 17, stk. 7, nr. 1, verður ásett, at rindað ómaksgjald verður afturgoldið, um fráboðað samanlegging ikki var fráboðanarskyldug. Tann støðan, at Kappingareftirlitið noktar at góðkenna eina samanlegging hevur ikki við sær, at ómaksgjaldið verður endurrindað. Sama er galdandi, um ein samanlegging bert kann góðkennast við tilsøgn frá luttakandi fyritøkum sambært § 19.

Í § 17, stk. 7, nr. 2 verður ásett, at eitt rindað ómaksgjald verður endurrindað, um fráboðanin verður tikin aftur, áðrenn hon er fullfíggjað. Í § 2 í reglugerð nr. 2 frá 20. juli 2012 um fráboðan av samanleggingum er ásett, nær ein fráboðan er fullfíggjað.

Í § 17, stk. 7, nr. 3 verður ásett, at rindað ómaksgjald verður endurrindað, um fráboðanin verður tikin aftur, áðrenn avgerð er tikin sambært § 15, stk. 1 ella stk. 5, og afturtøkan skyldast, at annar almennur myndugleiki hevur noktað fyritøkunum at leggja saman. Tað eru luttakandi fyritøkur ella umboð fyri luttakandi fyritøkur, sum hava ábyrgdina av at boða Kappingareftirlitinum frá, at annar almennur myndugleiki hevur noktað samanleggingini.

Til § 18

§ 18, stk. 1
Ásett verður, at Kappingareftirlitið hevur 30 dagar til at taka støðu til, um samanleggingin kann góðkennast, ella um samanleggingin skal kannast nærri.

Tá ið Kappingareftirlitið hevur tikið avgerð um, at eitt mál skal kannast nærri sbrt. § 18, stk. 1, verður skrivlig grundgeving latin pørtunum, har greitt verður frá orsøkini til, at samanleggingin verður kannað nærri. Í grundgevingini skal ítøkiliga vísast á, hvørji viðurskifti, ið Kappingareftirlitið metir, kunnu hindra virknari kapping.

Skrivliga grundgevingin gevur pørtunum møguleika fyri sjálvir at koma við tilsagnum, soleiðis at samanleggingin kann góðkennast. Kappingareftirlitið hevur í hesum sambandi møguleika fyri at gera tilsøgnina bindandi, sbr. § 19, stk. 1.

§ 18, stk. 2
Ásett verður, nær avgerð um at góðkenna ella forbjóða eini samanlegging skal takast.

§ 18, stk. 3
Ásetingin gevur Kappingareftirlitinum heimild til at leingja freistina við 20 yrkadøgum, um nýggj ella broytt tilsøgn verður latin, tá ið færri enn 20 yrkadagar eru eftir av freistini í stk. 2.
Ásetingin skal tryggja, at Kappingareftirlitið ikki kemur í tíðarneyð, um nýggj ella broytt tilsøgn verður latin, tá ið freistin eftir stk. 2 er um at fara.

§ 18, stk. 4.
Ásetingin gevur Kappingareftirlitinum heimild til at leingja freistina í stk. 2 við 20 yrkadøgum, um semja er fingin við partarnar um hetta, og færri enn 20 yrkadagar eru, til freistin í stk. 2 fer.

§ 18, stk. 5
Ásetingin skal tryggja fyritøkum o.ø. eina greiða rættarstøðu. Um Kappingareftirlitið ikki hevur tikið eina avgerð áðrenn frestirnar í stk. 1-4 er farnar, er rættarliga fylgjan hon, at samanleggingin er góðkend.

Hetta merkir, at ein samanlegging kann verða góðkend eftir § 18, stk. 5, um:

1. Kappingareftirlitið ikki í seinasta lagi 30 yrkadagar eftir, at váttan er latin um fullfíggjaða fráboðan, kunnar fráboðara um sína avgerð at kanna málið nærri sambært § 18, stk. 1.
2. Kappingareftirlitið ikki hevur tikið avgerð í málinum í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at váttan eftir § 18, stk. 1 er send fráboðara og heimildirnar í § 18, stk. 3 og 4, ikki eru brúktar.
3. Kappingareftirlitið, eftir at hava brúkt heimildina í § 18, stk. 3 ella 4, ikki hevur tikið avgerð í málinum í seinasta lagi 20 dagar eftir, at freistin í § 18, stk. 2, er gingin út.

§ 18, stk. 6
Ásetingin skal forða fyri, at fyritøkur o.a. gera sær dælt av freistini í § 18, stk. 5.

Til § 19

§ 19, stk. 1
Ásetingin gevur Kappingareftirlitinum heimild til, í sambandi við góðkenning av eini samanlegging, at seta treytir og geva boð fyri m.a. at tryggja, at fyritøkurnar halda givna tilsøgn. Heimildin kann nýtast bæði í sambandi við sjálva góðkenningina og til seinni at tryggja, at givin tilsøgn verður hildin.

Ásetingin hevur stóran týdning í sambandi við samanleggingareftirlit. Endamálið við einum eftirliti er ikki at forbjóða samanleggingum, men við treytum og boðum at beina burtur tey neiligu árin, sum ein samanlegging kann hava við sær. Kappingareftirlitið skal, sum seinasta amboð, og eftir at allir møguleikar at finna semju eru troyttir, forbjóða eini samanlegging, sum hindrar virknari kapping.

Í samanleggingarmálum, har luttakandi fyritøkurnar hava latið tilsøgn, kann Kappingarráðið góðkenna samanleggingina treytað av, at tilsøgnin verður fylgd. Tílík avgerð kann kærast til Føroya Kærustovn sambært § 32, stk. 1.

Orðingin í § 19, stk. 1 samsvarar við art. 6, stk. 2 í ES-fráboðan nr. 139/2004 og verður tulkað í samsvari við hesa. ES-kommissiónin hevur í sambandi við áðurnevndu fráboðan latið úr hondum *Vegleiðing um møgulig uppskot um loysnir, sum kunnu góðtakast í sambandi við fráboðan nr. 139/2004* (ES-vegleiðing nr. 2008/C 267/01). Fráboðan, vegleiðing og ES-siðvenjan annars verða vegleiðandi fyri, hvussu Kappingareftirlitið tulkar § 19, stk. 1.

§ 19, stk. 2
Ásetingin heimilar Kappingareftirlitinum, eftir at ein samanlegging er góðkend, at geva eini fyritøku boð um at bera seg at á ein ávísan hátt fyri at tryggja, at ein tilsøgn verður rætt og rættstundis útint. Eini boð eftir § 19, stk. 2 kunnu gevast, hóast fyritøkan hevur fingið eina freist at útinna tilsøgnina, og hóast henda freist ikki er farin.

Samband skal vera ímillum eini boð eftir § 19, stk. 2, og ta tilsøgn, sum er givin. Kappingareftirlitið kann ikki geva eini boð, sum ikki hava natúrligt samband við tilsøgnina.
Sum dømi um hesa avmarking kann nevnast, at tá ein fyritøka hevur fingið boð um at selja ávísar framleiðslueindir frá, og hetta vísir seg ikki at vera gjørligt, kann Kappingareftirlitið ikki koma við boðum um, at ávís partabrævaogn skal seljast ístaðin. Hinvegin kann Kappingareftirlitið, í sambandi við frásølu av framleiðslueindum, geva boð til tess at tryggja, at sølan fer fram eftir ávísum leisti.

Avgerðir eftir § 19, stk. 2 kunnu kærast til Kærustovnin, sbrt. § 32, stk. 1. Kærustovnurin kann royna rættleikan av einum boðum eftir § 19, stk. 2, undir hesum at taka støðu til, hvat tilsøgnin fevnir um, og hvussu langt hon røkkur.

Kærustovnurin kann sostatt taka støðu, tá ið ósemja er millum Kappingareftirlitið og luttakandi fyritøkur um tulking av teimum tilsagnum, sum boð eru givin um.

Til § 20
Kappingareftirlitið hevur tríggjar heimildir til afturtøku av góðkenningum.

§ 20, stk. 1
Tann fyrsta, sum er ásett í § 20, stk. 1, gevur Kappingareftirlitinum heimild til afturtøku av góðkenning, um avgerðin í stóran mun er grundað á skeivar ella villleiðandi upplýsingar, sum ein av luttakandi fyritøkunum er atvoldin til.

§ 20, stk. 1 samsvarar við art. 6, stk. 3, litra a í ES-fráboðan nr. 139/2004 frá 20. januar 2004 og verður tulkað í samsvari við hesa. § 20, stk. 1 skal umsitast soleiðis, at tað bert í undantaksførum gerst neyðugt hjá Kappingareftirlitinum at nýta hesa heimild.

Tað eru luttakandi fyritøkurnar, sum skulu fáa til vegar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at Kappingareftirlitið kann staðfesta, um treytirnar fyri at góðkenna eru loknar. Kappingareftirlitið kann eisini sjálvt savna inn upplýsingar, sum Kappingareftirlitið metir eru neyðugar fyri at útinna sítt virksemi sambært § 28.

Tvær treytir skulu vera loknar, áðrenn Kappingareftirlitið kann taka aftur eina samanlegging eftir § 20, stk. 3.

Fyrsta treyt
Avgerðin hjá Kappingareftirlitinum skal í stóran mun vera grundað á skeivar ella villleiðandi upplýsingar.

Hugtakið, skeivar ella villleiðandi upplýsingar, fevnir bæði um vantandi upplýsingar, um beinleiðis svikafull viðurskifti og um upplýsingar, har tær luttakandi fyritøkurnar, áðrenn upplýsingarnar vórðu latnar, ikki í nóg stóran mun høvdu tryggjað sær, at hesar vóru rættar.

Hugtakið, í stóran mun, merkir, at tær upplýsingar, sum eru skeivar ella villleiðandi, skulu vera beinleiðis ella óbeinleiðis orsøk til góðkenningina, og skulu vera partur av grundgevingini hjá Kappingareftirlitinum fyri at góðkenna samanleggingina.

Onnur treyt
Ein ella fleiri av luttakandi fyritøkunum skulu vera atvoldin til tær skeivu ella villleiðandi upplýsingarnar. Hetta er ein avmarking í rættinum til afturtøku av góðkenningum.

Talan er um upplýsingar, sum ein fyritøka er atvoldin til, um upplýsingarnar eru latnar inn, latnar úr hondum ella staðfestar/váttaðar av einari ella fleiri av luttakandi fyritøkunum ella umboðum ella ráðgevum hjá teimum. Vantandi upplýsingar eru eisini at meta sum upplýsingar, sum ein fyritøka er atvoldin til. Skeivar ella villleiðandi upplýsingar, sum eru savnaðar inn frá triðjaparti sbrt. § 28,, og síðani eru lagdar fyri eina av luttakandi fyritøkunum, sum hvørki váttar ella avsannar rættleikan av hesum upplýsingum, eru at meta sum upplýsingar, sum fyritøkan er atvoldin til.

Umframt við afturtøku eftir § 20, stk. 1, kunnu luttakandi fyritøkur, sum hava latið inn skeivar ella villleiðandi upplýsingar, revsast við sekt sambært § 35, stk. 1, nr. 11, um talan er um tilætlað brot ella grovt ósketni.

§ 20, stk. 2
Onnur heimildin til afturtøku av góðkenning verður nýtt, um ein ella fleiri av luttakandi fyritøkunum nokta at fylgja treytum ella boðum sbrt. § 19, stk. 1 og 2.

Tílíkar treytir og boð eru ein avgerandi fortreyt fyri, at ein samanlegging verður góðkend. Tí kann noktan at fylgja treytum ella boðum sbrt. § 19, stk. 1 og 2, føra til afturtøku av góðkenning. Um luttakandi fyritøkur mótvegis Kappingareftirlitinum kunnu vísa á, at tað nú ikki er neyðugt ella møguligt at fylgja teimum treytum ella boðum, sum eru givin í sambandi við eina góðkenning, kann hetta hava við sær, at Kappingareftirlitið ikki fremur eina afturtøku eftir § 20, stk. 2 í hesum lógaruppskoti. Hetta kann t.d. verða støðan, um marknaðarviðurskiftini eru munandi broytt, síðani góðkenningin varð givin.

§ 20, stk. 2 samsvarar við lógargrein 6, stk. 3, litra b í ES fráboðan nr. 139/2004 frá 20. januar 2004 og verður tulkað í samsvari við hesa. § 20, stk. 3 skal umsitast soleiðis, at tað bert í undantaksføri verður neyðugt hjá Kappingareftirlitinum at taka aftur eina góðkenning.

§ 20, stk. 3
Triðja heimildin til afturtøku av góðkenning snýr seg um tær góðkenningar, sum verða givnar til samanleggingar, sum eru fráboðaðar eftir einføldum leisti og góðkendar eftir einfaldari málsviðgerð sbrt. § 15, stk. 7.

Heimildin gevur Kappingareftirlitinum rætt at taka aftur tílíka góðkenning og áleggja luttakandi fyritøkunum at fráboða eftir vanligum leisti. Fylgjan av hesum er, at freistir, sum vóru galdandi í sambandi við einfalda fráboðan, fella burtur, og luttakandi fyritøkur skulu, sum meginregla, innan tvær vikur hava fráboðað eftir vanligum leisti. Tá ið luttakandi fyritøkurnar hava fráboðað av nýggjum, byrja freistirnar av nýggjum.

Kappingareftirlitið ger av, um fyritøkurnar skulu fráboða eftir vanligum leisti, men Kappingareftirlitið fer ikki at nýta heimildina í § 20, stk. 3, um:

1) Luttakandi fyritøkurnar, tá ið Kappingareftirlitið fremur afturtøku av góðkenning, ikki hava tikið stig til at gjøgnumføra samanleggingina, ella
2) Luttakandi fyritøkurnar, tá ið Kappingareftirlitið fremur afturtøku av góðkenning, hava tikið stig til at gjøgnumføra samanleggingina, men innan tvær vikur boða Kappingareftirlitinum frá, at samanleggingin ikki fer at verða framd.

Hevur Kappingareftirlitið avgjørt, at fráboðast skal eftir vanligum leisti, og ongin fráboðan er komin, tá ið freistin á tvær vikur er farin, kunnu luttakandi fyritøkur revsast við sekt sambært § 35, stk. 1, nr. 5 í hesum lógaruppskoti, um talan er um tilætlaða gerð ella grovt ósketni.

Afturtøka kann fara fram, um ein ella fleiri av luttakandi fyritøkunum hava latið inn skeivar ella villleiðandi upplýsingar. Fyri tær samanleggingar, sum eru fráboðaðar vanligt, men góðkendar eftir einfaldari málsviðgerð sambært § 15, stk. 7, kann afturtøka fremjast sambært § 20, stk. 1.

Í teimum førum har ein samanlegging er fráboðað eftir einføldum leisti, fer metingin hjá Kappingareftirlitinum at vera grundað á tær upplýsingar, sum fyritøkurnar koma við og møguligar upplýsingar, sum koma frá triðjapersóni, í sambandi við at samanlegging verður almannakunngjørd. Kappingareftirlitið fer sum meginregla ikki at innheinta upplýsingar og sum meginregla ikki at eftirkanna tær upplýsingar, sum eru fráboðaðar.

Tað er tí av alstórum týdningi, at luttakandi fyritøkurnar tryggja sær, at tær upplýsingar, sum verða latnar inn í sambandi við einfalda fráboðan, eru rættar

Kravið í § 20, stk. 1 um, at avgerðin í stóran mun skal vera grundað á skeivar ella villleiðandi upplýsingar, sum fyritøkurnar eru atvold til, er ikki galdandi fyri afturtøku eftir § 20, stk. 3. Tað krevst tó, at skeivleiki er í upplýsingum ella metingum, ið hava týdning fyri metingina hjá Kappingareftirlitinum av samanleggingini.

Hugtakið, skeivar og villleiðandi upplýsingar, er hitt sama sum í § 20, stk. 3.

Umframt afturtøku eftir § 20, stk. 3, kunnu luttakandi fyritøkur, sum hava latið inn skeivar ella villleiðandi upplýsingar, revsast við sekt sambært § 35, stk. 1, nr. 11, um brotið er framt tilætlað ella í grovum ósketni.

Til § 21
Ásetingin í § 21 gevur Kappingareftirlitinum heimild til at loysa sundur eina samanlegging, sum ikki hevur fingið góðkenning eftir § 15, stk. 1. Orðingin í § 21 samsvarar við art. 8 (4) í ES fráboðan nr. 139/2004 frá 20. januar 2004. Kappingareftirlitið fer í síni tulking av § 21 at taka støði í art. 8 (4) í ES fráboðan nr. 139/2004.

Ásetingin í § 21 gevur bara Kappingareftirlitinum heimild til at loysa sundur samanleggingar, sum hindra virknari kapping, serliga tí ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist. Ásetingin gevur Kappingareftirlitinum eina serstakliga víða heimild til at endurreisa virknu kappingina. Heimildin er tó bert ætlað Kappingareftirlitinum at nýta í undantaksførum. Kappingareftirlitið er tó altíð bundið av lutfalsmeginregluni, og Kappingareftirlitið skal tí altíð velja tað minst inntrívandi inntrivið, sum kann røkka ætlaða endamálinum.

Ásetingin skal tryggja, at samanleggingareftirlitið er munadygt, og at fráboðanarskyldan verður hildin. Verða boðini, sum Kappingareftirlitið gevur eftir § 21, ikki hildin, kann sekt sambært § 35 í lógaruppskotinum áleggjast fyri at tvinga luttakandi fyritøkurnar at eftirlíka. Somuleiðis kunnu luttakandi fyritøkurnar revsast við sekt sambært § 35 í lógaruppskotinum, fyri manglandi eftirlíkan av boðum, givin eftir hesi grein.

Hvørji boð verða givin sambært § 21 veldst um, hvat slag av samanlegging talan er um og tær ítøkiligu umstøður, sum eru galdandi. Boð kunnu verða givin um frásølu av partabrøvum, sundurbýting av fyritøku ella ognum, ella uppathald av felagsræði ella avtøku av einum samváða. Uttan mun til, hvørji boðini eru, fáa luttakandi fyritøkurnar altíð eina freist til at eftirlíka boðunum.

Til § 22

Rættindi hjá pørtum eru skipað í fyrisitingarlógini og verða ikki ávirka av hesi áseting.

Lógin um alment innlit er sum meginregla ikki galdandi fyri mál eftir kappingarlógini. Hetta kemst av, at innlit kann skaða kappingina, um kappingarneytar umvegis kappingarmyndugleikan kunnu fáa upplýsingar um hvønn annan, sum vanliga ikki eru tøkar á marknaðinum. Í staðin er álagt kappingarmyndugleikanum at almannakunngera upplýsingar um sítt virksemi og harvið skapa gjøgnumskygni fyri brúkaran.

§ 22, stk. 1
Sum meginregla er lóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina ikki er galdandi fyri mál og kanningar eftir hesi lóg, uttan so at hesi eru undantikin í § 22, stk. 1, 1. pkt. Tey undantøk, sum eru nevnd í greinini, snúgva seg um ásetan av fyrisitingarligum reglum innan virksemið hjá kappingarmyndugleikanum.

Í § 22, stk. 1, 2. pkt. er ásett, at meginreglan um egið innlit og notatskyldan í lógini um alment innlit eisini er galdandi í málum eftir hesi lóg.

At enda í greinini er ásett, at víðarilating av upplýsingum til annan fyrisitingarligan myndugleika kemur undir somu reglur, sum er nevndar í 1. og 2. pkt. í § 22.

§ 22, stk. 2
Í ásetingini verður álagt kappingarmyndugleikanum at almannakunngera avgerðir hjá kappingarmyndugleikanum og øðrum myndugleikum umframt dómar og úrskurðir. Endamálið við hesum er at skapa gjøgnumskygni við virkseminum hjá kappingarmyndugleikanum.

§ 22, stk. 3
Stk. 3 í lógaruppskotinum hevur við sær, at Kappingareftirlitið kann almannakunngera, hvørjum kappingarmyndugleikin arbeiðir við, eins og Kappingareftirlitið kann almannakunngera frágreiðingar av meiri almennum slag.

§ 22, stk. 4
Sum undantak frá meginreglunum í stk. 2 og 3 verður í stk. 4 skotið upp, at upplýsingar av tekniskum slag, umframt rakstrar- og handilsligir loynidómar, í tann mun hesir hava serligan búskaparligan týdning fyri tann persón ella ta fyritøku, sum upplýsingarnar viðkoma, kunnu verða undantiknar frá almannakunngerð.

Endamálið við ásetingini er at tryggja, at samsvar er millum undantøkini í § 12, stk. 1, nr. 2 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, tó so at orðingin, rakstrar- og handilsligir loynidómar, er ein trengri orðing. Hetta er orsakað av, at endamálið við almannakunngerð verður burtur, um so er, at øll handilsviðurskifti kunnu verða undantikin frá almannakunngerð. Tað hevur avgerandi týdning til tess at skilja og brúka eina avgerð, at tað, í ein ávísan mun, er gjørligt at vísa á sannroyndar upplýsingar um rakstrar- og handilsviðurskifti.

§ 22, stk. 5
Í samsvari við galdandi lóg verður í stk. 4 givið formanni Kappingarráðsins heimild at gera av um upplýsingar, og – um so er – í hvørjum formi, kunnu latast limum Kappingarráðsins. Henda heimild formansins er eksklusiv og endalig.

Til § 23

§ 23, stk. 1
Í § 23, stk. 1 verður ásett, at Kappingarráðið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av Kappingareftirlitsins fyrisiting av lógini og reglum ásettar sambært lógini. Hetta merkir millum annað, at Kappingarráðið leggur strategisk mál og ætlanir fyri virksemið hjá Kappingareftirlitinum til rættis. Til tess, at Kappingarráðið kann hava yvirskipaðu ábyrgdina er neyðugt, at ráðið leypandi verður kunnað um virksemið hjá Kappingareftirlitinum.

Kappingarráðið tekur avgerð í málum av stórum ella prinsipiellum týdning. Tað er Kappingarráðið, ið avgerð, hvørt eitt mál hevur stóran ella prinsipiellan týdning. Til tess at meta um, hvørt eitt mál er av stórum ella prinsipiellum týdning kann m.a. hyggjast nærri at, hvørt Kappingarráðið áður hevur tikið avgerð í líknandi máli, hvørt ivamál eru um tulkingina av kappingarlógini, ella um avgerðin skapar fordømi.

Fundarskipan fyri Kappingarráðið skal tryggja, at Kappingarráðið tekur avgerð í øllum stórum ella prinsipiellum málum uttan so, at Ráðið sjálvt hevur avgjørt at Kappingareftirlitið skal taka avgerðina. Fundarskipanin skal fyriskriva, at Kappingareftirlitið á Kappingarráðsfundum greiðir frá teimum málum, ið eru til viðgerðar. Hetta tryggar, at Kappingarráðið altíð er kunnað um mál, har Kappingareftirlitið seinni tekur avgerð.

Kappingarráðið góðkennir eisini tær kanningar, sum Kappingareftirlitið ger sambært § 29.

§ 23, stk. 2
Í § 23, stk. 2 verður ásett, at Kappingarráðið kann lata Kappingareftirlitinum heimildir sínar at taka avgerð í málum, ið hava stóran ella prinsipiellan týdning. Talan kann í hesum sambandi verða um mál, har Kappingarráðið frammanundan hevur tikið avgerð í líknandi máli, og har einki ivamál er støðutakanina hjá Kappingarráðnum í tílíkum máli.

Talan kann eisini verða um eina ítøkiliga avhending frá Kappingarráðnum til Kappingareftirlitið at taka avgerð, í máli, har Kappingarráðið ikki tekur avgerð á kappingarráðsfundi, har málið verður viðgjørt. Hetta kann t.d. verða støðan, um Kappingarráðið ynskir, at ávís viðurskifti skulu kannast nærri, áðrenn endalig avgerð verður tikin, og har Kappingaráðið hevur álit á, at Kappingareftirlitið kann avgreiða málið, og uttan at hetta skal leggjast fyri Kappingarráðið av nýggjum. Í slíkum førum skal Kappingareftirlitið á fyrstkomandi kappingarráðsfundi, eftir at avgerð er tikin, kunna Kappingarráðið.

§ 23, stk. 3
Í § 23, stk. 3 verður ásett, hvussu Kappingarráðið er skipað. Ásett er, at Kappingarráðið skal hava kunnleika til alment og privat vinnuvirksemi, búskaparfrøði, løgfrøði, fíggjarlig viðurskifti og viðurskifti brúkaranna. Formaðurin skal vera óheftur av vinnu- og brúkaraáhugamálum.

Kappingarráðið hevur tveir fastar eykalimir, ið taka sæti, um limir eru ógegnigir ella hava forfall.

§ 23, stk. 4
Í § 23, stk. 3 verður ásett, at Kappingarráðið ger egnu fundarskipan, ið skal góðkennast av landsstýrismanninum. Fundarskipanin skal m.a. innihalda reglur um viðtøkuføri, gegni, tagnarskyldu, arbeiðs- og heimildarbýtið millum Kappingarráðið og Kappingareftirlitið og um rættin hjá einum, sum ein avgerð viðvíkur, at koma fyri Ráðið, um avgerðin verður løgd fyri Ráðið til støðutakan.

Til § 24
Í § 24 verður ásett, at Kappingareftirlitið er myndugleikin, ið tekur avgerð sambært lógini og reglum sambært henni. Kappingareftirlitið er sostatt myndugleikin, sum boð og fráboðanir skulu latast til. Kappingareftirlitið stendur fyri málsviðgerðini, undir hesum marknaðarkanningum, hoyring av pørtum og øðrum og tekur avgerð í øllum málum, ið ikki hava stóran ella prinsipiellan týdning.

Kappingareftirlitið hevur heimild at byrja mál av egnum ávum, og kann fyribils ella endaligt taka avgerð um at steðga málsviðgerðini. Kappingareftirlitið hevur eisini heimild at gera av um grundarlag er fyri at kanna eitt mál, og kann slík avgerð ikki kærast.

Til § 25
Ásetingin gevur landsstýrismanninum heimild til at gera reglur um talgilt samskifti og undirskrift í sambandi við, at upplýsingar og mál verða viðgjørd í Kappingarráðnum og Føroya Kærustovni.

Til § 26
Í § 26, nr. 1-4 verða ásett tey boð, sum Kappingareftirlitið kann geva sambært § 6, stk. 4 og § 11, stk. 4, við tí endamáli at steðga skaðiligum árinum av eini kappingaravmarking.

Treytað av, hvussu kappingaravmarking er háttað, og hvørja ávirkan hon hevur, má ítøkilig støða takast til, hvussu kappingaravmarkingin hóskandi kann verða steðgað. Boðini í nr. 1-4 eru ikki úttømandi viðvíkjandi møguleika Kappingareftirlitsins at leggja upp í við boðum.

§ 26, nr. 1
Ásetingin heimilar Kappingareftirlitinum at geva boð um, at avtalur, viðtøkur, handilstreytir o.a. fult ella lutvíst verða settar úr gildi. Til tess at steðga einum broti, skal ein fyritøka ikki bert seta úr gildi kappingaravlagandi avtaluna o.tíl., men skal somuleiðis de-facto steðga við at fylgja avtaluni o.a.

§ 26, nr. 2
Heimild, at geva boð um, at ikki kann verða farið upp um ásettar prísir ella vinningar, er ásett í § 26, nr. 2. Tann gjøllari ásetingin av prísum ella vinningum má fara fram við einari tilhugsaðari meting av viðurskiftunum, sum tey høvdu verið á einum marknað við kapping. Eitt veruligt prógv fyri, hvussu prísurin ella vinningurin hevði verið, kann sostatt ikki verða kravt, men kravt verður, at hetta verður gjørt sannlíkt.

Boð kunnu verða givin soleiðis, at prísir og vinningar verða ásettir, og at ikki kann verða farið upp um hesar, ella at ávísar útrokningarreglur verða nýttar, tá ið prísir og vinningar verða

útroknaðir. Við hesum verður miðað ímóti størst møguligum smidleika í sambandi við boð viðvíkjandi prísum og vinningum, har prísjavning framhaldandi kann vera gjørd soleiðis, at fyritøkurnar o.a. fáa møguleika til og verða eggjaðar til at betra um virkisførið.

§ 26, nr. 3
Eftir § 26, nr. 3 kann ein fyritøka fáa boð um at selja til nærri tilskilaðar keyparar við teimum treytum, sum fyritøkan vanliga setir fyri samsvarandi sølu. Fyritøkan kann tó altíð krevja, at goldið verður í reiðum peningi ella krevja samsvarandi trygd.

§ 26, nr. 4
Í § 26, nr. 4 verður givin heimild um, at triðipartur skal hava atgongd til verandi undirstøðukervi, tá hetta er neyðugt, til tess at kunna bjóða út eina vøru ella tænastuveiting. Talan kann t.d. verða um atgongd til eitt elnet, eina havn ella flogvøll. Heimildin at geva boð um at geva triðjaparti atgongd til undirstøðukervið, fevnir einans um tey føri, har fyritøkur, ið eru møguligir kappingarneytar, eru forðaðar í sjálvar at byggja upp neyðugu hentleikarnar.

Til § 27

§ 27, stk. 1
Við ásetingini verður heimild givin til, at Kappingareftirlitið endar eitt mál við at geva tilsøgn, sum fyritøkur hava latið bindandi. Fyrimunurin av at kunna enda mál við samráðing við partarnar er, at tað er smidligt, skjótt og orkusparandi. Tað er ein fyrimunur at fyritøkurnar luttaka virkið fyri at finna fram til eina loysn á trupulleikunum, sum teirra avtalur ella atburður skapar. Fyritøkurnar hava størri innlit í marknaðarviðurskifti og teirra egnu fíggjarligu støðu, og tí er tað oftani møguligt at finna fram til loysnir, sum betur loysa ítøkiligu ivamálini. At enda eitt mál við tilsøgn er framhugsandi, og hevur við sær, at avgerðin ásetir, hvat skal gerast ella ikki gerast frameftir. Kappingareftirlitið kann góðtaka tilsagnir, sum steðga kappingaravmarkandi virksemi, og sum skapar ella endurreisir eina virkna kapping, ella á annan hátt røkkur endamálinum við lógini um við virknari kapping at fremja eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu.

Tilsagnir sum fyritøkur hava givið kunnu tíðaravmarkast.

Brýtur ein fyritøka eina tilsøgn, sum er bindandi, kann fyritøkan verða revsað við sekt sbrt. § 35, stk. 1, nr. 8. Um ein fyritøka ikki fylgir einari tilsøgn, sum er bindandi, kunnu áleggjast dagligar ella vikuligar bøtur sambært § 34, stk. 1. Hevur ein fyritøka givið tilsøgn, og hevur Kappingareftirlitið endað sakina við at gera tilsøgnina bindandi, kann fyritøkan ikki kæra til Kærustovnin. Hetta er ein avleiðing av, at fyritøkan við samráðing sjálv hevur funnið fram til eina loysn. Tað vil hvørki vera orkusparandi ella fremjandi fyri kappingina, um ein fyritøka fær møguleikan at enda eitt mál við tilsøgn um fyritøkan samstundis kann átala hesa avgerð, sum fyritøkan sjálv hevur luttikið í saman við kappingarmyndugleikanum, og sum er gjørd bindandi fyri fyritøkuna. Tað er bert møguleikin fyri at leggja eitt mál til Føroya Kærustovn, sum verður avmarkaður. Fyritøkan kann altíð leggja spurningin um lógarbrotið viðvíkjandi avgerð hjá Kappingareftirlitinum fyri dómstólarnar.

§ 27, stk. 2

Ásetingin heimilar Kappingareftirlitinum at geva boð til tess at tryggja, at latin tilsøgn verður fylgd til fulnar og innan ásetta tíð.

Um ósemja er um tulking av einari tilsøgn, kann Kappingareftirlitið taka avgerð um, at fyritøkan sum hevur latið tilsøgnina, skal virka á ávísan hátt og innan ávísa freist fyri at tryggja, at tilsøgnin sum fyritøkan hevur latið, verður fylgd. Kappingareftirlitið kann eisini geva slík boð, hóast møgulig freist at fylgja tilsøgnini ikki er farin.

Avgerð eftir § 27, stk. 2 kann kærast til Føroya Kærustovn.

§ 27, stk. 3 nr. 1-2
Ásetingin heimilar, at Kappingareftirlitið kann afturkalla eina tilsøgn eftir stk. 1.

Orsakirnar fyri eini møguligari afturkallan kunnu skyldast, at veruligu viðurskiftini, sum høvdu týdning í sambandi við avgerðina, eru broytt, at avtalupartarnir ikki hava gjørt eftir boðum, ella at avgerðin er tikin við støði í skeivum ella villleiðandi upplýsingum frá avtalupørtunum.

Um Kappingareftirlitið metir tað vera í samsvari við lutfalsmeginregluna at afturkalla eina avgerð eftir stk. 1 merkir hetta, at tey ivamál, sum Kappingareftirlitið hevði av fyrstantíð í mun til brot á §§ 6 og 11, framvegis eru galdandi og kann tað tí væntast, at Kappingareftirlitið fer at taka nýggja avgerð eftir § 6 ella § 11.

Til § 28
Eftir § 28 kann Kappingareftirlitið krevja allar upplýsingar frá fyritøkum, samtøku av fyritøkum og øllum løgfrøðiligum og likamligum persónum o.ø. til tess at røkja lógarfestu uppgávurnar. Tað er Kappingareftirlitið, ið avgerð, hvørjar upplýsingar eru neyðugar til tess at røkja skylduna. Um so er, at talan er um revsiverd viðurskifti, verður meldað til løgregluna, ið síðan hevur kanningarnar um hendi eftir rættargangslógini. Spurningurin um, hvørt upplýsingarnar, ið Kappingareftirlitið krevur, eru neyðugar, kann bert leggjast fyri rættin.

§ 28, stk. 2
Ásetingin áleggur fyritøkum, samtøku av fyritøkum og øllum løgfrøðiligum og likamligum persónum o.ø. skyldu at lata upplýsingar, sum verða kravdar sambært stk. 1. Í hesum sambandi er umráðandi at hava í huga meginregluna um sjálvákæru.

§ 28, stk. 3
Ásetingin heimilar Kappingareftirlitinum at krevja upplýsingar og atgongd til skjøl frá øðrum myndugleikum.

§ 28, stk. 4
Ásetingin heimilar Kappingareftirlitinum at innheinta upplýsingar sambært § 28, stk. 1, um Kappingareftirlitið skal hjálpa kappingarmyndugleikum, ið eru partar av norðurlendsku samstarvsavtaluni í kappingarmálum, at fremja og handhevja kappingarlógina í hesum londum.

Til § 29

§ 29, stk. 1
Ásetingin heimilar Kappingareftirlitinum at gera kanningar av vinnugreinum.

Endamálið við vinnugreinakanning er at fáa innlit í kappingarviðurskiftini innan ávísa/r vinnugrein/ir. Tað er ikki eitt krav, at Kappingareftirlitið frammanundan kann staðfesta álvarsamar kappingarligar trupulleikar, áðrenn ein vinnugreinakanning kann setast í verk. Málið er at fáa staðfest, hvørt trupulleikar eru, og um so er, hvat slag av trupulleikum, ið talan er um.

§ 29, stk. 2
Til tess at koma undan teirri støðu, at ein fyritøka o.a. ikki vil lata Kappingareftirlitinum umbidnar upplýsingar til eina vinnugreinakanning, verður í stk. 2 heimilað Kappingareftirlitinum at krevja allar neyðugar upplýsingar inn sbrt. § 28, stk. 1-2 og § 30. Um nakar tilætlað ella av grovum ósketni ikki eftirlíkar einum kravi frá Kappingareftirlitinum um upplýsingar, kann hetta sektast, sbrt. § 35, stk. 1, nr. 11.

§ 29, stk. 3
Heimilað verður Kappingareftirlitinum at almannakunngera vinnugreinakanningar, tó við teimum undantøkum, sum fylgja av § 22. Kappingareftirlitið eigur áðrenn almannakunngering, at senda úrslitið av kanningini til hoyring hjá viðkomandi pørtum.

Til § 30
Eftir hesi grein verður heimilað Kappingareftirlitinum at gera eftirlitskanningar, sum hava við sær, at Kappingareftirlitið fær atgongd til høli og flutningsamboð hjá fyritøkum ella samtaki av fyritøkum.

Í sambandi við eftirlitskanningar kann Kappingareftirlitið gera seg kunnugt við og taka avrit av øllum viðkomandi upplýsingum, eisini upplýsingum, ið eru goymdar talgilt, t.d. roknskapir, roknskapartilfar, úrrit úr bókum og øðrum handilsskjølum.

Atgongd til talgildar upplýsingar er ein týðandi táttur í eini eftirlitskanning. Kappingareftirlitið kann krevja allar upplýsingar, sum eru goymdar á teldu, ambætarum o.ø.

§ 30, stk. 2
Við ásetingini verður heimilað, at Kappingareftirlitið í sambandi við eftirlitskanningar kann biðja nevndarlimir, leiðslu og onnur starvsfólk um at gera Kappingareftirlitið kunnugt við persónligar lutir, lummar, taskur o.a. Tað eru nógvir møguleikar at viðgera upplýsingar talgilt. Upplýsingar kunnu eitt nú viðgerast á geymum, fartelefon og øðrum lutum. Miðlarnir, sum upplýsingar verða goymdar á, kunnu verða lítlir í støddd. Mælt verður tí til, at Kappingareftirlitið fær heimild til at biðja um at starvsfólk í fyritøkunum vísa innihaldið í teirra lummum, taskum o.ø. Kappingareftirlitið kann kanna møguligar upplýsingar við atliti at taka avrit, undir hesum at taka talgild avrit og at taka við sær tilfar, sum er partur av eftirlitskanningini.

Nýtslan av ásetingini er ikki avmarkað til føri, har tað ítøkiliga kann staðfestast, at eitt starvsfólk hevur burturbeint upplýsingar og lagt upplýsingarnar í sínar lummar, taskur o.a.

Kappingareftirlitið fremur kanningar sambært § 30, stk. 2, eftir nágreiniligum mannagongdum. Talan er um eitt inntriv, sum kann hava avleiðingar fyri tann einstaka, og kanningin fer tí fram so avsíðis sum gjørligt.

Í royndum er mannagongdin tann, at starvsfólk hjá Kappingareftirlitinum ella umboð fyri eftirlitið heita á starvsfólk o.o. um at tøma taskur, lummar o.a. Um persónurin, sum verður biðin um at tøma sínar lummar o.a. noktar, kann Kappingareftirlitið ikki tøma lummarnar o.a. hjá viðkomandi, men má heita á løgregluna um at fremja rannsakanina. Løgreglan heitir síðan á starvsfólkið um at tøma taskur, lummar o.a.. Um starvsfólkið framhaldandi noktar, fremur løgreglan rannsakanina av lummum, taskum o.a. hjá starvsfólkinum.

§ 30, stk. 3
Í teimum førum, har upplýsingar o.a. verða viðgjørd hjá dátuviðgera, veitara, ráðgeva o.a., og tað ikki er gjørligt at útvega upplýsingarnar beinleiðis frá fyritøkuni, ið verður kannað, hevur Kappingareftirlitið yvir fyri hesum somu heimild sum eftir stk. 1.

§ 30, stk. 4
Ein eftirlitskanning sambært stk. 1 kann bert fara fram eftir rættarúrskurði og ímóti at vísa samleikaprógv.

§ 30, stk. 5
Eftir ásetingini fær Kappingareftirlitið heimild til í sambandi við eftirlitskanningina at taka talgild avrit (spegling) av dátum, upplýsingum o.ø., m.a. í talgildum miðlum so sum harðdiski, teldu o.s.fr. Kappingareftirlitið kann spegla allar dátur, sum eru á ávísu teldunum o.a., eisini av t.d. strikaðum, fjaldum ella bronglaðum dátum ella dátum í back-up-skipan við atliti til at kanna innihaldið. Við hesum verður tað tryggjað, at eftirlitið fær tíð til at gera kanningar av upplýsingunum, sum vera tiknar við, uttan at kanningin skal fara fram í hølunum hjá fyritøkunum, sum kann vera til ampa fyri fyritøkuna.

§ 30, stk. 6
Tað avrit og speglað tilfar í sambandi við eftirkanningina verður innsiglað, tá ið eftirlitið fer frá hølunum hjá fyritøkunum. Innsiglingin verður ikki brotin, fyrr enn tilfarið verður kannað sum framhald av eftirlitskanningini.

§ 30, stk. 7
Ásett verður, at tann, sum verður kannaður, kann krevja at vera til staðar ella velja sær umboð at vera til staðar, tá ið avrit ella speglaða tilfarið verður kannað. Avleiðingin av hesum er, at tann, sum verður kannaður, er til staðar, eins og fór kanningin av tilfarinum fram eftirlitsstaðnum.

§ 30, stk. 8
Sambært ásetingini hevur Kappingareftirlitið skyldu til í seinasta lagi 40 yrkadagar eftir, at ein eftirlitskanning er gjørd, at lata tí, sum verður kannaður, avrit av tí øllum teimum upplýsingum, sum Kappingareftirlitið hevur tikið úr speglaða tilfarinum.

§ 30, stk. 9
Við ásetingini verður álagt Kappingareftirlitinum at varðveita speglaða tilfarið undir segli, tá tilfarið frá eftirlitskanningini er kannað.

§ 30, stk. 10
Við ásetingini verður álagt Kappingareftirlitinum at strika avrit, speglað o.a. tilfar, um Kappingareftirlitið ikki metir, at tilfarið inniheldur prógv um brot á kappingarlógina.

§ 30, stk. 11
Í tann mun Kappingareftirlitið velur at fara víðari við málinum, eftir at avrit ella speglað tilfar er gjøgnumgingið, skal avrit ella speglað tilfar strikast, tá ið endaliga avgerðin fyriliggur í málinum. Ein endalig avgerð fyriliggur annaðhvørt, tá ið kappingarmyndugleikin hevur tikið endaliga avgerð í málinum, ella um málið verður kært, ein endalig avgerðin fyriliggur frá Føroya Kærustovni ella dómstólinum.

§ 30, stk. 12
Í teirri støðu, at tað ikki ber til hjá Kappingareftirlitinum, sama dag, sum ein eftirlitskanning verður framd, at fáa atgongd til upplýsingar ella taka avrit, sbrt. stk. 1 og 2, kann kappingarmyndugleikin segla høli og upplýsingar hjá fyritøkuni í 3 yrkadagar eftir, at kanningin er gjørd.

Ein eftirlitskanning skal vanliga gangs skjótt og enda sama dag, sum hon er byrjað. Hetta serliga tí, at eftirlitskanningar eru tyngjandi og nerva fyritøkuna. Tískil er tíðarfreistin at innsigla viðkomandi hølir hjá fyritøkunum og upplýsingar ásett til 3 dagar eftir, at eftirlitskanningin er framd.

§ 30, stk. 13
Í tann mun Kappingareftirlitið má taka upplýsingar ella miðilin við sær til tess at avrita upplýsingarnar, skal tað, sum Kappingareftirlitið hevur tikið og avrit av hesum, latast fyritøkuni aftur í seinasta lagi 3 yrkadagar eftir, at eftirlitskanningin fór fram. Freistin kann tó verða longd, um tað av tekniskum ávum ikki ber til at fáa atgongd til upplýsingarnar.

Kappingareftirlitið skal bjóða fyritøkuni og/ella uttanhýsis dátaviðgerðanum, sum eru fyri eftirlitskanning, at vera til staðar, tá Kappingareftirlitið kannar og tekur avrit av tilfarinum. Tá Kappingareftirlitið ber tilfarið aftur, útflýggjar Kappingareftirlitið fyritøkuni eitt eintak av avritunum og eitt yvirlit yvir tey avrit, sum tikin eru.

§ 30, stk. 14
Freistirnar í stk. 8, 12 og 13 kunnu leingjast í serligum førum. Eitt nú kunnu tøknilig viðurskifti gera tað trupult at kanna speglaða tilfarið innanfyri ásettu freistirnar, ella eitt nú um mongdin av dáta er so mikið umfatandi, at tørvur er á meiri tíð at kanna tilfarið.

§ 30, stk. 15
Í § 30, stk. 15, verður heimilað Kappingareftirlitinum at gera eftirlitskanningar í Føroyum fyri kappingarmyndugleikar, sum eru partar av norðurlendsku samstarvsavtaluni í kappingarmálum, til tess at fremja og handhevja kappingarlógina í hesum londum.

§ 30, stk. 16
Tað hevur týdning fyri at kunna fremja og handhevja kappingarlógina, at løgreglan kann veita hjálp eins og víst á í viðmerkingum til § 30, stk. 2. Ásetingin heimilar eisini landsstýrismanninum

saman við løgregluni at gera reglur í hesum sambandi fyri at tryggja, at samstarvið fer fram á rættan og gjøgnumskygdan hátt.

Til § 31
Eftir § 31 hevur Kappingareftirlitið heimild at lata víðari upplýsingar, sum koma undir tagnarskyldu kappingarmyndugleikans, til kappingarmyndugleikar í øðrum londum. Hetta er treytað av, at upplýsingarnar ganga báðar vegir.

Fyritøkurnar hava í støðugt størri mun virksemi, ið røkkur út um landamørkini, og hevur hetta við sær, at neyðugt er við einum virknum eftirliti við kappingaravmarkandi avtalum. Eitt slíkt eftirlit er bert møguligt við øktum samstarvi og skifti av upplýsingum millum kappingarmyndugleikarnar.

Til tess at fremja og handhevja kappingarreglurnar munagott er neyðugt, at Kappingareftirlitið fær heimild at útflýggja upplýsingar, ið koma undir tagnarskyldu kappingarmyndugleikans til kappingarmyndugleikar í øðrum londum.

§ 31, stk. 1
Sambært ásetingini kann Kappingareftirlitið einans útflýggja upplýsingar, sum koma undir tagnarskylduna, tá hesar eru neyðugar fyri at kunna fremja og handhevja kappingarlógina í teimum londum, sum upplýsingar verða útflýggjaðar til. Útflýggjan av upplýsingum til onnur lond kann bert fara fram, um samsvarandi upplýsingar verða útflýggjaðar føroysku kappingarmyndugleikunum.

Tagnarskylda kappingarmyndugleikans viðvíkur teimum upplýsingum, sum eru fevndar av fyrisitingarlógini.

§ 31, stk. 2
Reglan ásetir tær treytir, ið skulu vera loknar, tá Kappingareftirlitið útflýggjar upplýsingar til kappingarmyndugleikar í øðrum londum. Tað er ein treyt, at móttakarin av upplýsingunum eisini hevur tagnarskyldu, at upplýsingarnar einans verða nýttar til tað endamál, ið er tilskilað í millumtjóðaavtaluni, og at móttakarin einans kann lata upplýsingarnar víðari við staðiligum samtykki frá Kappingareftirlitinum og einans til tey endamál, ið samtykkið fevnir um.

Upplýsingar, ið kunnu verða útflýggjaðar, eru upplýsingar um týðandi handilslig viðurskifti, ið hava týdning fyri kappingina, og har tað er neyðugt, at hesar upplýsingar verða hildnar loyniligar fyri almenninginum.

Vilja kappingarmyndugleikarnir í einum øðrum landi lata upplýsingarnar til ein annan myndugleika, kann hetta einans verða gjørt, um samtykki er fingið frá Kappingareftirlitinum og einans til tað endamál, sum samtykkið fevnir um. Hetta hevur við sær, at bert í undantaksføri verður samtykki givið til at útflýggja upplýsingar til onnur enn kappingarmyndugleikan. Hetta er harumframt treytað av, at trúnaðurin verður varðveittur.

§ 31, stk. 3
Eftir stk. 3 kann landsstýrismaðurin áseta reglur um, hvussu Kappingareftirlitið skal útflýggja upplýsingar, ið koma undir tagnarskyldu kappingarmyndugleikans.

Til § 32

§ 32, stk. 1
Í ásetingini verður tilskilað, hvørjar avgerðir sambært lógini kunnu kærast til Føroya Kærustovn.

§ 32, stk. 2, nr. 1-2
Við ásetingini verður tilskilað, hvør kann kæra eina avgerð hjá Kappingareftirlitinum, sum er nevnd í stk. 1.

Sambært ásetingini kann tann, sum avgerðin viðvíkur, og tann sum annars hevur individuellan og týðandi áhuga í málinum, kæra eina avgerð sambært stk. 1.

Tann, sum ein avgerð viðvíkur, er beinleiðis móttakarin av avgerðini (adressaturin). Tann sum annars hevur individuellan og týðandi áhuga í einum máli er tann, sum ein avgerð ikki beinleiðis er rættað ímóti, men har viðkomandi hevur ein individuellan og týðandi áhuga í málinum. Stk. 2, nr. 2, setir tó ávísar avmarkingar fyri møguleikanum hjá tí, sum ikki er beinleiðis móttakari av einari avgerð eftir stk. 1, at kæra.

§ 32, stk. 3
Eftir stk. 3 kann avgerð eftir § 24, stk. 3, har ásett er m.a., at Kappingareftirlitið ger av, um tað er grundarlag fyri at kanna ella at taka avgerð í einum máli, og um málsviðgerð fyribils ella endaliga skal støðga, ikki kann kærast til Føroya Kærustovn.

§ 32, stk. 4
Kæra um aðrar avgerðir kunnu fáa steðgandi virknað, bæði frá Kappingareftirlitinum og Føroya Kærustovni. Um umbøn um steðgandi virkna verður latin Føroya Kærustovni, skal Kappingareftirlitið bíða eftir avgerð frá Føroya Kærustovni viðvíkjandi umbønini. Kæra um avgerð eftir § 22, stk. 4 hevur steðgandi virknað.

§ 32, stk. 5
Ásett er tíðarfreist til viðgerð av kærumálum vegna atliti til tann, sum kærir. Føroya Kærustovni er í hesum sambandi álagt at taka avgerð í málinum í seinasta lagi 8 vikur eftir, at málið er lagt fyri hann.

Til § 33
Ásett verður, at avgerðir tiknar av kappingarmyndugleikanum eftir hesi lóg, ikki kunnu leggjast fyri rættin fyrrenn avgerð frá Føroya Kærustovni er til skjals. At Kappingareftirlitið heitir á ákærumyndugleikan um at viðgera eitt mál sum løgreglumál er ikki ein avgerð, og kann hetta ikki leggjast fyri Føroya Kærustovn.

§ 33, stk. 2
Ásett verður ein tíðarfreist á 4 vikur at skjóta avgerð hjá Kappingareftirlitinum inn fyri Føroya Kærustovn. Freistin byrjar, tá avgerðin verður kunngjørd tí, sum avgerðin viðvíkur.

§ 33, stk. 3

Tíðarfreistin at leggja avgerð hjá Føroya Kærustovni inn fyri Føroya Rætt er 8 vikur. Verður avgerðin ikki løgd fyri Føroya Rætt innan ásettu freist, er avgerðin hjá Føroya Kærustovni endalig.

Til § 34

§ 34, stk. 1
Ásetingin gevur Kappingareftirlitinum heimild at geva vikuliga sekt, um upplýsingar ikki verða latnar ella tilsøgn ikki verður fylgd.

§ 34, stk. 2
Ásetingin gevur heimild til at innheinta sekt við panting og innkrevjingarkostnaði. Taks fremur pantingina sambært lóg um innkrevjing av skattum, t.e. løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt.

Til § 35
Í § 35 verður ásett, at brot á tey viðurskifti nevnd í nr. 1-11, sum verða framd tilætlað ella av grovum ósketni, og har harðari revsing ikki er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verða revsað við sekt.

Ætlanin við lógaruppskotinum er, at bøturnar skulu vera ein upphædd, sum týðiliga er hægri enn støddin á fíggjarliga fyrimuninum hjá fyritøkunum ella einkultpersónunum við broti á kappingarlógina. Bøturnar skulu sostatt verða ein slík ásýnilig stødd, at bøturnar eru egnaðar til munadygt at ávirka fyritøkur og einkultpersónar til at fylgja lógini. Hetta fyrilit er eisini týdningarmikið fyri at tryggja, at fyritøkur og einkultpersónar, sum halda lógina, ikki eru minni kappingarfør í mun til fyritøkur og einkultpersónar, sum ikki halda lógina.

Leisturin í mun til ásetan av sektini er, at ein grundupphædd verður ásett í mun til grovleikan av brotinum. Síðan kunnu ískoyti áleggjast, um brotið er framt yvir eitt longri tíðarskeið, um vinningurin er fingin av brotinum, um tað eru herðandi ella linnandi umstøður umframt gjaldsevnini hjá tí, sum hevur framt brotið.

Grundupphæddirnar eftir føroysku kappingarlógini eru:

Grovleiki	Grundupphæddir
Minni álvarsamt	10 tkr. – 400 tkr.
Álvarsamt	400 tkr. – 15 mió. kr.
Sera álvarsamt	>15 mió. kr.

Grundupphæddirnar verða settar í mun til, hvussu álvarsamt brotið er. Brotið kann vera minni álvarsamt, álvarsamt ella sera álvarsamt. Fyri minni álvarsom brot, verður ein grundupphædd ásett, sum liggur millum 10.000 kr. og 400.000 kr. Fyri álvarsom brot liggur grundupphæddin millum 400.000 kr. og 15. mió. kr., meðan grundupphæddin fyri eitt sera álvarsamt brot liggur omanfyri 15. mió. kr.

Eitt minni álvarsamt brot er sum meginregla ein kappingaravlagandi loddrøtt avtala, t.d. ein umboðsavtala, sum hevur avmarkaða ávirkan á marknaðin. T.d. um umboðsavtalan inniheldur áseting ímóti passivari sølu, men har ásetingin ongantíð er handhevjað.

Álvarsom brot eru t.d. kappingaravmarkandi lodd- ella vatnrættar avtalur, sum hava eina størri ávirkan á marknaðin. T.d. ásetan av minstuprísum í sambandi við víðarisølu. Misnýtsla av eini marknaðarráðandi støðu kann eisini vera eitt álvarsamt brot. T.d. útihýsandi framferð, sum veitingarnoktan, diskriminatión og ávísar avsláttarskipanir.

Sera álvarsom brot eru t.d., tá kappingarneytar avtala prís ella býta marknaðir millum sín, og har hesi kappingarneytar tilsamans sita á einum stórum parti av marknaðinum. Somuleiðis er talan um sera álvarsamt brot, tá ein fyritøku við monopolstøðu við ymiskum kappingaravmarkandi átøkum roynir at fasthalda sína monopolstøðu.

Um brotið er framt yvir eitt tíðarskeið, sum er longri enn 1 ár, so kann leggjast upp til 50 % afturat grundupphæddini. Er brotið farið fram yvir eitt tíðarskeið, sum er longri enn 5 ár, so verður álagt 10% fyri hvørt eyka ár.

Í tann mun tað er møguligt at staðfesta ein beinleiðis vinning av brotinum, skal hædd takast fyri hesum vinningi í mun til sektaruppgerðina.

Í mun til sektaruppgerðina er talan um herðandi umstøður um t.d. tann, sum hevur framt brotið, hevur framt líknandi brot áður, hevur forðað kanningararbeiðinum hjá kappingarmynduleikanum ella er høvuðsaktørurin handan viðkomandi brot.

Talan kann vera um linnandi umstøður um t.d. tann, sum hevur framt brotið, bert hevur havt ein passivan leiklut, ikki hevur fylgt ein kappingaravlagandi avtalu ella hevur samstarvað við myndugleikan í sambandi við málið.

Í mun til ásetan av sektini, skal hædd eisini takast fyri gjaldsevninum hjá tí, sum hevur framt brotið. Kappingarmyndugleikin kann í hesum sambandi biðja t.d. um roknskaparupplýsingar til tess at meta um gjaldsevnini. Í teirri støðu, at vandi er fyri, at ein fyritøka fer á húsagang av sektini, kann hetta hava ávirkan á upphæddina.

Lagt verður upp til, at sektin ikki verður hægri enn 10 % av samlaða samtøkuumsetninginum á heimsstigi fyri seinasta roknskaparár eins og í Danmark og ES.

§ 35, stk. 1, nr. 1
Fyri at tryggja at forboðið í § 6, stk. 1 móti kappingaravlagandi avtalum og líknandi verður virkið, kann áleggjast sekt fyri tilætlað ella av grovum ósketni at fremja brot á § 6, stk. 1.

§ 35, stk. 1, nr. 2
Ásetingin hevur til endamáls at tryggja at treytir álagdar eftir § 8, stk. 3, 2 pkt. ella stk. 4 verða hildnar.

§ 35, stk. 1, nr. 3
Við hesi áseting verður heimild givin til at áleggja einari fyritøku sekt, tá brot verður framt á § 11, stk. 1 um misnýtslu av ráðandi marknaðarstøðu.

§ 35, stk. 1, nr. 4
Við hesi heimild verður heimilað Kappingareftirlitinum at áleggja sekt fyri brot á § 12, stk. 1 í sambandi við tey boð, sum kappingarmyndugleikin hevur givið um, at almennur stuðul skal støðga ella afturrindast.

§ 35, stk. 1, nr. 5
Í sambandi við samanleggingareftirlit í kappingarlógini er neyðugt at tryggja, at fráboðanarskyldugar samanleggingar verða fráboðaðar. Skotið verður tískil upp at áleggja sekt fyri brot á fráboðanarskylduna sambært § 16, stk. 1. Hetta er bæði galdandi í førum við væntandi fráboðan, og í førum har fráboðað verður ov seint. Somuleiðis verður sektaður tann, sum ikki heldur vanligu fráboðanarfreistina í § 20, stk. 3.

§ 35, stk. 1, nr. 6
Í ásetingini verður skotið upp, at sekt kann áleggjast tí, sum hóast forboð er sett fyri hesum, fremur eina samanlegging, brýtur forboð fyri at fremja samanlegging áðrenn góðkenning ella at loyvi er fingið til vegar ella ikki lýkur tær treytir ella boð sum eru givin. Ein treyt fyri virknum samanleggingareftirliti er, at fyritøkur halda tey boð og lúka tær treytir, sum kappingarmyndugleikin ásetir. Brot á hesi viðurskifti verða tí revsað.

§ 35, stk. 1, nr. 7
Við atliti til at tryggja at tey boð, sum Kappingareftirlitið gevur sambært lógini, verða fylgd, kunnu sektir verða álagdar fyri, at boð ikki verða fylgd. Talan er um boð um at steðga brot á § 6, stk. 1, sbrt. § 6, stk. 4, 1. pkt. um kappingaravmarkandi avtalur og á boð um at steðga brotum á § 11, stk. 1, sbrt. § 11, stk. 4, 1. pkt.

Dømi um boð, sum Kappingareftirlitið kann geva eftir § 6, stk. 4 og § 11, stk. 4 við tí endamálið at steðga skaðiligu árinunum frá kappingaravmarkingunum, eru nevnd í § 26.

§ 35, stk. 1, nr. 8
Neyðugt er at tryggja at fyritøkur fylgja tilsøgnum, sum eru bindandi sambært § 27, stk. 1. Heimildað verður tí við hesum lógaruppskoti at revsa tann, sum tilætlað ella av grovum ósketni ikki fylgir tilsøgnum.

§ 35, stk. 1, nr. 9
Við tí endamáli at tryggja at fyritøkur fylgja boðum, sum er neyðugt fyri at fyritøkurnar fylgja tilsøgnum eftir § 27, stk. 1 verður heimild við hesum lógaruppskoti givin til at revsa við sekt tann, sum tilætlað ella av grovum ósketni ikki fylgir boðum í sambandi við tilsøgn eftir § 27, stk. 1, sbr. § 27, stk. 2.

§ 35, stk. 1, nr. 10
Við tí endamáli, at Kappingareftirlitið kann fáa atgongd til tær í § 28, stk. 1-3 nevndu upplýsingar, verður við hesum lógaruppskoti heimilað at revsa við sekt tann, sum tilætlað ella

av grovum ósketni ikki gevur Kappingareftirlitinum tær upplýsingar, sum eftirlitið hevur krav á sambært § 28, stk. 1-3.

§ 35, stk. 1, nr. 11
Til tess at kappingarmyndugleikin kann gera rættar niðurstøður í mun til sítt kanningararbeiði er umráðandi, at tær upplýsingar, sum kappingarmyndugleikin innheintar, eru rættar.

Við ásetingini verður tann, sum tilætlað ella av grovum ósketni gevur kappingarmyndugleikanum ella Føroya Kærustovni skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tigur um viðurskifti, sum hava týdning fyri mál ella kanningar eftir § 29 í kappingarlógini, revsaður.

§ 35, stk. 2
Við hesi áseting verður fyritøka ikki revsað um so er, at ein avtala er fráboðað Kappingareftirlitinum, sambært § 8, stk. 2 ella stk. 4, og til Kappingareftirlitið hevur kunngjørt sína avgerð avgerð eftir § 8, stk. 2, stk. 4 ella stk. 5., um gerðirnar eru innan fyri tað, sum liggur í fráboðanini.

§ 35, stk. 3
Í § 35, stk. 3 verður skotið upp, at revsingin fyri tann, sum í ósamsvari við forboðið í § 6, stk. 1 ger kartellavtalu, kann vera við fongsli í upp til 1 ár og 6 mánaðir. Fongsulsrevsing kemur bert upp á tal, um brotið er framt tilætlað ella av grovum ósketni - vísandi til vavið av brotinum ella til skaðiligu árinini, sum brotið kann hava við sær.

Fyri at talan kann verða um brot á stk. 3, skulu partarnir hava gjørt eina kartellavtalu. Avtaluhugtakið skal í samsvari við ES-kappingarrættin tulkast breitt. Kappingarrættarliga avtaluhugtakið fevnir bæði um munnligar og skrivligar avtalur, nágreiniligar ella tigandi avtalur. Tað, sum er avgerandi í mun til avtaluna er, at minst tveir partar hava víst felags vilja til at virka á marknaðinum á ein ávísan ella sama hátt.

Samskipan og viðtøkur millum fyritøkur er eisini fevnt av kappingarrættarliga avtaluhugtakinum. Markið fyri, nær talan er um eina avtalu ella samskipa atferð, er eins og í ES-kappingarrætti ikki statisk og er í høvuðsheitum tongd at, um tað kann prógvast at ein avtala fyriliggur ella um prógvini heldur benda á, at partarnir sýna ein felagsvilja, sum eyðkennir eina samskipaða atferð.

Við viðtøkur er at skilja ein viðtøka millum fyritøkur, sambært § 6, stk. 3. Hugtakið kann fevna um viðtøkur, avgerðir ella áheitan/tilmæli.

Tað miðsavnandi í einum kartelli, sambært pkt. 2, er fyri tað fyrsta, at talan er um eina avtalu, sum er gjørd millum fyritøkur á sama søluliði tvs. avtalur millum kappingarneytar. Kappingaravmarkandi avtalur millum fyritøkur, sum eru á hvør sínum søluliði, eru ikki fevndar av ásetingini. Talan kann t.d. vera um avtalur millum eina heilsølu og eina smásølu um prísir, sum smásølan skal nýta í sambandi við víðarisølu av vørum og tænastum.

Fyri tað næsta skal avtalan o.a. viðvíkja prísum í breiðari merking, avmarking av sølu ella framleiðslu, sundurbýting av marknaðum ella kundum ella samskipan av tilboðum. Tílíkar

avtalur vilja sum meginregla hava til endamáls at avmarka kappingina og eru ikki undantiknar sambært § 7.

Tær kappingaravmarkingar, sum eru nevndar í pkt. 2, nr. 1-4, eru eisini sambært ES-kappingarrættinum, so mikið álvarsom kappingaravmarking, at forboðið í § 6, stk. 1 er galdandi uttan mun til stødd á marknaðarpørtum hjá luttakandi fyritøkum.

§ 35, stk. 3, nr. 1
Í ásetingini verður skotið upp, at revsingin kann vera við fongsli í upp til 1 ár og 6. mánaðir um fyritøkur í sama søluliði gera avtalur um prísir, vinning ella líknandi í sambandi við sølu ella víðari sølu av vørum og tænastum.

Ásetingin fevnir um avtalur og eina og hvørja atgerð, sum fyritøkur í sama søluliði beinleiðis ella óbeinleiðis samskipa í sambandi við ásetan av prísi á eini vøru ella tænastu, sum fyritøkur av røttum heldur eiga at kappast um. Talan kann t.d. vera um avtalur millum fyritøkur á sama søluliði, um at áseta eins keyps ella søluprísir, avtalur um minstuprísir ella avtalur um felags príshækkan. Talan kann eisini vera um avtalur millum fyritøkur á sama søluliði, um hvørjar prísir teirra søluumboð skulu ella eiga at nýta í sambandi við víðarisølu av vøru ella tænastum.

Avtalur millum fyritøkur á sama søluliði um vinning, undir hesum um vinning hjá søluumboðum/smásølum er eisini fevnt av ásetingini. Talan kann eisini vera um t.d. avtalur, sum nokta pørtunum at veita avsláttur, avtalur um eins ella hægst loyvdan avsláttur, ella avtalur, sum nokta frávikum í almannakunngjørdum avsláttrum.

§ 35, stk. 3, nr. 2
Í nr. 2 verður skotið upp, at revsingin kann vera við fongsli í upp til 1 ár og 6 mánaðir, um fyritøkur á sama søluliði gera avtalu um at avmarka sølu ella framleiðslu. Ásetingini fevnir um eina og hvørja atgerð, sum fyritøkur á sama søluliði gera við tí endamáli at avmarka ta framleiðslu ella sølu, sum hesar annars vildu kappast um.

Prísurin á eini vøru er tongdur at útboði og eftirspurningi. Tískil kann tað ávirka prísirnar, um tvær ella fleiri fyritøkur í sama søluliði gera avtalu um at avmarka útboðið av einari ávísari vøru ella tænastu.

Avtalur um avmarkan av sølu kunnu hava sama virknað sum avtalur um avmarkan av framleiðslu, tí hetta hevur við sær, at keyparin ikki fær møguleika fyri at keypa ta mongd av ávísu vøruni og tænastuni, sum hann ynskir. Eftirgjørda avmarkingin av útboðnum vil tískil - alt annað líka - hava við sær, at prísin á vøruni hækkar.

§ 35, stk. 3, nr. 3
Í nr. 3 verður skotið upp, at revsingin fyri kartellvirksemi kann vera við fongsli í upp til 1 ár og 6. mánaðir, um fyritøkur í sama søluliði gera avtalu um at býta sundur marknaðir ella kundar sínámillum. Ásetingin fevnir um eina og hvørja atgerð, sum fyritøkur í sama søluliði við avtalu, gera um at býta sundur marknaðir ella kundar sínámillum. Avtalur um býti av marknaðum ella kundum avmarka møguleikarnar hjá kundum, hetta viðførir alt annað líka, at prísurin tískil hækkar, ella at framleiðslan minkar.

Ein avtala um marknaðarbýti kann bæði fevna um avtalur um býti av ávísum vøru- ella landafrøðiligum marknaði. Ein avtala um býti av kundum kann bæði fevna um ávísar kundar ella kundabólkar, t.d. almennar myndugleikar, smásølur ella endabrúkarar.

§ 35, stk. 3, nr. 4
Í nr. 4 verður skotið upp, at revsingin fyri kartellvirksemi kann vera við fongsli í upp til 1 ár og 6 mánaðir, um fyritøkur í sama søluliði gera avtalur um at samskipa boð/tilboð. Ásetingin fevnir um eina og hvørja atgerð, sum fyritøkur í sama søluliði gera sínámillum um at avmarka ta kapping, sum annars vildi verið millum teirra í mun tilboð í sambandi við lisitatión.

Revsisubjektið eftir hesi ásetingini er tann, sum ger kartellavtalu millum fyritøkur í sama søluliði, tvs. avtalur millum kappingarneytar. Revsisubjektið kann tó eisini vera tann, sum hevur mælt til ella á annan hátt viðvirkað til, at fyritøkur í sama søluliði gera kartellavtalu, t.d. formaðurin ella stjórin í eini samtøku av fyritøkum, undir hesum vinnugreinafeløg sambært almennu reglunum í revsilógini um viðvirkan.

Umframt at brotið skal vera framt tilætlað er eisini krav um, at brotið er av grovum slagi. Tað er í høvuðsheitum vavið av brotinum ella tann skaðavirknaður, sum brotið kann hava við sær, sum hevur ávirkan á, hvørt talan er um brot av grovum slagi.

Við vavi av brotinum er at skilja marknaðarútbreiðsluna av brotinum og hvussu leingi brotið hevur vart. Sambært ásetingini er tað ikki eitt krav, at tað kann staðfestast veruligur skaðavirkningur; tað er nøktandi at brotið er av einum slíkum slagi, at brotið kann viðføra ein skaða, ella er egnað hesum viðvíkjandi.

Er brotið ikki framt tilætlað ella av grovum slagi, eru treytirnar fyri fongsulsrevsing sambært ásetingini ikki til staðar.

§ 35. Stk. 5
Ásetingin er bert viðkomandi, um fíggjarligur vinningur er fingin við broti.

§ 35, stk. 6
Skotið verður upp, at fyrningarfreistin er 5 ár.

Til § 36
Ásetingin inniheldur serligar sektanarmannagongdir til ájáttanarmál.

Við ásetingini fær Kappingareftirlitið heimild til seta fram fyrisitingarligt sektaruppskot. Heimildin er tó avmarkað soleiðis, at ávísar treytir skulu verða loknar, áðrenn málið kann enda við einum fyrisitingarligum sektaruppskoti.

§ 36, stk. 1
Føst dómsvenja skal fyriliggja í mun til stødd á sekt, áðrenn Kappingareftirlitið kann seta fram fyrisitingarligt sektaruppskot.

Ein treyt fyri, at Kappingareftirlitið kann enda eitt mál við fyrisitingarligum sektaruppskoti er, at viðkomandi likamligi ella løgfrøðiligi persónur játtar seg sekan. Um likamligi ella løgfrøðiligi

persónurin ikki vil taka við fyrisitingarliga sektaruppskotinum, annaðhvørt tí viðkomandi ikki ynskir at játta seg sekan ella ikki ynskir, at Kappingareftirlitið tekur avgerð í málinum, fer málið til ákærumyndugleikan til vanliga revsirættarliga viðgerð.

Tríggjar treytir skulu sostatt verða loknar fyri, at mál kann enda við fyrisitingarligari sekt:

- at viðkomandi hevur játtað seg sekan at hava framt brotið,
- at viðkomandi hevur skilt og tekur undir við, at málið endar, tá ið viðkomandi hevur goldið sektina, og
- at málið er egnað at loka við fyrisitingarligum sektaruppskoti; føst praksis skal fyriliggja frammanundan.

§ 36, stk. 2
Ásetingar í rættargangslógini um krav til innihald av ákæruriti vera nýttar samsvarandi til sektaruppskot eftir hesi áseting.

§ 36, stk. 3
Ásett verður, at við sektarsamtykt fellur eftirfylgjandi rættarsókn burtur.

Til § 37
Gildiskoma lógarinnar.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 30. mars 2023

Høgni Hoydal

landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Norðurlendsk samstarvsavtala í kappingarmálum
Fylgiskjal 2: Ummælissvar til innkomin ummæli
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Føroya Kærustovni
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Kommunufelagnum